| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. september 2025 | Blað nr.: 519 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 18. september 2025 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 177/25 – 212/25**

**FUNDARLEIÐARI:**
Elsa Berg

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Heidi Lava Elgeirsdóttir
Annita á Fríðriksmørk
Anja Weyhe
Kristianna Winther Poulsen
Bergur Robert Dam Jensen
Guttormur í Skála
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Høgni Vilhelmsen
Birgir Nielsen

**LUTTÓKU EISINI:**
Fríður P. Dalsgarð
Eydna Justinussen
Eyðfríð Jacobsen
Hermann Mortensen
Mortan Simonsen
David Andresen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Haraldsen og Olga Knudsen

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 177/25 | 25/00163-1 | Mál beind í nevndir 2025 | 522 |
| 178/25 | 25/00196-1 | Val av 5 limum í musikkskúlanevndina | 524 |
| 179/25 | 25/08500-1 | Val av bygginevnd fyri Hoyvíkar skúla | 525 |
| 180/25 | 25/04920-4 | Gøtunavnanevndin : Navn til nýggja gøtu í Kaldbak | 526 |
| 181/25 | 25/05007-4 | Gøtunavnanevndin : Gøtunavn til nýggja síðugøtu við Oyggjarvegin | 528 |
| 182/25 | 25/05009-3 | Gøtunavnanevndin : Gøtunavn til nýggjan síðuveg á Argjavegnum | 530 |
| 183/25 | 25/02816-1 | Eldraráð í Tórshavnar kommunu | 532 |
| 184/25 | 25/05986-1 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum - 21/02924 | 539 |
| 185/25 | 25/08069-1 | Samstarvsavtala FMA | 545 |
| 186/25 | 25/02630-1 | Íbúðir, sum sosiala deild varðar av | 548 |
| 187/25 | 25/06061-1 | Eldradepil í Kollafirði | 555 |
| 188/25 | 25/05791-1 | Umbøn um eykajáttan til kontu 6510 Kirkjugarðar í 2025 | 559 |
| 189/25 | 25/05482-2 | Fyrispurningur um at yvirtaka matrikul 1020a, Tórshavn ísv. kampusætlanina fyri Fróðskaparsetur Føroya | 564 |
| 190/25 | 25/08097-2 | Kloakkarbeiði á Sundsvegnum 1. stig | 566 |
| 191/25 | 25/05378-1 | P-pláss í bygdini á Hvítanesi | 568 |
| 192/25 | 25/00243-1 | Innkomuvegur – íbindingar o.a. - 23/03480 | 570 |
| 193/25 | 25/05863-1 | Reinsiverk til vinnuútstykking á Ovara Hjalla - 22/01377 | 573 |
| 194/25 | 25/01179-1 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla - 22/01377 | 575 |
| 195/25 | 25/07373-6 | Málslýsing - Ummæli um sundurbýti av matr. nr. 55-1175a, Tórshavn | 583 |
| 196/25 | 25/07422-6 | Málslýsing - Fyribils støðgur av nýggjum loyvum til jarðhitaboringar á Tinganesi og í gomlu Havnini | 586 |
| 197/25 | 25/03896-1 | Parkeringspláss við omankoyringina til Hvítanes | 591 |
| 198/25 | 25/04579-3 | Liðugtgerð av brúnni um Sandá við garðin hjá Poul Müller | 594 |
| 199/25 | 25/06300-1 | Útbjóðing av ruskinnsavningini í Tórshavnar kommunu | 596 |
| 200/25 | 25/08179-1 | Umvæling av skrivstovunum á Brennistøðini | 602 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 201/25 | 25/03238-2 | Raðfestingar á løgukonto 7175 Renovasjón - 2025 | 604 |
| 202/25 | 25/07379-1 | Høvuðsumvæling av bygninginum "Steinatún" | 609 |
| 203/25 | 25/08024-23 | Góðselevatorar á Bacalao og í Sjóvinnuhúsinum | 613 |
| 204/25 | 25/02865-1 | Havnarøkið á Oyrareingjum | 615 |
| 205/25 | 25/08184-6 | Matr.nr. 4a, Sund. Leigusáttmálið TK. vegna Skótalið KFUM,s. Øki til skýli til skótarnar. | 618 |
| 206/25 | 25/07278-2 | Matr.nr. 91v, Kollafjørður. Umsókn um loyvi til víðarisølu. | 620 |
| 207/25 | 25/04319-4 | Áheitan at strika servitutt á matr. nr. 1470dr, Tórshavn | 622 |
| 208/25 | 25/06020-1 | Fíggjarætlan 2026, Tórshavnar kommuna | 625 |
| 209/25 | 25/00161-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2025 | 632 |
| 210/25 | 25/04664-4 | Dagføring av serstøku byggisamtyktini oman fyri Argjahamar, matr. nr. 256, Argir | 635 |
| 211/25 | 25/08524-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 1000a, Eirargarður 2, Tórshavn. Frá D3 til A2 og broyting av ásetingum | 642 |
| 212/25 | 25/08573-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Eirargarð, matr. nr. 1000a, Tórshavn | 645 |

**Til viðgerðar**

## 177/25 Mál beind í nevndir 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 34/25 | 25/00163-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 49/25 | 25/00163-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 68/25 | 25/00163-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 96/25 | 25/00163-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 120/25 | 25/00163-1 |
| 6 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 144/25 | 25/00163-1 |
| 7 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 177/25 | 25/00163-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Tikið til eftirtektar.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>18. september 2025 | Blað nr.: 524<br>Forkvinnunnar merki: |

# 178/25 Val av 5 limum í musikkskúlanevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 09.01.2025 | 24/25 | 25/00196-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 35/25 | 25/00196-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 178/25 | 25/00196-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. reglugerð frá 30. september 2009 um Tórshavnar Musikkskúla, velur býráðið fimm nevndarlimir í eina musikkskúlanevnd, ið hevur til endamáls at fremja áhugamál skúlans. Eisini arbeiðir nevndin fyri góðum korum hjá musikkskúlanum, miðar eftir at vekja ans fyri tónleiki og arbeiðir sum heild fyri áhugamálum musikkskúlans. Nevndin eigur saman við musikkskúlanum at eggja til eitt ríkt og fjøltáttað tónleikalív.

Í nevndini sita: Halla Samuelsen, Sára Gullfoss, Petur Frank Holm, Jákup Petur Eliasen, Malan Eyðunsdóttir.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir.

**Býráðsfundur 09. januar 2025:** Samtykt at velja Maluna Eyðunsdóttir, Johnhard Eliasen, John av Reyni, Hans Petur í Brekkunum og Leiv Simonsen.

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Samtykt at velja Hergeir Stakksberg í Musikkskúlanevndina fyri Hans Petur í Brekkunum.

**Ískoyti:**
Jonhard Eliasen hevur boðað frá, at hann tekur seg úr nevndini og tí skal nýggjur limur veljast.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Guttormur í Skála skeyt upp at velja Páll Oddur Rubeksen. Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>18. september 2025 | Blað nr.: 525<br>Forkvinnunnar merki: |

# 179/25 Val av bygginevnd fyri Hoyvíkar skúla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 179/25 | 25/08500-1 |

**Málslýsing**
Val av 2 býráðslimum í bygginevndina fyri Hoyvíkar skúla

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 2 limir í bygginevndina sambært lutfalsvalháttinum.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Kári Johansen skeyt vegna minnilutan upp at velja Trónd Sigurðsson.

Heidi Lava Elgeirsdóttir skeyt vegna meirilutan upp at velja Annitu á Fríðriksmørk.

Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at velja hesi í bygginevndina.

| | **Býráðsfundur**<br>18. september 2025 | Blað nr.: 526 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

# 180/25 Gøtunavnanevndin : Navn til nýggja gøtu í Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 23.06.2025 | 7/25 | 25/04920-4 |
| 2 Mentamálanevndin | 03.09.2025 | 92/25 | 25/04920-4 |
| 3 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 180/25 | 25/04920-4 |

**Upprunin til málið**
Áheitan frá Teknisku umsiting

**Lýsing av málinum**
Tekniska umsiting hevur heitt á Gøtunavnanevndina um at finna navn til nýggja privata útstykking í Kaldbak. Talan er um vegin matr. 49s í Kaldbak. Vegurin liggur nakað omanfyri skúlan í Kaldbak og byrjar í svinginum "á Soylugørðum".

Víst verður til samskifti við kaldbaksfólk í skjal 25/04920-2

Víst verður til myndina í málinum í skjal 25/04920-5

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Gøtunavnanevndin 23. juni 2025:** Gøtunavnanevndin mælir til, at vegurin fær navnið «á Kongsjørð».

Grundgevingin er, at tey kaldbaksfólk, sum varða av økinum, eru samd um, at á Kongsjørð er besta navnið. Siðvenja í Kaldbak er í mestan mun at nýta staðarnøvnini óbroytt.

**Mentamálanevndin 03. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>18. september 2025 | Blað nr.: 528<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 181/25 Gøtunavnanevndin : Gøtunavn til nýggja síðugøtu við Oyggjarvegin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 23.06.2025 | 6/25 | 25/05007-4 |
| 2 Mentamálanevndin | 03.09.2025 | 93/25 | 25/05007-4 |
| 3 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 181/25 | 25/05007-4 |

**Upprunin til málið**
Áheitan frá Teknisku umsiting.

**Lýsing av málinum**
Tekniska umsiting heitir á Gøtunavnanevndina at finna navn til vegin, ið kemur av Oyggjarvegnum (við Hotel Føroyar) og knýtir í Havnarveg.

Víst verður til myndina av økinum, skjal 25/05007-3.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Gøtunavnanevndin 23. juni 2025:** Gøtunavnanevndin mælir til, at vegurin fær navnið «Gilsvegur».

Grundgevingin er, at vegurin gongur tvørtur um sjálvt gilið, sum er Marknagil.

**Mentamálanevndin 03. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt.

| | **Býráðsfundur**<br>18. september 2025 | Blað nr.: 530<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 182/25 Gøtunavnanevndin : Gøtunavn til nýggjan síðuveg á Argjavegnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 23.06.2025 | 5/25 | 25/05009-3 |
| 2 Mentamálanevndin | 03.09.2025 | 94/25 | 25/05009-3 |
| 3 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 182/25 | 25/05009-3 |

**Upprunin til málið**
Áheitan frá Teknisku umsiting.

**Lýsing av málinum**
Tekniska umsiting heitir á Gøtunavnanevndina um at finna gøtunavn til nýggjan síðuveg á Argjavegnum. Talan er um nýggja útstykking millum Kráargøtu og Hannugøtu.

Víst verður til mynd av økinum, skjal 25/05009-4.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd   Ja ☐   Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Gøtunavnanevndin 23. juni 2025:** Gøtunavnanevndin mælir til at gøtan fær navnið «Lambatrøð»

Grundgevingin er, at útstykkingin, har vegurin gongur, er á eini trøð, ið nevnist Lambatrøð.

**Mentamálanevndin 03. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt.

# 183/25 Eldraráð í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 13.02.2025 | 5/25 | 25/02816-1 |
| 2 Heilsu- og eldranevndin | 04.09.2025 | 19/25 | 25/02816-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 138/25 | 25/02816-1 |
| 4 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 183/25 | 25/02816-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Eldraráð er ásett við grundarlagið í LL nr. 19 frá 7. Apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m í § 6 stk 2:

**§ 6.:** *Kommunurnar skulu tryggja, at borgarar í størst møguligan mun hava møguleika at verða hoyrdir, tá týðandi umskipanir, bygnaðarbroytingar o.t. verða framdar, sum hava ávirkan á tænastuna í økinum.*
***Stk. 2. Kommunurnar kunnu seta á stovn eldraráð í økinum, sum verða tikin við upp á ráð, tá avgerðir og umskipanir innan økið skulu fremjast****."*

Endamálið við Eldraráðnum er at tryggja, at eldri borgarar verða hoyrdir í viðurskiftum, sum viðkoma teimum, og at gagnnýta royndirnar og vitanina hjá teimum eldru mest møguligt. Ráðið skal eisini virka fyri, at tey eldru verða kunnað um broytingar og nýskapanir á eldraøkinum.

Eldraráðið er smb. §1 í viðtøkunum fyri Eldraráðið ráðgevi hjá Býráðnum, og kann av sínum eintingum siga býráðnum sína hugsan um eitthvørt evni av almennum áhuga fyri tey eldru, koma við uppskotum og seta spurningar og á hendan hátt byggja brúgv millum borgararnar og politisku skipanina.

Býráðið eigur smb. §2 stk 2 at spyrja Eldraráðið um tað, sum viðkemur teimum eldru, eins og býráðsnevndirnar smb. §2 stk 3 eigur at samskifta við Eldraráðið í málum, sum hava við teirra málsøki at gera.

Sostatt hevur Býráðið nakrar skyldur í mun til Eldraráðið, eins og Eldraráðið av sínum eintingum kann siga Býráðnum sína hugsan.

**Val til Eldraráð**
Val til Eldraráðið var fyrstu ferð í 2005. Ráðið hevði tá 5 limir og 5 varalimir.
Ein treyt er, at borgari skal vera 60 ár ella eldri, fyri at kunna stilla upp. Fyrstu árini var ongin trupulleiki at fáa fólk at stilla upp.
Val til Eldraráðið gongur fyri seg um sama mundi, sum val til býráðið, tó ikki samstundis.

Seinnu árini tvs. í 2020 og í 2024 hevur verið torført at fingið borgarar at stilla upp til Eldraráðið, og við bæði hesi valini var neyðugt at leingja uppstillingarfreistina. Í 2020 eydnaðist at fáa nokk fólk at stilla upp, men til seinasta val eydnaðist bert at fáa tríggjar borgarar at stilla upp og vali bleiv tí av ongum.

**Broyting í viðtøkum fyri Eldraráðið í 2024**
Í 2024 vóru viðtøkurnar fyri limir til Eldraráðið broyttar, har limatalið á 10 (5 limir + 5 varalimir) fór niður á 5 + 3 eykalimir. Endamálið var at tað skuldi gerast lættari at skipa Eldraráð.

Úrslitið var tó, at einans 3 borgarar stillaðu upp til Eldraráðið í 2024, sum tí var útsett.
Tó eru hesi árini fleiri borgarar omanfyri 60 ár, ið hava stillað upp til býráðsvalið.

**Fíggjarviðurskiftir hjá Eldraráðnum**
Heilsu- og umsorganarfyristingin umsitur eina upphædd árliga áljóðandi 200.000kr at nýta hjá Eldraráðnum. Upphæddin fer í høvuðsheitinum til leigu av Tilhaldinum, til marknaðarføring í samband við val til Eldraráðið og til skipan av árligum Eldradegi.

Eldraráðið hevur vanliga nevndarfund 1-2 ferðir um mánaðin í Tilhaldinum. Fundarsamsýning verður veitt fyri 1 mánaðarligan fund.

*Eldradagur*
Síðani 2017 hevur Eldraráðið skipað fyri Eldradegi á hvørjum ári, har fyrilestrar hava verið við viðkomandi evnum fyri eldri borgarar. Í 2024 valdi Eldraráðið at avlýsa Eldradagin, tí tey mettu seg hava avbjóðingar við at fáa fyrilestrahaldarar at játta luttøku á tiltakinum.

**Skipan av Eldraráðið í TK í mun til onnur kommunusamstørv**
Í viðtøkunum fyri Eldraráðini í Tórshavnar Kommunu, Roðanum (eldrasamstarvið á Skálafjørðinum) og NBH (Norðoya Bú- og Heimatænasta), eru ávísir munir á orðingunum og endamálinum við einum Eldraráðið.

Í TK er ásett, at Eldraráðið veitir Býráðnum ráð í eldrapolitiskum spurningum, og býráðið eigur at spyrja Eldraráðið um tað, sum viðkemur teimum eldru. Harafturat, at einstøku býráðsnevndirnar samskifta við Eldraráðið í málum, sum hava vit teirra málsøki at gera.

Hjá Roðanum og NBH er uppgávan somuleiðis ráðgevandi og sum millumlið, tó millum borgarar og *leiðslurnar* í Eldrasamstørvunum, og sostatt ikki beinleiðis í mun til sjálvt Býráðið ella býráðspolitiskar nevndir.

Í viðtøkunum hjá Roðanum og NBH er heldur onki orðað um staðbundnar nevndir.

Limir hjá Roðanum og NBH fáa heldur ikki fundarpening fyri fundir í Eldraráðnum, eins og í TK.
Tó verður veitt endurgjald fyri útreiðslur í smb. við fundarvirksemi.

Ein annar munur er, at val til Eldraráð í kommunusamstørvunum gongur fyri seg samstundis sum Býráðsval er, meðan val til Eldraráðið í TK hevur verið hildið áðrenn býráðsval í Snarskivuni.

Samanumtikið er munurin millum Eldraráðið í TK og Roðan/NBH, at í TK fevnir uppgávan hjá Eldraráðnum um alt Býráðið, meðan Eldraráðini fyri Roðan og NBH skulu fyrihalda seg til leiðslurnar innan Eldrasamstørvini, og ikki beinleiðis til politiska arbeiði í býráðnum ella nevndum.

**Skal TK broyta viðtøkurnar fyri Eldraráðið?**

*Neyvari orðað viðtøkur*
Sambært viðtøkunum fyri Eldraráðið eru hesar so mikið breitt orðaðar, at nærum ongir karmar eru fyri,hvat býráð og býráðsnevndir eiga at hoyra/upplýsa Eldraráðið um, og hvat Eldraráðið eigur at ráðgeva um.
Vansin við óneyvum orðingum er, at torført er at vita, hvørjar karmar arbeiðast skal innanfyri. Ein avleiðing er helst, at Eldraráðið ov sjáldan gerst hoyringspartur í mun til politisku nevndirnar og ætlandi politiskar avgerðir.

Ein møguleiki kundi tí verið at orðað neyvari viðtøkur fyri Eldraráðið, og flutt teirra málsøki frá at umfata alt Tórshavnar Býráð til í staðin at fevna um øki hjá Heilsu- og umsorganartænastuni.
Á tann hátt gerts helst greiðari, hvat er viðkomandi at hoyra og samskifta við Eldraráðið

um. Avstandurin til avgerðartakara vildi eisini minkað.

*Aldurmarkið á 60 ár*
Sambært verðandi viðtøkum er aldursmarkið fyri at stilla upp til Eldraráðið 60 ár. Avbjóðingar við at fáa borgarar at stilla upp kann møguliga vera, at tey sum eru um 60 ára aldur, ikki kenna seg aftur í einum Eldraráðið, og eins væl kunnu stilla upp til býráðsval.

Aldursmarkið átti tí at verið tikið upp í Eldranevndini, soleiðis at greitt gjørdist, um aldursmarkið skal varðveitast ella t.d flytast til 67 ár.

Samanumtikið eru hetta evnir, sum helst eiga at vera tikin upp í Heilsu – og Eldranevndini, og sum umsitingin síðani kann arbeiða víðari við.

**Lógir, ásetingar o.a.**
LL nr. 19 frá 7. Apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m

Viðtøkur fyri Eldraráðið

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúi í Heilsu- og umsorganarfyrisitingini mæla Heilsu- og eldranevndini til at taka undir við, at umsitingin arbeiðir víðari við at gera eitt tilmæli um nýtt Eldraráð, og at áseta neyvari karmar fyri hvørjar uppgávur eitt Eldraráð skal hava.

**Heilsu- og eldranevndin 13. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

**Upprunin til málið**
Val til Eldranevndina átti at verið tann 11. oktober 2024, men var útsett, tí bert 3 borgarar stillaðu upp.

Skipanin hevur ikki virkað eftir ætlan, m.a. tí mett verður at virkisøkið hjá Eldraráðnum er ov ógreitt. Tí er høvi nýtt til at endurskoða skipanina og viðtøkurnar fyri Eldraráðið, sum møguliga ikki eru nóg greiðar

Býráðið samtykti 19.09.2024 at útseta valið til eldraráðið og at fara undir at endurskoða leistin fyri eldraráðið, áðrenn farið verður undir nýtt val.

**Lýsing av málinum**
Eldraráðið varð sett á stovn í 2006 og hevur virkað fram til 31. des. 2024. Fleiri tey síðstu árini hevur verið trupult at fáa nokk av fólki at stilla upp til val, og tvær tær seinastu ferðirnar hevur verið neyðugt at longja freistina fyri at stilla upp.

Eisini hevur undanfarna eldraráð ført fram, at tey ikki meta, at eldraráðið í nógv stóran mun eru tikið við og hoyrt um viðurskifti sum eldraráðið eigur at hoyrast um. Umsitingin metir, at hald er í hesum og er av tí áskoðan at ein partur av hesum kemst av at viðtøkurnar hava verið ov breiðar og tí kunnu tulkast uppá ymsar mátar.

Býráðið samtykti í sept. 2024 at endurskoða skipanina, áðrenn nýtt eldraráð bleiv valt.

Grundarlagið undir endurskoðaðu viðtøkunum er LL nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

§ 6.: *Kommunurnar skulu tryggja, at borgarar í størst møguligan mun hava møguleika at verða hoyrdir, tá týðandi umskipanir, bygnaðarbroytingar o.t. verða framdar, sum hava ávirkan á tænastuna í økinum. Stk. 2. Kommunurnar kunnu seta á stovn eldraráð í økinum, sum verða tikin við upp á ráð, tá avgerðir og umskipanir innan økið skulu fremjast.”*

Endamálið við Eldraráðnum er at tryggja, at eldri borgarar verða hoyrdir í viðurskiftum, sum viðkoma teimum, og at gagnnýta royndirnar og vitanina hjá teimum eldru mest møguligt. Ráðið skal eisini virka fyri, at tey eldru verða kunnað um tænastur og tilboð, broytingar og nýskapanir á eldraøkinum.

| **Galdandi viðtøkur** | **Endurskoðaðar viðtøkur** |
|---|---|
| Eldraráðið ráðgevur Býráðnum í øllum eldrapolitiskum spurningum og er bindilið millum teir eldru borgararnar og kommununa.<br><br>Eldraráðið kemur við hugskotum og virkar fyri, at vitan og royndir hjá teimum gomlu verða virðismett og gagnnýtt.<br><br>Eldraráðið kann:<br>- úttala seg um eitthvørt evni, sum hevur áhuga hjá teimum gomlu<br>- koma við hugskotum<br>- seta spurningar til Býráðið um eldrapolitikkin og fíggjarætlanina. | Í Løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m. er ásett í § 6, stk. 2 at “*kommunurnar kunnu seta á stovn eldraráð í økinum , sum verður tikið við upp á ráð, tá avgerðir og umskipanir innan økið skulu fremjast”.*<br><br>Við støði í hesari lóg verður Eldraráð skipa í Tórshavnar kommunu.<br><br>Umframt tað sum Løgtingslóg nr. 19 frá 7. 2014 apríl um heimatænastu, eldrarøkt v.m. umfatar, eru onnur øki í kommununi sum eru viðkomandi fyri Eldraráðið. Her verður hugsað um t.d. bussleiðina, mentanar- og frítíðartilboð og kommunulæknaviðurskifti. Tí fevna viðtøkurnar |

| | |
|---|---|
| Eldraráðið eigur ikki at viðgera mál viðvíkjandi ávísum persónum | fyri Eldraráðið eisini um onnur øki sum beinleiðis hava ávirkan á lívið, sum eldri borgari í Tórshavnar kommunu.<br><br>Eldraráðið skal ikki viðgera persónsmál. |
| <u>§ 1 Endamál</u><br>Stk. 2 Eldraráðið verður kunnað um tiltøk, sum hava týdning fyri tey eldru, og eigur at samarbeiða við Býráðið fyri at tryggja, at atlit verður tikið til ynski og tørv teirra eldru.<br>Stk. 3 Eldraráðið skal koma við hugskotum og skal virka fyri, at vitan og royndir hjá teimum gomlu verða virðismett og gagnnýtt | <u>§ 1 Endamál</u><br>Stk 2. Eldraráðið verður kunnað um tiltøk, sum hava týdning fyri tey eldru, og eigur at samstarva við Býráðið **umvegis Heilsu- og eldranevndina** fyri at tryggja, at atlit verður tikið til ynski og tørv teirra eldru.<br>Stk 3 Eldraráðið **kann** koma við hugskotum og skal virka fyri, at vitan og royndir hjá teimum gomlu verða virðismett og gagnnýtt**.** |
| <u>§ 2 Heimild</u><br>Stk. 1 Eldraráðið veitir Býráðnum ráð í eldrapolitiskum spurningum og virkar sum ein samskiftisstovnur millum borgarar og Býráðið í sambandi við tilrættaleggingina av eldrapolitikkinum<br>Stk. 2 Býráðið eigur spyrja Eldraráðið um tað, sum viðkemur eldru<br>Stk 4 Eldraráðið kann av sínum eintingum siga Býráðnum sína hugsan um eitthvørt evni av almennum áhuga fyri tey eldru, koma við hugskotum og uppskotum og seta spurningar. | <u>§ 2 Heimild</u><br>Stk. 1 Eldraráðið verður tikið við uppá ráð og kann veita býráðnum ráð í eldrapolitiskum spurningum.<br>Stk. 2 (nýtt stk.) Eldraráðið virkar sum bindilið millum eldri borgarar og býráðið í sambandi við tilrættaleggingina av eldrapolitikkinum<br>Stk.3 Býráðið **kann** spyrja Eldraráðið um tað, sum viðkemur eldru<br>Stk. 4 Eldraráðið kann av sínum eintingum siga Býráðnum sína hugsan um eitthvørt evni av almennum áhuga fyri tey eldru, ~~koma við hugskotum og uppskotum og seta spurningar~~. |
| <u>§ 3 Starvsháttur Eldraráðsins</u><br>Stk. 2 Eldraráðið skal virka fyri áhaldandi kunning til tey eldru um broytingar og nýskipan á eldraøkinum.<br>Stk. 4 Eldraráðið eigur at hoyra tær hoyra tær staðbundnu nevndirnar (Kollafjarðar-Nólsoyarnevndina o.s.fr.) í málum á eldraøkinum | <u>§ 3 Starvsháttur Eldraráðsins</u><br>Stk. 2 Eldraráðið skal virka fyri áhaldandi kunning til eldri borgarar um **tilboð og tænastur,** broytingar og nýskipanir á eldraøkinum<br>Stk. 4 Eldraráðið **kann** samskifta við staðbundnu nevndirnar um mál á eldraøkinum |
| <u>§ 4 Eldraráðsins samanseting</u><br>Stk. 2 Valskeiðið er 4 ár.<br>Stk. 6 Er eingin varalimur á varalistanum at seta ístaðin, verður eykaval í samráð við Tórshavnar kommunu. | <u>§ 4 Eldraráðsins samanseting</u><br>Stk. 2 **Valskeiðið fylgir býráðsskeiðinum. Valskeiðið byrjar 1. januar og er 4 ár. Fyri Valskeiðið 2026-2028 er er valskeiðið bert 3 ár**<br>Stk. 6 Er eingin varalimur á varalistanum at seta ístaðin, **kann** í samráð við Tórshavnar kommunu verða skipað fyri eykavali. |
| <u>§ 5 Val til Eldraráðið</u><br>Stk. 5 Valnevndin skipar fyri valinum, og tekur støðu til, hvussu valið fer fram. | <u>§ 5 Val til Eldraráðið</u><br>Stk. 5 Valnevndin skipar fyri valinum, og tekur støðu til, hvussu valið fer fram. **Heilsu- og eldranevndin er valnevnd.** |

| | |
|---|---|
| <u>§ 6 Stovnan og arbeiðsháttur</u><br>Stk. 1 Eldraráðið skipar seg við formanni, næstformanni, kassameistara og skrivara á fyrsta fundi eftir valið.<br>Stk. 3 Dagskrá og fundarfrásøgn skal sendast til Býráðið. Fundarfrásøgnin er almenn við virðing fyri tagnarskylduni. | <u>§ 6 Stovnan og arbeiðsháttur</u><br>Stk. 1 Eldraráðið skipar seg við for**fólki**, næstfor**fólki**, kassameistara og skrivara á fyrsta fundi eftir valið.<br>Stk. 3 Dagskrá og fundarfrásøgn skal sendast til **Heilsu- og umsorganarfyrisitingina** sum almannakunngerð fundarfrásøgnina við virðing fyri tagnarskylduni. |

Uppskotið til viðtøkubroytingar hevur verið til viðmerkingar hjá Áhugabólkur pensjónista og fráfarandi nevnd í Eldraráðnum.

Áhugabólkurin ynskir, at valskeiðið skal vera frá 1. november 2025 og ikki frá 1. januar 2026. Hetta ber tó ikki til, tí endurskoðaðu viðtøkurnar í fyrsta lagi kunnu samtykkjast í býráðnum síðst í septembur. Eftir hetta er eitt tíðarskeið har fólk kunnu stilla upp. Søguliga hevur tað víst seg, at hendan tíðin ikki má vera ov stutt, tí tað hevur verið trupult at fáa fólk at stilla upp. Eftir at uppstillingartíðin er av, skal lýsast við valinum og so gongur aftur ein tíð áðrenn valið kann haldast. Tað vil siga, at tað er ov stutt skotbrá at fáa uppstilling og val avgreitt innanfyri ein mánað, og tí heldur umsitingin fast við at valskeiðið má byrja 1. januar 2026.

Øll, sum hava viðmerkt, hava mett at valbari og vælrætt skulu øll hava sum eru 60 ár og eldri. M.a. er ein grundgeving at 60 ár er definitiónin hjá WHO fyri nær ein er at rokna sum eldri, og at man eigur at kunna vera limur í eldraráðnum og hava ávirkan á hvør er í eldraráðnum, áðrenn man gerst fólkapensjónistur. Áhugabólkurin hevur nevnt á fundi at tey mettu at aldurin skuldi setast upp, men skrivar í viðmerkingunum at hann skal fasthaldast á 60 árum. Báðir limirnir frá undanfarna eldraráði sum hava svara, meta rættast er at fasthalda aldurin á 60 ár.
Umsitingin tekur til eftirtektar, ynski hjá hoyringspørtunum um aldur og heldur fast í galdandi viðtøkum um aldursmark.

Áhugabólkurin metir at samsýningin eigur at fara upp. Í TK er samsýningin til eldraráðið ein fundur um mánaðin svarandi til fundarsamsýning fyri 3 tímar. Onnur eldraráð í Føroyum fáa ikki samsýning og hetta er heldur ikki vanligt í Danmark. Umsitingin metur at man eigur at halda fast við verandi samsýning.

Umsitingin metir, at viðtøkurnar eiga at vera endurskoðaðar aftur, tá komandi eldraráð hevur sitið í 2 ár. Tvs. at eldraráðið er við til at endurskoða viðtøkurnar og evt. broytingar kunnu vera samtyktar, áðrenn val aftur verður til eldraráðið í 2027.

Av tí at onki eldraráð er virkið í løtuni er neyðugt at halda val í úrtíð, til tess er neyðugt við einari býráðssamtykt.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og leiðarin á Heilsu- og umsorganarfyrisitingini mæla Heilsu- og eldranevndini til,

- at taka undir við endurskoðaðu viðtøkunum.
- at taka undir við at val til eldraráðið verður hildið í 2025 og at Heilsu- og eldranevndin er valnevnd,

At leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 04. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>18. september 2025 | Blað nr.: 539<br>Forkvinnunnar merki: |

# 184/25 Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum - 21/02924

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.06.2025 | 77/25 | 25/05986-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 03.09.2025 | 90/25 | 25/05986-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 135/25 | 25/05986-1 |
| 4 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 184/25 | 25/05986-1 |
| 5 Býráðsfundur | | | 25/05986-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekstur og tilfar kemur áðrenn fundin.

**Mentamálanevndin 04. juni 2025:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | 3175 | L31011 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | | 2.251.000 |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Umbiðið hesa ferð | Upphædd: | 2.251.000 |
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 71.185.391,65 |
| Áður játtað | Upphædd: | 68.935.343,38 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Mál til viðgerðar: 25/05986 Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum**
Fleiri avleiddar verkætlanir eru íkomnar rundanum økið við Dagstovnin á Hamrinum, sum verða lýst niðanfyri. Talan er í høvuðsheitum um hesi arbeiði:

**Uttandura arbeiði**
*Stuðlaveggur,* sí skjal 1 & sí skjal A-C, j.nr. 25/05986-3, 25/05986-4, 25/05986-5 og 25/05986-6
*Skifta brotnar pelar og lækka hegn til 4 m. við FIFA vøll,* sí skjal 2, j.nr. 25/05986-7
*Gøta, trappa í lendi og tvey portur til FIFA vøll,* sí skjal 2 j.nr. 25/05986-7 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-8
*Klæðing av rimaverki, sí skjal 2B, j.nr. 25/05986-9*
*Tilboð Graslíki á Dagstovninum á Hamrinum á Argjum, veiting og álegging av graslíki/undirlendi íroknað, sí skjal 2C, j.nr. 25/05986-10*
*Avskerming av vøggustovuøki og barnagarðsøki, garður,* sí skjal 3, j.nr. 25/05986-11

**Innandura arbeiði í verandi stovni**
*Køkur*
*Umbygging í verandi stovni*
*Skilaveggir, ovnar, køliskáp o.a.*
*Hæve/sænkeborð – broyting av skiftirúmum*
*Annað*
*Stuðlaveggur*
Avbjóðingar hava verið við lendisviðurskiftum og uttanumøkinum á eystanfyri Dagstovnin á Hamrinum. Stórur hæddarmunur hevur verið við ovara benið og vegin. Fyri at økið kann vera trygt og at arbeiðið ikki verður steðgað upp hjá báðum arbeiðstakarum á staðnum, Búsetur og RTS, hevur verið neyðugt gera eykaarbeiðið á stuðlavegg framvið vegnum mótvegis økinum við Dagstovnin á Hamrinum. Umsitingin hevur verið í samráðingum við arbeiðstakaran, RTS, um at gera stuðlaveggin við uttanumøkið hjá Dagstovninum á Hamrinum, tí stuðlaveggurin liggur á arbeiðsøkinum hjá RTS. RTS hevur veitt tilboð á hetta arbeiðið at gera stuðlavegg á 50 m, sum 2m høgur og 20cm tjúkkur, íroknað fundament til stuðlavegg

50 m x 0,4 m x 0,4 m. Verkætlanin L31011 hevur fyribils fíggjað hetta arbeiðið, sí skjal 1, skjal 1A, skjal 1B, skjal 1C, j.nr. 25/05986-3, 25/05986-4, 25/05986-5 og 25/05986-6.

Samlaður prísur fyri at hava gjørt hesi arbeiðið er áljóðandi tls.

| | |
|---|---|
| Tilboð á stuðlavegg (RTS) | 349.260,00 u/mvg |
| Prosjektering (LBF) | 20.366,75 u/mvg |
| Kvalitetsikring/eftirlit (LBF) | 5.205,00 u/mvg |
| Til samans uttan mvg. | **374.831,75 u/mvg** |

*Umbygging og nýtsla av FIFA vølli við Dagstovnin á Hamrinum.*
Dagstovnurin á Hamrinum hevur tørv á at fáa eina loysn viðvíkjandi málinum um FIFA vøllin.
Manglandi atgongd til sparkivøllin skapar eina ótrygga støðu, tá skúlabørn skulu á vøllin í fríkorterum og tá børn í frítíðini spretta net meskarnar í málinum upp fyri at fáa atgongd. Tí er bráðfeingistørvur at fáa loysn á málinum.

Skúlin á Argjahamri hevur havt tørv á eini høgligari leið inn á sparkivøllin, sum er trygg í mun til virksemi hjá dagstovninum.

Børnini í grannalagnum hava eisini tørv á eini høgligari leið inn á sparkivøllin, sum er trygg í mun til virksemi hjá dagstovninum. Byggiprosjekt er sum nú er á staðnum, har byggihegn er sett rundanum vøllin og spæliplássið hjá dagstovninum er flutt, soleiðis at eingin atgongd er til vøllin, uttan gjøgnum høvuðsportrið til dagstovnin.

Umsitingin hevur verið í samskifti við Eigarafelagið á Hamrinum, sum FIFA vøllurin av fyrstani tíð hevur verið bygdur/ætlaður til. Loysnin á málið verður, at tá ið byggiprosjektið er liðugt verður rás, trappa í lendi og tvey portur eystanfyri FIFA vøllin gjørt til børnini á dagstovninum og hjá børnum í grannalagnum annars at nýta um kvøldarnar og í frítíðini sum heild, tá ið stovnurin er stongdur, sí skjal 2 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-7 og 25/05986-8

Eigarafelagið uppi á Hamrinum hevur viðmerkingar at bøta skaðan á verandi hegn rundanum og gera tvey portur, rás, trappu í lendi, sum framvíst, er ein nøktandi loysn.
Eigarafelagið viðmerkir kortini, at vøllurin ikki er í góðum standi, og at vøllurin tíðum er dekkaður við sandi í pørtum av vøllinum, soleiðis at mann ikki kann brúka vøllin. Ynskið er at fáa nýtt graslíki á vøllin og at ein betri loysn verður funnin við at eingin sandur kemur á vøllin, ella í munandi minni mát. Umsitingin hevur kannað málið saman við arbeiðstakaranum og er komin til ta loysn at skerma vøllin betri av frá plássinum við at klæða rimaverkið, soleiðis at børnini ikki sleppa at koyra sand inná vøllin, sí skjal 2B_Klæðing av rimaverki, j.nr. 25/05986-9.

Umsitingin somuleiðis biðið um tilboð á veiting og álegging av graslíki/undirlendi íroknað, sí skjal 2C, j.nr. 25/05986-10.

*Afturbøting av verandi hegni við FIFA vøll*
Verandi hegn rundanum FIFA vøllin varð skatt í vetur. Umsitingin hevur biðið Búsetur kannað málið, hvat ið skilabest er at gera. Búsetur boða frá, at hegnið rundanum er sera høgt og viðbrekið og tað ber illani til at dimensionera og uppbyggja eitt fundament, sum tolir føroyska veðurlagi, tá ið hegni er somikið høgt. Fyri stoyping stórum fundamentum mugu gerast størri inntriv á vøllin og økið annars. Búsetur leggur upp til at seta skrástívarar í, afturbøta verandi pelar og at lækka hegni í til 4 metrar, sí skjal 2 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-7 og 25/05986-8.

*Avskerming av vøggustovuøki og barnagarðsøki við garði/stakitti*

Ynski er frá stovninum at fáa avskerma vøggustovuøkið og barnagarðsøkið við garði. Hetta hevur ikki verið við í prosjektinum. Búsetur hevur veitt tilboð á hetta arbeiðið, áljóðandi 76.053,00 u/mvg, sí skjal 3, j.nr. 25/05986-11

Umsitingin hevur verið í samráð við Búsetur at veita eitt samlað tilboð á ymisk arbeiðið við FIFA vøllin, sí sí skjal 2 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-7 og 25/05986-8.

| | |
|---|---|
| Gera gøtu, trappu í lendi og tvey portur til FIFA vøll: | 106.024,00 u/mvg |
| Skifta brotnar pelar og lækka hegn til 4 m. við FIFA vøll: | 108.000,00 u/mvg |
| Til samans uttan mvg. | **261.614,24 u/mvg** |

**Innandura arbeiði**
Umsitingin hevur verið í samráð við Búsetur um at gera eina samlað loysn og heildartilboð á tilbygging av køki og goymslu í verandi stovni, veiting og montering av nýggjum av køki, ymiskum eykaarbeiði í verandi stovni. Hetta arbeiðið umfatar:

- Verandi veggur við køk verður niðurtikin og berandi límdrakari verður bygdur ístaðin
- Nýggjur køkur sum víst í prinsippi í hjáløgdu skitsu. Ovnar (1 industri + 1 vanligur), 2 kóki plátur á 80 cm uml, og avtrekk verður á somu síðu uttan til høgru, sum verandi.
- Eymhetta/ur skulu monterast í loft.
- Industri vaskimaskina - flutt út mótvegis útiveggi. Vask verður eftir flutt út mótvegis útveggi.
- Rustfrí borðpláta.
- Niðurtøku av verandi foldiveggi og umgerð av goymslurúmi.
- Nýggj høg skáp úr góðari góðsku v/foldivegg.
- Avmontering og eftirmontering av radiatori v/rørføringum.
- Í køkstilboðnum skal prosjektering av køkim´samskifti skal gerast av professionellum køksveitara - alt neyðugt samskifti til brúkarans krøv og ynski (eftirjusteringar) av hyllum skáp við øllum, sum hartil hoyrir - skal verða íroknað
- Yvirskáp ynskjast ikki men heldur góðar hyllar og høgskáp(serliga í trýkantinum, har sum ovnar eru)
- Eitt køliskáp skal vera undir borðinum nær við oynna
- 4 nýggj frystiskáp
- Køliskáp og ovnar í stovunum í verandi stovni
- Fleiri gardropur í verandi stovni í sambandi við, at stovnurin verður broyttur frá vøggustovu til barnagarðsstovu
- Broytingar av borðum og vøskum o.a.
- Veiting og montering av skilaveggjum millum w.c. kummur. BH ynskir tilboð á avmontering/flyting av vaski(flutt-stillað hægri), veiting og montering av nýggjum kranum í vøskum, burturtakan av einum skiftiborð við vaski og veiting og montering av nýggjari borðplátu.
- Broytingar í skiftirúmum. 2 hæve/sænkeborð til 4 vøggustovur, somuleiðis ynskir mann eyka funktiónir inn í skiftirúmini fyri 4 vøggustovur.
- Skilaveggir / spanskveggir
- Nýggj køliskáp og ovn í tveimum stovum í verandi stovni
- Starvsfólkarúm
- Tilhoyrandi timburarbeiði, el arbeiði, hvs arbeiði, málaraarbeiði.

Búsetur hevur veitt samlað tilboð á hesi arbeiði, sum er áljóðandi: 975.776,00, sí skjal 4, j.nr. 25/05986-12

**Samlað fígging**
Samlað fígging til avleiddar verkætlanir, ið eru íkomnar rundanum økið við Dagstovnin á Hamrinum, sí skjal 5, j.nr. 25/05986-13.

**Uttandura arbeiði**

| | |
|---|---|
| Stuðlaveggur | 374.831,75 u/mvg |
| Ymiskt við FIFA vøll | 261.614,24 u/mvg |
| Avskerming av vøggustovuøki og barnagarðsøki, garður | 86.153,00 u/mvg |
| Skjal 2B_Klæðing av rimaverki | 30.000,00 u/mvg |
| Skjal 2C_Tilboð Graslíki á Dagstovninum á Hamrinum | 196.800,00 u/mvg |
| Til samans uttan mvg. | 949.398,99 u/mvg |

**Innandura arbeiði**
*Skiftirúm – puslirúm*
*Starvsfólkarúm*
*Klárgera rúm til nýggjan køk*
*Nýggjur køkur*
*Hvítvørur til nýggjan køk*
*Barnagarður í verandi stovni*
*Flyta gardropuskáp*
*Nýggj gardropuskáp*
*Flyta vaskirennur*
*Nýggj w.c. kumma*
*Spanskveggir*
Tilhoyrandi timburarbeiði, el arbeiði, hvs arbeiði, málaraarbeiði.

| | | |
|---|---|---|
| Til samans uttan mvg. | 975.776,00 | u/mvg |
| | | |
| Samlað fyri innandura og uttandura arbeiði u/mvg | 1.925.174,99 | u/mvg |
| Ókendar útreiðslur | 192.517,50 | u/mvg |
| Til samans uttan mvg | 2.117.692,49 | u/mvg |
| | | |
| **Til samans við mvg (6,25%)** | **2.250.048,27** | **v/mvg** |

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á bygningsdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at tikið verður undir við fyriliggjandi tilboðum, og at byggiarbeiðið verður sett í gongd eftir leisti, sum lýst omanfyri
- At játtaðar verða 2.251.000 kr. á Løgukonto L31011, Útbygging – Dagstovnurin á Hamrinum. Fíggjað av tøkum peningi frá 2024.
- at tikið verður undir við fyriliggjandi samlaðu fíggingini.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir.

**Mentamálanevndin 03. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum við tí nágreining, at fíggingin verður játtað av meirinntøkum fyri 2024.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

# 185/25 Samstarvsavtala FMA

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.09.2025 | 104/25 | 25/08069-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 136/25 | 25/08069-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 185/25 | 25/08069-1 |
| 4 Býráðsfundur | | | 25/08069-1 |

**Upprunin til málið**
Umbøn frá borgarstjóranum

**Lýsing av málinum**
Ynski er um at fáa Faroese Music Awards (FMA), sum í fjør var í Varpinum í Klaksvík eftir nógv ár í Norðurlandahúsinum, aftur til Havnar.

Tórshavn er høvuðsstaður og tónleikahøvuðsstaður Føroya og tískil eigur størsta hátíðarhaldið fyri tónleikin eisini at vera í Havn.

Tónleikasamband Føroya er í dag høvuðssamskipari fyri FMA í tøttum samstarvi við Kringvarp Føroya. Norðurlandahúsið, sum í nógv ár var við til at skipa fyri tiltakinum og fíggja tað, tók seg vegna sparingar fyri nøkrum árum síðani úr samstarvinum sum ábyrgdari, tó at tey fegin leggja høli og annað til. Varpið og Klaksvíkar kommuna bjóðaðu seg fram at hýsa tiltakinum og átaka sær ein stóran part av kostnaðinum, og tískil flutti tiltakið til Klaksvíkar í ár. Tað merkti tó m.a. at ongi pre-events, sum m.a. Tórsgøta var við til at skipa fyri í fleiri ár, vóru.

Fyriskipararnir av FMA eru sinnað at gera eina fleirára avtalu, sum tryggjar, at FMA framyvir verður í Havn. Norðurlandahúsið, Kringvarp Føroya og Tónleikasambandi Føroya eru øll jalig um eina tílíka avtalu, har tey hvør sær binda seg til at levera ávikavist høli, sjónvarpsframleiðslu og fyriskipan av tiltakinum. Tórshavnar kommuna skal harafturímóti vera høvuðsstuðul við 150.000kr um árið í 3 ár og veita høli í Tórsgøtu til 3 pre-events og afterparty. Upphæddin er svarar til tær 50.000kr, sum TK vanliga stuðlar FMA við + 100.000kr, sum er kostnaðurin av at framleiða tiltakið í Norðurlandahúsinum (hetta eru faktiskir kostnaðir, og ikki leigukostnaður ella líknandi, sum Norðurlandahúsið letur sum vistir).

Tónleikasamband Føroya og Kringvarp Føroya leggja hvør sær á leið 500.000kr í tiltakið.

Umframt at verða lýst sum høvuðsstuðul av tiltakinum fær Tórshavnar kommuna umboð í stýrisbólkin fyri tiltakið m.a. fyri at tryggja, at avtalan verður hildin, og treytirnar uppfyltar.

Við at gera eina tílíka avtalu um FMA og fíggja tað av aðrari kontu enn stuðulskontunum (t.e. konto 5360 Virðislønir o.a.), geva vit fleiri aktørum atgongd til mentanarstuðulin hjá kommununi, sum mestsum fasti stuðulin til FMA annars er farin burturav.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Við umskipanini av stuðulsskipanini, har stuðul yvir 20.000kr verður latin 3 ferð um árið og ávís upphædd er avsett til tess hvørjaferð, er skilagott at afturvendandi tiltøk sum t.d. FMA fáa øðrvísi avtalur. Hetta er við til at tryggja, at oyramerkta stuðulsupphæddin til hvørt umfar er vard og tøk í heilum líki og kann

deilast rættvíst út til umsøkjarar, heldur enn at stórir partar fara burturav til tiltøk, sum hava fingið mestsum fast stuðul hvørt ár.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
25/01285 Tónleikasamband Føroya, umsókn um stuðul til FMA 2025
23/07277 Tónleikasamband Føroya: Umsókn um stuðul til FMA 2024 og Spæl Føroyskt

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
FMA 2026 Samstarvsavtala – rættað 28. august

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| | | | 5360 | | Virðirslønir o.a. | | 150.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja avtaluna og at játta 150.000 kr í stuðli til FMA um árið í trý ár av konto 5360 Virðislønir o.a. Eisini verður mælt til at hækka játtanina á hesi kontu við 150.000 kr í fíggjarætlanini fyri 2026.

Mælt verður harumframt til at umboð fyri mentamáladeildina verður limur í stýrisbólkinum fyri FMA vegna Tórshavnar kommunu.

**Mentamálanevndin 03. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí broyting at stuðulin verður játtaður av konto 5371 Rakstrarstuðul - Mentan og list, og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

## 186/25 Íbúðir, sum sosiala deild varðar av

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 13.02.2025 | 11/25 | 25/02630-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 08.05.2025 | 27/25 | 25/02630-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 05.06.2025 | 42/25 | 25/02630-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 104/25 | 25/02630-1 |
| 5 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 150/25 | 25/02630-1 |
| 6 Trivnaðarnevndin | 04.09.2025 | 47/25 | 25/02630-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 137/25 | 25/02630-1 |
| 8 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 186/25 | 25/02630-1 |

**Upprunin til málið**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á sosialu deild og deildarleiðarin á bygningsdeildini ynskja at fáa mál á skrá til kunning á komandi trivnaðarnevndarfund.

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna eigur 28 íbúðir, sum sosiala deild varðar av á tann hátt, at tað er sosiala deild, sum umsitur og visiterar borgarar til íbúðirnar. Tað er bygningsdeildin, sum hevur ábyrgd av viðlíkahaldinum og raðfesting av fígging til tann partin.

Fleiri av borgarunum hava búð í hesum íbúðum í nógv ár, men eru eisini íbúðir, har borgarar búgva í styttri tíðarskeið. Tá tey flyta út, skulu íbúðirnar dagførast, og fleiri av teimum eru í so ringum standi, at tørvur er á eyka fíggingin.

Tørvur er á:
- At lýsa standin á íbúðunum
- At gera eina kostnaðarmeting av hvat tað kostar at dagføra íbúðirnar
- At gera eina skrivliga lýsing av tørvinum hjá borgarunum
- At gera eina skrivliga leiðbeining (visitatión, leigusáttmála o.a.)
- At endurskoða húsaleiguna

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl:**

Viðheft skjal har yvirlit yvir íbúðirnar eru.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin á sosialu deild mæla til at málið um sosialu íbúðirnar og tørvin verður kannað og lýst nærri.

At málið kemur aftur í Trivnaðarnevndina til støðutakan tá málið er lýst.

**Trivnaðarnevndin 13. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Vísandi til omanfyristandandi, so hevur Trivnaðarnevndin samtykt at málið um sosialu íbúðirnar verður kannað, umframt at tørvurin av sosialu íbúðunum verður lýstur. Omanfyri verður lýst núverandi gongd í málinum.

Bygningsdeildin
Bygningsdeildin er farin í eina tilgongd, har allar íbúðirnar verða screen'aðar, bæði innan og uttan og verður eitt skjal útfylt í hesum sambandi. Á henda hátt fær man eina lýsing av núverandi standi, og um íbúðirnar lúka/ikki lúka neyðug krøv. Arbeiðið verður væntandi liðugt í juni 2025. Kostnaðarmetingin fyri viðlíkahald / dagføring eigur eisini at leggjast afturat, soleiðis at støða kann takast til, um tað loysir seg at dagføra íbúðirnar ella um annað skal gerast.

Um tað eru íbúðir / bygningar, har tað verður mett, at tað fíggjarliga ikki loysir seg at varðveita, so skal tað eisini lýsast.

**Sosiala deild**
Í verandi løtu verður ein skrivlig leiðbeining gjørd, har tað verður hugt eftir undanfarnum vegleiðingum hjá kommununi, umframt við íblástri frá leiðbeiningum hjá Almannaverkinum í smb. við sosialu íbúðirnar tey varða av í samstarvið við Bústaðir. Tað er umráðandi at tað liggur ein dagførd leiðbeining.

Tað eru 28 íbúðir, og tað er javnan at borgarar í Tórshavnar kommunu seta seg í smb. við Sosialu deild, tí tey ynskja at verða skrivaði upp og/ella tosa um møguleikan fyri at kunna leiga eina íbúð. Í teimum flestu íbúðunum hava leigararnir búð í nógv ár, nøkur størsta partin av teirra lívi. Síðani eru tað nakrar íbúðir,

sum hava verið tøkar okkurt tíðarskeið, og tá eru tað ofta stakir uppihaldarar við børnum undir 18 ár, sum hava fingið íbúðirnar. Talan er eisini um borgarar, sum kunnu skrivast upp til sosialar íbúðir í Almannaverkinum.

Í løtuni er ein íbúð í Lon, sum hevur staðið tóm síðani heystið 2023. Uppskot eru gjørd um dagføring av íbúðini, men er talan um eina upphædd á áleið 1,5 – 2 mió, og manglar játtan til hetta. Tað er umráðandi at íbúðin verður dagførd, men støða skal takast til, um dagføringini er ein partur av einari samlaðari dagføring av íbúðunum í Lon, ella um hetta er ein dagføring, sum verður gjørd nú, og so verða sosialu íbúðirnar dagførdar ein og ein, sum fólk flyta út.

**Ynskir frameftir**
Afturat teimum borgarum yvir 18 ár, sum hava tørv á sosialum íbúðum, so setur Barnaverndartænastan (BVT) javnan fyriskipanir í verk, har man stuðlar ungum undir 18 ár eftir *lóg um barnavernd §15, stk. 1, nr. 11) Veita stuðul til barn, 16 ár ella eldri, í egnum kamari ella egnari íbúð.*

Samlað eru 396 aktiv mál í skipanin hjá BVT, 96 av teimum eru ung yvir 16 ár. Síðstu 12 mðr. hevur BVT játtað fíggjarligan stuðul eftir §15, stk. 1, nr.11 til til 16 ung, samlaða upphæddin fyri hetta er 595.305kr. Talan er um húsaleiga fyri kømur og íbúðir, sum verða leigaðar bæði privat og gjøgnum fyritøkur (t.d. Mark), eins og nøkur leiga kamar inni í heimum hjá familjum. Onkuntíð eydnast fyriskipanin væl, men tað eru eisini neiligar royndir, tí tað eru fleiri viðurskiftir, sum skulu vera til staðar fyri at ein slík fyriskipan skal eydnast.

Tá ung fara út at leiga, so er tað oftast tí, at tey ikki kunnu verða búgvandi heima hjá sínum foreldrum. Tey eru ov gomul og/ella ynskja ikki at blíva umsorganaryvirtikin, og tí er hetta ein møguleiki at stuðla teimum í at koma burtur frá umstøðum, sum ikki verða mettar nøktandi. Afturat stuðlan til húsaleigu, so er umráðandi at seta aðrar fyriskipanir í verk, sum kunnu stuðla hesum ungum í teirra trivnað og menning. M.a. seta stuðlar/mentorar, sum kunnu vegleiða hesi ungu til hvussu tey skipa eina dag, læra at halda hús, reingerð, søkja arbeiði, søkja inn á miðnám o.líkn. Umframt stuðla teimum í sambandinum við foreldur/familjuna á ein jaligan hátt, og hesir stuðlar hava ofta eisini samband við foreldrini hjá hesum ungu.

Hyggja vit rundan um okkum í Norðanlondum, so er vanligt at kommunur hava bútilboð til hesi ungu millum 16-20 ár, har námsfrøðingar eru knýttir at við tí endamálið at stuðla teimum í at trívast, mennast og gerast klár til vaksnamannatilveruna. Bútilboðið er eitt heim, har tey eru áleið fýra ungu, sum búgva saman og hava ein gerandisdag, har tey eru partur av einum jaligum felagsskapið og hava atgongd til vaksin, sum kunnu vegleiða og ráðgeva í lívsins viðurskiftum.

Hetta er eitt tilboð, sum avgjørt átti at verið stovnað í Tórshavnar kommunu, og átti at blivið partur av arbeiðinum við sosialu íbúðunum. Tí á henda hátt fær kommunan arbeitt fyribyrgjandi og stuðla ungum, sum ikki hava eins góðar treytir í lívinum, sum onnur javnaldrandi í, at tey eitt nú fáa fólkaskúlaprógv, kunnu koma inn á miðnám og/ella út á arbeiðsmarknaðin og har við megna at standa á egnum beinum.

**Næsta stig**
Í verandi løtu verða screeningar gjørdar av øllum íbúðum, soleiðis at tað gerast greitt hvørjum standi íbúðirnar eru í, hetta verður væntandi lagt fram fyri Trivnaðarnevndina í juni 2025. Sosiala deild heldur á fram við at gera eina skrivliga leiðbeining, umframt eina týðiliga lýsing av málbólkunum, sum mett verður at íbúðirnar skulu tilskrivast. Her verður dentur lagdur á tey eldur, stakir uppihaldara við børnum undir 18 ár, og so at nakrar íbúðir og/ella hús verður sett av til ung millum 16-18 ár, sum ikki kunnu búgva heima orsaka av heimligu viðurskiftunum.

Tørvur er eisini á at hoyra hvørjar hugsanir býráðið hevur til sosialu íbúðirnar, og hvat skal takast við til víðari arbeiðið hjá fyrisitingini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin á sosialu deild mæla Trivnaðarnevndini at umrøða málið um sosialu íbúðirnar.

**Trivnaðarnevndin 08. mai 2025:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Á trivnaðarnevndarfundinum t. 08/05-25 varð niðurstøðan av screeningunum av sosialu íbúðunum í Tórshavnar kommunu løgd fram. Screeningin vísti, at íbúðirnar eru í ymsum standi, men meirilutin av sosialu íbúðunum lúka ikki krøvini í smb. við brunatrygd. Á trivnaðarnevndarfundinum varð umrøtt og dentur lagdur á, at trygdin skal koma uppá pláss, harafturat skal støða takast til hvørjar íbúðir skulu varðveitast, og um tað eru íbúðir, har ein ætlan fyri avvikling skal gerast. Borgarar búgva í øllum íbúðum, og verður mett at nakrar íbúðir ikki skulu varðveitast, so skulu hesir borgarar koma í annan bústað. Í smb. við gjøgnumgongdina av íbúðunum vóru tað eisini íbúðir, har mett varð at leigarin átti at fingið bjóðað vegleiðing um aðrar tænastur, tí tað sást avbjóðing í m.a. at halda hús.

Ætlanin skal væntast at fevna yvir eitt tíðarskeið á 2-5 ár. Ætlanin fyri økið er at endurskoða verandi sosialar íbúðir, og miðja eftir at nøkta tørvin hjá ávísum málbólkum, sum eru lýstir omanfyri. Tað eru m.a. ung í aldrinum 15-18 ár, sum eru á gáttini til vaksna lívið. Tørvurin er mettur til at vera ein ella tveir búfelagsskapir við tilsamans 4-6 kømrum og felagsøki, og síðani útslúsing til egnan bústað, til endamálið kundu nakrar íbúðir í Lon verði nýttar til hetta í eitt ávíst tíðarskeið. Við at kunna veita ungum eitt námsfrøðiligt tilboð saman við einum bústaði, hevði avgjørt økt um møguleikar í smb. við íverksetan av fyriskipanum, sum tørvur er á.

Ætlanin inniber eisini at fimm sethús: Kannuberg, Yvirlærarahúsi, Skræddaragøta, Kjælneshúsini og Læknahúsið í Nolsoy møguliga verða seld. Møguliga kann eitt ella tvey av teimum umbyggjast til omanfyrinevnda búfelagskap. Sølurnar av sethúsum eiga at innganga í fíggingina av búfelagsskapum og umvælingum av íbúðum.

Í fyrsta umfarið verður mett at hendan ætlan er kostnaðarneutral í mun til at fáa neyðugu hølini til vega. Alt eftir hvussu tað gongur at visitera íbúgvar aðrar vegir kann ætlanin taka 2-5 ár at gjøgnumføra.

Ætlanin eigur eisini at fevna um eitt samstarv um inspektión og reingerð sum Bygningsrakstur kann standa fyri, og umsorganarvitjanir í íbúðum og stuðlar í búfelagsskapum, sum Sosiala Deild kann standa fyri. Ein slík tænasta merkir, at tað er neyðugt at uppnormera raksturin á báðum deildum.

Afturat hesum skal skal tað liggja ein dagførd leiðbeining har greiðar mannagongdir er fyri eitt nú leigusáttmálum, visitering, árligt uppsýn, húsaleigu o.líkn.

Tað eru tilsamans 16 íbúðir í Lonunum og Barakkini, sum skulu umvælast og dagførast. Mælt verður til, at kommunan setur fígging av til at umvæla og dagføra hesar íbúðir. Tað verður byrja við at brunatryggja allar 16 íbúðir og umvæla ta einu íbúðina í Lon, sum hevur staðið tóm síðani heystið 2023. Síðani kann kommunan dagføra íbúðirnar, so hvørt sum tað er møguligt og/ella, tá borgarar m.a. flyta. Sum íbúðirnar verða dagførdar kunnu nakrar av teimum minnu íbúðunum oyramerkjast til ung, sum hava tørv á egnari íbúð eitt tíðarskeið.

Bygningsdeildin hevur gjørt fylgjandi kostnaðarmeting:

- Tann eina íbúðin í Lon má høvuðsumvælast og dagførast, umframt at allar 13 íbúðirnar í Lonunum verða brunavardar = 3,0 mió. játtan í 2025.
- Barakkin í V.U. Hammershaimbs gøtu verður brunavard í 2026 = 1,5 mió.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | L57016 | Golf | 2575 | Nýggj verkætlan | Dagføring og umvæling av sosialu íbúðunum | Stovna nýggja verkætlan undir sosialu deild | 3.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 3.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin á sosialu deild mæla Trivnaðarnevndini til at taka undir við at;

- Tann eina íbúðin í Lon, sum hevur staðið tóm verður høvuðsumvæld og dagførd, umframt at allar 13 íbúðirnar í Lonunum verða brunatryggjaðar. Kostnaðarmetingin fyri at gera hetta arbeiði er mett til 3.0 mió

- At fluttar verða 3 mió av 5775 L57016 Golf til nýggja verkætlan “Dagføring og umvæling av sosialu íbúðunum” sum sosiala deild varðar av

- At beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina

**Trivnaðarnevndin 05. juni 2025:** Ein meiriluti, Annita á Fríðriksmørk, Kristianna Winther Poulsen og Heidi Lava Elgeirsdóttir, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum, men ikki við fíggingarleistinum at taka pening frá Golf.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum, men ikki við fíggingarleistinum at taka pening frá Golf.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Kári Johansen legði fram eitt broytingarupppskot um at taka undir við tilmælinum við tí broyting at fíggingin verður tikin av konto 6110.

Atkvøtt varð fyrst um broytingaruppskotið.

Ein meiriluti, Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála, tekur ikki undir við broytingaruppskotinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann, tekur undir við broytingaruppskotinum.

Ein annar minniluti, Heðin Mortensen, atkvøddi blankt.

Broytingaruppskotið varð felt við 7 atkvøðum ímóti, 5 atkvøðum fyri og einari blankari atkvøðu.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið.

Ein meiriluti, Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Astrið Breckmann og Hildur Eyðunsdóttir, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøddi blankt.

Málið varð samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð við 12 atkvøðum fyri, ongum atkvøðum ímóti og einari blankari.

**Ískoyti:**
Síðani málið um sosialu íbúðirnar kom á skrá í feb. 2025, hevur tað verið arbeitt við fylgjandi punktum, sum vórðu nevnd fyrst í málslýsingini:

- At lýsa standin á íbúðunum
- At gera eina kostnaðarmeting av hvat tað kostar at dagføra íbúðirnar
- At gera eina skrivliga lýsing av tørvinum hjá borgarunum
- At gera eina skrivliga leiðbeining (visitatión, leigusáttmála o.a.)
- At endurskoða húsaleiguna

Bygningsdeildin hevur lýst standin á øllum íbúðunum, umframt gjørt eina kostnaðarmeting í smb. við dagføring av íbúðunum. Víst verður til lýsingina omanfyri frá trivnaðarnevndarfundinum t. 08/05-25.

Tað eru gjørdar skrivligar lýsingar ígjøgnum alt tilmælið av metta tørvinum hjá borgarunum í Tórshavnar kommunu.

Arbeitt hevur verið við einari reglugerð í smb. við sosialu íbúðirnar, og er tað uppskotið liðugt.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin á sosialu deild mæla Trivnaðarnevndini at taka undir við reglugerðini fyri sosialu íbúðirnar og beina víðari í býráðið.

**Trivnaðarnevndin 04. september 2025:** Samtykt at taka undir við reglugerðini at beina í býráðið um fíggjarnevndina. Harumframt samtykt at fara í tilgongd at tillaga leigukostnaðin og at endurskoða bygningarnar í skipanini. Málið at beina í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Samtykt at taka undir við reglugerðina og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Av tí at atkvøðast skal um tvey ymisk mál í sama máli, verður atkvøtt soleiðis:

Fyrst skal atkvøðast um 2. viðgerð um  eykajáttan á 3 mió. til dagføringa av sosialu íbúðum sí. oman fyri í hesum máli. Málið var samtykt við 1. viðgerð á býráðsfundi 18. juni 2025.

Síðan skal atkvøðast um sjálva reglugerðina fyri sosialu íbúðirnar sí skjal nr. 2. Málið um reglugerðina var samtykt í trivnaðarnevndini 4. september og viðgjørt og samtykt í fíggjarnevndini tann 10. september 2025.

**Býráðsfundur 18. september 2025:**

Fyrst varð atkvøtt um 2. viðgerð um eykajáttan á 3 mió. til dagføringa av sosialu íbúðum:

Einmælt samtykt.

Síðani varð atkvøtt um um sjálva reglugerðina fyri sosialu íbúðirnar:

Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. september 2025 | Blað nr.: 555 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 187/25 Eldradepil í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 05.06.2025 | 16/25 | 25/06061-1 |
| 2 Heilsu- og eldranevndin | 04.09.2025 | 18/25 | 25/06061-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 134/25 | 25/06061-1 |
| 4 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 187/25 | 25/06061-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekstur og tilmæli kemur áðrenn fundin.

**Heilsu- og eldranevndin 05. juni 2025:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í septembur 2017 samtykti býráðið eina útbyggingarætlan fyri eldraøkið í Tórshavnar kommunu. Síðsta tilmælið í útbýggingarætlanini var at gera ein eldradepil í Kollafirði. Hini tilmælini í útbygginargarætlanini eru gjørd ella eru í gerð. Urd og Demensdepilin vóru liðug og lótu upp á sumri í 2021, og nýtt røktarheim við 64 búplássum og 16 røktaríbúðum er í gerð á Stórubrekku í Hoyvík.

Síðan útbyggingarætlanin bleiv samtykt hevur Heilsu- og umsorganartænastan miðvíst arbeitt við ymsum átøkum, sum stuðla undir, at fólk á eldraøkinum klára seg betur sjálvi og hetta sæst aftur í bíðilistunum. Serliga sæst broyting í bíðilistunum, eftir at Urd og demensdepilin lótu upp á sumri í 2021. Hóast fólkatalið er javnt vaksandi, hevur biðilistin til búpláss verið rættiliga stabilur í nøkur ár. Nú er bíðilistin spakuliga byrjaður at vaksa aftur, tó ikki til sama stig, sum áðrenn 2021.

Væntandi kemur bíðilistin til búpláss aftur á stigið frá 2022, tá nýggja røktarheimið á Stórubrekku letur upp.

Síðsta tilmæli í útbyggingarætlanini er at gera eldradepil í Kollafirði.

Í virkisætlanini stendur soleiðis í tilmælinum um eldradepil í Kollafirði:

*5. Eldradepil í Kollafirði 2024-2025*
*Mælt verður til:*
*- At bygdur verður eldradepil við umleið 24-30 plássum. Blandað røktarbúpláss, stutttíðarpláss og røktaríbúðir saman við dagtilhaldi og venjingarumstøðum. Við atliti at tørvinum á størri røktarbygging í høvuðsstaðarøkinum, verður mett, at eldradepilin í Kollafirði verður raðfestur at taka í nýtslu um 7-8 ár.*
*- At heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at ávísa hóskandi grundøki til at byggja á.*

Verðandi umstøður á Sambýlinum í Kollafirði eru als ikki nøktandi. Kømrini eru smá og hava ikki egi wc. Arbeiðsumstøðurnar hjá starvsfólkunum eru ikki nøktandi, og umstøðurnar eru soleiðis, at ikki ber til at hava fólk við stórum røktartørvi ella demenssjúku búgvandi á sambýlinum. Hetta ger, at tað til tíðir eru tøk pláss, tí tey sum hava tørv á plássunum ikki rúmast á sambýlinum, men mugu flyta til Havnar í hóskandi umstøður á heimum, sum eru gjørd til tørvin.

| **Ár** | **2000** | **2005** | **2010** | **2015** | **2020** | **2025** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fólkatal í alt** | 1.188 | 3.278 | 3.249 | 3.196 | 3.293 | 3.304 |
| **Fólkatal 67+** | 99 | 110 | 138 | 169 | 179 | 197 |
| **Fólkatal 80+** | 27 | 32 | 38 | 53 | 47 | 59 |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| - Kollafjørður | | | | | | |
| - Oyrareingir | | | | | | |
| - Signabøur | | | | | | |
| - Kaldbak | | | | | | |
| - Kaldbaksbotnur | | | | | | |
| - Mjørkadalur | | | | | | |
| - Sund | | | | | | |
| - Norðradalur | | | | | | |
| - Syðradalur, Streymoy | | | | | | |

Talvan omanfyri vísir samlaðu gongdina í fólkatalinum í nevndu bygdum frá 2000 til 2025. Runt roknað kann man siga, at talið av fólki ávíkavist 67+ og 80+ er dupult so stórt í 2025, sum tað var í 2000.

Til ber ikki at fáa framroknaði tøl frá hagstovunum um nevndu økir. Tó vita vit, at talið av eldri borgarum fer at vaksa fleiri ár afturat.

Í løtuni (juli 2025) búgva 10 borgarar á røktarheimi í Tórshavn, sum áðrenn tey fluttu inn, høvdu bústað í Kollafirði. Tað búgva í løtuni 6 fólk á sambýlinum í Kollafirði. Tað vil siga í løtuni búgva 16 fólk úr Kollafirði á búplássum í kommununi.

Við hesum í huga og at talið av eldri fer at vaksa í framtíðini er tað hóskandi, at ein eldradepil í Kollafirðið rúmar eini 24 búfólkum við blandaðum tørvi. Tað verið seg tørvur á lættari røkt (sambýli) tyngri røkt (røktarheim) og demenssjúkum (demensdeild). Eisini er hugsa, at umlætting kann rúmast á teimum 26 plássunum. Umráðandi er, at eldradepilin í Kollafirðið kann vera fleksibul við atliti at tørvinum hjá borgarunum.

Ein loysn kann vera at skipa eldradepilin við tveimum deildum við 11 búfólkum og tveimum atknýttum í røktaríbúðum pr. deild. Soleiðis, at samlaða talið verður 26 pláss til tann blandaða tørvin. Hetta eigur tó at vera lýst nærri í einari neyvari tørvslýsing, so atlit eisini verður tikið til framtíðar rakstur av eldradeplinum.

**Frontaldemens deild á eldradeplinum í Kollafirði.**
Í Tórshavnar kommunu er stórur tøvur á at skipa frontaldemesøkið. Arbeiðið við at menna fakligt tilboð til fólk við frontaldemens er í gongd, men tað er trupult at veita hetta tilboð á vanligum demensdeildum, tí tørvurin á hjálp, røkt, vegleiðing osv. hjá fólki við frontaldemens er ikki tann sami, sum tørvurin hjá fólki við øðrum demenssjúkum. At fólk við frontaldemenssjúku búgva millum við øðrum demenssjúkum skapar stórar avbjóðingar á deildunum. At hesi búgva á somu deildum er ikki nøktandi tilboð fyri hvørgan partin. Tað er sera trupult hjá starvsfólkunum at tryggja eina góða røkt til allar borgarar, tá fólk við frontaldemens og fólk við øðrum demenssjúkum er saman á røktarheimum.

Tørvur er á at skipa eitt samlað frontaldemenstilboð í Tórshavnar kommunu, bæði viðvíkjandi hølisviðurskiftum og fakligaheit. Hetta kundi møguliga verið gjørt í samstarvi við aðrar kommunur.

Frontaldemens er sergrein innan demensøkið, og tí er umráðandi, at servitanin verður savnað á einum stað fyri at tryggja borgaranum allar bestu røktina í sínari demenssjúku.

Í dag hava vit ikki umstøður at skipa eitt samlasamlað tilboð til borgarar við frontaldemens á einum stað.

Ein møguleiki kundi verið at skipa eina frontaldemensdeild í samband við byggingina av eldradeplinum í Kollafirði.

Ein frontaldemensdeild eigur at hava gott pláss soleiðis, at møguleiki er at skerma hvønn einkultan borgara, bæði fyri at verja viðkomandi og fyri at verja hini, sum eru á deildini. Eisini skal vera møguleiki hjá borgaranum at fara útum,uttan at vera til vanda fyri seg sjálvan ella onnur. Tvs. at ein góður garður eigur at vera uttanum.

Frontaldemensdeildin eigur at hava pláss fyri 6 borgarum. Um man ynskir at kunna bjóða tænastuna til aðarar kommunur í Føroyum, so kundi talan verið um 8 pláss. Ábendinagar eru um, at áhugi er fyri hesum uttanfyri Tórshavnar kommunu. Hetta skal tó kannast nærri og skipast í fasta legu. Tó ber til eftir lógini um heimatænasu, eldrarøkt v.m at bjóða tænastur út til onnur samstørv.

Samlað svarar tað til ein eldradepil, sum hevur búpláss til 32 fólk. (34 fólk) Umlætting og búpláss verður skipað eftir galdandi tørvinum til eina og hvørja tíð.

Umframt blandað pláss fyri 32 fólkum, (34), skal eldradepilin hava rúm fyri dagtilhaldi til 30 fólk og venjingarhølir til bæði heimabúgvandi og búfólk. Felagskøkur má vera í húsinum, sum ger mat til búfólk og fólk á dagtilhaldinum. Eisini eiga hølir at vera gjørd til heimatænastuna evt. sum sjúkrarøktarfrøðingaklinikk. Umframt hetta so mugu vera øll vanlig arbeiðsrúm, skrivstovur, samrøðurúm og fundarhøli. Kølirúm eigur at vera í húsinum. Hugsast má um uttanum øki har tað skulu vera góðir

møguleika at fara útum, og tað er serliga umráðandi, at uttanum øki á frontaldemseindini er skipað soleiðis, at borgarin fær góðan møguleika at røra seg.

Hóast bíðilistarnir til búpláss ikki eru á sama stigi, sum tá virksemisætlanin bleiv samtykt, so er ongin ivi um, at Sambýlið í Kollafirðið ikki longur er tíðarhóskandi og kann ikki halda fram at vera sambýli. Um ein frontaldemenseind kann rúmast í projektinum, verður hetta eitt nýbrot innan eldraøkið og ein stórur bati fyri tænastuna og tilboðini á eldraøkinum í Tórshavnar kommunu

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorgarnarstjórin og leiðarin á heilsu- og umsorganardeildini mæla til, at valda staðseting verður endaliga fingin uppá pláss. Haraftrat at seta bygginevnd til eldradepilin í Kollafirði, at heimila fyrisitingini at fara undir at gera byggiskrá, og til tað endamálið at játta kr. 1 mio av L27013 Eldradepil í Kollafirði til LK 27013 Eldradepil í Kollafirði.

At leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Heilsu- og eldranevndin 04. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum.

Somuleiðis einmælt samtykt at velja hesi í bygginevndina fyri verkætlanina: Kristianna Winther Poulsen og Birgir Nielsen.

# 188/25 Umbøn um eykajáttan til kontu 6510 Kirkjugarðar í 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2025 | 105/25 | 25/05791-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 107/25 | 25/05791-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 154/25 | 25/05791-1 |
| 4 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 188/25 | 25/05791-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.09.2025 | 136/25 | 25/05791-1 |

**Upprunin til málið**
Rakstrarjáttanin kt. 6510, kirkjugarðar, hevur verið undir stórum fíggjarligum trýsti seinastu árini.

Yvirskipað eru fleiri grundir til fíggjarliga trýstið, og niðanfyri síggjast nakrar av orsøkunum:
- Størri krav til røktina á kirkjugørðunum
- Slátturin av grasinum verður í størri mun boðin út. Síðani 2020 er allur sláttur boðin út.
- Fleiri og størri kirkjugarðar at røkja.
- Fleiri jarðarferðir
- Lønarviðurskiftini
- Leiga av amboðum

Ynski er at fáa standin og raksturin á kirkjugørðunum at verða raðfestan, soleiðis at kirkjugarðarnir í kommununi verða røktaðir við tí tign og virðing, sum verður kravt av teimum.

**Lýsing av málinum**
Í 2024 varð játtanin hækkað við kr. 1.700.000, sí mál nr. *24/01618-1, Umbøn um eykajáttan til konto 6510*, umframt at kr. 900.000 vórðu játtaðar sum eykajáttan til kt. 6510. Í 2023 hevði kontan eitt hall á kr. 380.000, sum hendan eykajáttanin somuleiðis mátti dekka.

Í máli nr. 24/01618 varð somuleiðis samtykt, at umsitingin skuldi venda aftur í nevnd við einum uppskoti um, hvussu raksturin í kirkjugørðunum í kommununi kann verða skipaður í framtíðini.
Hetta varð ongantíð gjørt, og nú eru kirkjugarðarnir komnir aftur undir býararkitektin og Býarskipanardeildina. Í hesum sambandi hava býararkitekturin og leiðarin á Kirkjugørðunum gjøgnumgingið virksemið og játtanina fyri fíggjarárið 2025.

Lønarviðurskifti
Lønarviðurskiftini eru í einari fastari og støðugari legu og kemur lønarjáttanin fyri 2025 tískil væntandi at halda

Dagføringar av amboðum og rakstrargøgnum:
- Amboðini á kirkjugørðunum verða í høvuðsheitum leigaði frá Verkstaðnum. Onkur eldri amboð eru tó uttanfyri hesa leiguskipan, og verða nú tí tørvur er at skifta tey út, koyrd undir somu leiguskipan. Hetta gevur hægri útreiðslur til leigu, men framtíðar útreiðslurnar til viðlíkahald koma at lækka.
- Ítøkiliga fevnir hendan útskiftingin um stóru og lítlu gummigedina og ein arbeiðsbil.
- Samanlagt kosta hesar dagføringarnar fyri árið 2025 kr. 253.660 afturat í leigukostnaði.

Grundrakstur:
- Harumframt verður játtanin brúkt til keyp av vørum og tænastum til at fremja grundleggjandi rakstrarlig arbeiðið á kirkjugørðunum, sum t.d. fevnir um:
  - Olju-nýtsla

   - El-nýtsla
   - Keyp av vørum (klæðir, nummarpelar til gravir, formar til gravir osfr.)
- Samanlagt kemur hesin parturin av játtanini at kosta uml. kr. 666.000, harav játtanin til hendan partin liggur á kr. 1.090.000, sostatt eru einans uml. kr. 424.000 eftir til uttanhýsis røktina.

Grøna røktin/slátturin á kirkjugørðunum:
- Býarskipanardeildin bjóðaði fyrr í vár grønu røktina út á kirkjugørðunum. Uttanhýsis veitararnir hava latið tilboð inn, og liggur røktin samanlagt á áljóðandi kr. 2.729.864 pr. ár.
- Av tí at partur av árinum 2025 er farið, so krevst einans fígging til ein part av hesum tilboðunum áljóðandi kr. 1.999.076.
- Røktin fevnir um sláttur á teimum 13 kirkjugørðunum í kommununi, umframt røkt av runnum.
- Í 2024 kostaði uttanhýsis røktin kr. 1.231.500, harav kr. 162.500 ikki vórðu goldnar í fíggjarárinum 2024, men eru goldnar í ár 2025.
- Tøka játtanin til hetta arbeiðið er kr. 424.000 *(sí omanfyri standandi punkt "Grundrakstur")*, og sostatt mangla kr. 1.575.000, fyri at játtanin skal halda.

Játtanin fíggjarárið 2025 til kt. 6510, kirkjugarðar, er áljóðandi **kr. 6.005.000**.

Út frá kendu útreiðslunum, lýstar omanfyri, umframt eini meting av hvat raksturin fyri økið annars kemur at verða í 2025, so er støðan tann, at játtanin má hækkast við tilsamans **kr. 1.895.221** fíggjarárið 2025. Sí skjal *j.nr. 25/05791-2, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2025*, sum lýsir útreiðslurnar.

Ítøkilig fevnir hendan økingin um:
- Øktur leigukostnaður í samb. við átroðkandi útskifting av amboðum á áleið kr. 253.660.
- Tørvur til uttanhýsis røktina á kr. 1.575.000 hægri enn verandi játtan rúmar.

Partur av hesi upphæddini, kr. 1.183.000, kann fíggjast av *kt. 6575, L65008 Gøtur, gróðurseting og innbúgv í kirkjugørðunum*. Fyri íløguna, *L65008 Gøtur, gróðurseting og innbúgv í kirkjugørðunum*, merkir hetta, at arbeiðið at seta gróðursetingar- og innbúgvsætlanina í verk ikki verður raðfest í 2025, eins og *mál nr. 25/04098, Uppraðfesting gøtur í Kirkjugørðunum*, lýsir.

Restin av teimum 1.895.221 kr, sum kirkjugørðunum tørvar í 2025, svarandi til 787.779 kr, verður mælt til at játta av meirinntøkunum fyri 2025, ella í øðrum lagi at støða verður tikin til hetta seinni í heyst.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Dagligi raksturin av kirkjugørðunum í Tórshavnar Kommunu fevnir um tilsamans 13 kirkjugarðar, har kirkjugarðurin við Velbastaðvegin, sum er nógv víðkaður og útbygdur hesi seinastu árini, er nógv tann størsti kirkjugarðurin í kommununi.

Hinir kirkjugarðarnir liggja spjaddir í ymsu bygdunum, ið eru komnar upp í Tórshavnar Kommunu gjøgnum árini. Eisini er onkur nýggjur kirkjugarður komin afturat, t.d. nýggi kirkjugarðurin í Hoyvík.

Í kjalarvørrinum av hesi gongdini er umsitingin, røktin og viðlíkahaldið av kirkjugørðunum vorðin rættiliga umfatandi, men játtanin til konto 6510, Kirkjugarðar, hevur ongantíð verið dagførd samsvarandi hesi gongdini, og tískil er neyðugt at virða, at ásetta játtanin ikki røkkur til veruliga raksturin og neyðuga viðlíkahaldið.

Seinastu nógvu árini hevur konta 6510, Kirkjugarðar, havt árligt hall/meirnýtslu. Niðanfyri sæst yvirlit yvir meirnýtsluna á kontuni síðani 2015.

| Kirkjugarðar | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Játtan | 2.917 | 3.270 | 3.397 | 4.395 | 4.569 | 4.616 | 4.698 | 4.082 | 6.005 |
| Hækkan í % | 2% | 12% | 4% | 29% | 4% | 1% | 2% | -13% | 47% |
| Framflutt | -707 | -1.266 | -172 | -74 | -296 | -744 | -2.520 | -380 | -102 |
| Broytt framflyting frá ymiskum kontum | | 1.229 | | 100 | 300 | | | 900 | |
| Eyka játtan | | | 172 | | | | 3.500 | 1.700 | |
| Játtan í alt | 2.210 | 3.233 | 3.397 | 4.421 | 4.573 | 3.872 | 5.678 | 6.302 | 5.903 |
| Nýtsla | 3.476 | 3.405 | 3.471 | 4.717 | 5.317 | 6.392 | 6.058 | 6.404 | |
| Avlop/Meirnýtsla | -1.266 | -172 | -74 | -296 | -744 | -2.520 | -380 | -102 | |

Mælt verður til, at hædd verður tikin fyri hesi gongdini í sambandi við gerð av Fíggjarætlanini 2026, og at játtanin verður stillað samsvarandi ítøkiligu metingunum fyri rakstrarjáttanina.

Leiðarin av kirkjugørðunum og býararkitekturin hava gjørt eina meting av árliga kostnaðinum at reka kirkjugarðarnar í kommununi, soleiðis at kirkjugarðarnir frameftir verða riknir við tí tign og virði, ið hoyrir til henda raksturin. Metingin tekur støði í búskettinum fyri 2024-25 og sæst í viðhefta skjali, *j.nr. 25/05791-3, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2026*.

Búskettið fyri raksturin er sett upp við støði í kostnaðum frá 2024-25, og er lønin sett at vera tann sama í komandi ári, hóast lønarútreiðslurnar helst hækka nakað samsvarandi árligu stillingunum.

So statt eigur framroknaða játtanin 2026 í skjali, *j.nr. 25/05791-3, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2026,* at taka hædd fyri møguligum prísvøkstri, umframt natúrliga lønarvøkstrinum í samb. við ger av fíggjarætlanini 2026.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
jnr. 24/01618, Umbøn um eykajáttan til konto 6510
jnr. 25/04098, Uppraðfesting gøtur í Kirkjugørðunum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Verkstaðið vísir á, at verandi amboð/maskinur, sum ikki eru í leiguskipanini, eru í so mikið ringum standi, at tørvur er at skifta tey út, longu í 2025.

**Skjøl**
*24/01618-1, Umbøn um eykajáttan til konto 6510*
*25/05791-2, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2025*
*25/05791-3, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2026*

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☐ |
| Eykajáttan | ☒ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6575 | L65008 | Gøtur, gróðurseting og innbúgv í kirkjugørðunum | 6510 | | Kirkjugarðar | | 1.183.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 1.183.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 1.183.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á Kirkjugørðunum mæla til:

- at játta kr. 1.183.000 av kt. 6575, L65008, Gøtur, gróðurseting og innbúgv í kirkjugørðunum, sum eykajáttan á rakstrarjáttan kt. 6510, Kirkjugarðar,
- at játtan til írestandi kr. 787.779 verður tikin til viðgerðar seinni í heyst.
- og at beina málið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir í býráðnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Atkvøtt var fyrst um at beina málið aftur í fíggjarnevndina eftir uppskoti frá Annfinni Brekkstein.

Fyri at beina málið aftur í nevnd atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála.

Uppskotið um at beina málið aftur í nevnd varð felt við 8 atkvøðum ímóti, 5 atkvøðum fyri og ongari blankari.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið.

Fyri at taka undir við tilmælinum atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann.

Samtykt varð við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari at taka undir við tilmælinum og beina málið víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Tróndur Sigurðsson skeyt upp sum broytingaruppskot, at býráðið skuldi hava eina frágreiðing fíggjarstøðuna og reglusemi, áðrenn eykajáttan verður latin jakstrarstaðnum.

Atkvøtt varð fyrst um broytingaruppskotið:

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála

Blankt atkvøddi: Ongin

Broytingaruppskotið fall við 5 atkvøðum fyri, 8 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið:

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen

Blankt atkvøddi: Ongin

Samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

# 189/25 Fyrispurningur um at yvirtaka matrikul 1020a, Tórshavn ísv. kampusætlanina fyri Fróðskaparsetur Føroya

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.09.2025 | 114/25 | 25/05482-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 01.09.2025 | 53/25 | 25/05482-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 139/25 | 25/05482-2 |
| 4 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 189/25 | 25/05482-2 |

**Upprunin til málið**
Landsverk hevur vent sær til Tórshavnar kommunu við fyrispurningi um at yvirtaka matrikkul nr. 1020a í sambandi við heildarætlanina fyri Kampusøkið á Frælsinum.

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við at matriklarnir til Kampusøkið eru lagdir saman í ein felags matrikkul (nr. 1017d), er ynski um, at matrikkul nr. 1020a hjá Tórshavnar kommunu eisini gerst partur av hesum sama matrikli.

Fjarhitaleiðin frá Frælsinum til Havstovuna, Vinnuháskúlan og nýggja felagsbygningin til Kampus fer sambært ætlan at liggja ígjøgnum matrikkul nr. 1020a. Eisini er møguligt, at ein fyribils gonguleið verður skipað gjøgnum økið undir bygging. Arbeiðið við fjarhitaleiðini er ætlað at byrja longu í 2025.

Mett verður, at matrikkulin er natúrligur partur av tí samlaða økinum og innkomuvegur til vørumóttøku til felagsbygningin, Havstovuna og restina av Kampusøkinum.

Landsverk leggur upp til, at Føroya Landsstýri yvirtekur matrikkul nr. 1020a uttan kostnað og við teimum skyldum, ið knýttar eru at matriklinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matrikkul nr. 1020a er fevndur av økisásetingunum D3 og A1 í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Økisásetingarnar eru ávikavist lagdar av til almennar stovnar og bústaðarbygging.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Hornagøta er týðiligur partur av verandi býlingi í Hornabø, og verður hugt eftir byggisamtyktini saman við viðmerkingini frá teknisku deild um at selja ein part av matriklinum, so er eyðsæð at lata Føroya Landsstýri tann partin, sum er fevndur av D3 økisásetingini, sí skjalið *Uppskot at lata Føroya Landsstýri.*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
**-**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið hevur verið til viðmerkingar hjá teknisku deild og barna- og ungdómsdeildini.

Hornagøta er einasta vegatkoma til matr. nr. 1021c (Hornagøta 15), og er talan um kommunalan veg (litra da). Grundað á, at økið framhaldandi verður vegur verður mælt til at lata ein part av matr. nr. 1020a, og at hin parturin framhaldandi verður vegur og ogn hjá kommununi.

Hóast ein stovnur hjá kommununi í løtuni heldur til í húsinum á matr. nr. 1021c (Hornagøta 15), so eru ongin atlit, ið skulu takast viðv. stovnsvirkseminum. Hetta grundað á, at ein ætlan fyriliggur um at finna nýggjar karmar til virksemið og at selja ognina, har stovnurin í dag heldur til.

| | Býráðsfundur<br>18. september 2025 | Blað nr.: 565 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

**Leggjast fyri staðbundna nevnd   Ja ☐   Nei ☒**

**Skjøl**
Fylgiskjøl 1-3 Landsverk, journal nr. 25/05482-3
Uppskot at lata Føroya Landsstýri, journal nr. 25/05482-4

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at lata Føroya Landsstýri ein part av matr. nr. 1020a til Kampusætlanina og at beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 01. september 2025:** Ein meiriluti, Begur Robert Dam Jensen, Heðin Mortensen, Anja Weyhe, Annfinn Brekkstein, tekur undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson tekur undir við tlmælinum, men at gjald skal fyriliggja.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum, men at gjald skal fyriliggja.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt.

# 190/25 Kloakkarbeiði á Sundsvegnum 1. stig

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 01.09.2025 | 45/25 | 25/08097-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 141/25 | 25/08097-2 |
| 3 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 190/25 | 25/08097-2 |

**Upprunin til málið**
Málið um ætlaðu planløgdu kloakkarbeiðini hevur verið framlagt í máli nr. 25/00417 Íløgu- og rakstraræltan fyri spillvatnsøkið 2025, undir heitinum "Kloakk frá nýbygging ovast á Villingardalsvegnum oman til Óluvugøtu".

Henda verkætlanin fevnir um 1. stig at leggja kloakkleiðing frá Óluvugøtu og niðan eftir Sundsvegnum, og skal møguliga fíggjast av aðrari kontu, t.d. søla av lendi, tí talan er um komandi íbúðarbygging ovast við Sundsvegin sambært ætlanum hjá felagnum fyri lutaíbúðir.

Umsitingin hevur gjørt útbjóðingartilfar og havt lisitatión 12.06.2025. Íalt vóru 5 arbeiðstakarar bodnir at bjóða, og inn komu 3 tilboð:

1. Andrias Berg 1,55 mió. kr.
2. D. Nordendal 2,08 mió. kr.
3. Við Sjógv 2,15 mió. kr.
4. Konsax Einki boð
5. Brockie Einki boð

Umsitingin hevur havt samráðingar við A. Berg, og klárt er at fara undir arbeiðið, tá ið sáttmálin er undirskrivaður.

**Lýsing av málinum**

**Skjøl**
xxxxx -2 Samlað kostnaðarmeting fyri kloakkarbeiðið 1. stig verður uml. kr. 2,1 mió kr.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís øki í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | **Játtast á:** |
|---|---|

| | **Býráðsfundur**<br>18. september 2025 | Blað nr.: 567<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

| Deild | Verk-ætlan | Navn |
|---|---|---|
| 6875 | LK68999 | Kloakkir (íløgur) |

| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
|---|---|---|---|
| 6875 | | | Kloakkarbeiði á Sundsvegnum |

| Upphædd |
|---|
| 2.100.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 2.100.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 1000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 2.100.000,- av kto 6875 Kloakkir (íløgur) LK68999 Kloakkir, á nýggja verkætlan, "Kloakkarbeiði á Sundsvegnum 1. Stig", og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 01. september 2025:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Heðin Mortensen, Anja Weyhe tekur undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson, mælir til at bjóða arbeiðið út av nýggjum fyri at tryggja, at útboðið fer rætt fram.

Annfinn Brekkstein tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen mæla til at bjóða arbeiðið út av nýggjum fyri at tryggja, at útboðið fer rætt fram.

Elsa Berg luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 18. september 2025:**

Samtykt við 7 atkvøðum fyri og 5 atkvøðum ímóti at taka undir við tilmælinum, tó við tí viðmerking, at málið verður gjøgnumgingið aftur og lagt fyri býráðið av nýggjum, um orsøk er til tess.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Elsa Berg luttók ikki í viðgerðini av málinum.

| | **Býráðsfundur**<br>18. september 2025 | Blað nr.: 568<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

## 191/25 P-pláss í bygdini á Hvítanesi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Hvítanesnevndin | 16.06.2025 | 6/25 | 25/05378-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.09.2025 | 113/25 | 25/05378-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 01.09.2025 | 49/25 | 25/05378-1 |
| 4 Hvítanesnevndin | 23.09.2025 | 8/25 | 25/05378-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 140/25 | 25/05378-1 |
| 6 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 191/25 | 25/05378-1 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til mál nr. 25/03795 Fríðkan av bygdunum - Hvítanes - 23/03134, har tað 12.03.2025 varð víst á, at eitt tað mest átroðkandi at fáa gjørt, er at útvega parkeringspláss niðri í bygdini.

**Lýsing av málinum**
Uppskot um p-pláss og uppihaldsøki við gøtu millum veg og fjøru var framlagt.

**Hvítanesnevndin 16. juni 2025:** Uppskot til p-pláss varð framlagt og umrøtt. J.nr. 25/05378-2. Tekniska deild arbeiðir víðari við framløgdu loysnini viðv. parkeringsplássi og samskiftir við býarskipanardeildina um miðstaðarætlanina.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur gjørt kostnaðarmeting av ætlað p-plássinum sum er uml. kr. 300.000,- Í fyrsta lagi verður einans farið undir at gera parkeringsplássið, og seinni verður farið undir at gera fyrireikingararbeiðið til gøtu oman á sjóvarmálan osfr. samb. Átaksætlan fyri Hvítanes, sí skjal nr. 25/05378-6.

**Skjøl**
25/05378-2 P í bygdini.pdf
23/03134-5 Fríðkan av bygdunum – Hvítanes
25/05378-6 Átaksætlan fyri Hvítanes

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81998 | Parkering | 8175 | | | P-pláss í bygdini á Hvítanesi | 300.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. september 2025 | Blað nr.: 569 | |
| | Forkvinnunnar merki: | |

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 300.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025-2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 10.000 |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at

1) Játta kr. 300.000 av LK81998, Parkering, á nýggja verkætlan "P-pláss í bygdini á Hvítanesi", báðar undir konto 8175 Vegir (íløgur).
2) Beina málið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 01. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt.

# 192/25 Innkomuvegur – íbindingar o.a. - 23/03480

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.06.2025 | 27/25 | 25/00243-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 113/25 | 25/00243-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 158/25 | 25/00243-1 |
| 4 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 192/25 | 25/00243-1 |

Málið er lýst í málslýsing jnr. 23/03480-1 Innkomuvegur – íbindingar o.a., sum er lagt við sum fylgiskjal.

**Ískoyti**

Nú vegarbeiðið at gera íbindingarvegin við hartilhoyrandi íbindingum sambært tíðarætlan verður avhendað um mánaðarskiftið juni/juli 2025, er talan um nakrar meirveitingar. Tørvur er á at fáa fígging til hesar meirveitingar, og biðið verður um játtan til tess.

Íbindingarnar eru:

1. Íbindingarveg millum rundkoyringina í Marknagili og Oyggjarvegin
2. Íbindingarvegir millum innkomuvegin og Sundsvegin og Flatarvegin, íroknað brúgv um Hoydalsá.
3. Íbindingarvegir millum innkomuvegin og Klingruvegin.
4. Íbindingarveg millum innkomuvegin og Føroya Arena.
5. Rundkoyring á Niðarahjalla

<u>Fíggjarlig uppgerð pr. 05.05 2025</u>

| | | |
|---|---|---|
| Samlað játtan íalt | kr. | 85.320.000 |
| Brúktar eru | kr. | 68.198.428 |
| Avlop | kr. | 17.121.572 |
| | | |
| Virði á arbeiði at gera til avhending | kr. | 32.352.349 |
| Framskrivað fíggjarstøða við avhending | kr. | -15.230.777 |

Vísandi til omanfyri standandi er tørvur á at fáa játtað 15,23 mió fyri at fáa rinda meirveitingarnar, sum eru neyðugar fyri liðugtgerð av verkætlanini so sum

1) Keyp av lendi frá BST kr. 3.100.000
2) Rundkoyring við Marknagil kr. 3.500.000
3) Íbinding í Oyggjarvegin v.m. kr. 3.000.000
4) Ymiskt, so sum lendiskeyp frá privatum, flyting av innkoyring til Hotel Føroyar, eyka spreinging við Klingruna, o.a., kr. 5.300.000

Á fundi 26.10.2023 samtykti fíggjarnevndin *'at taka undir við teknisku nenvd við teirri viðmerking, at fíggingin av hesum íbindingarvegum verður tengd at teimum inntøkum, sum eru í sambandi við verkætlanir, ið eru knýttar at innkomuvegnum og her umrøddu íbindingunum.'*

Avgerðin var staðfest á býráðsfundum 26.10.2023 og 09.11.2023.

Víst verður annars til skjal nr. 25/01150-2 Totalt yvirlit 6.xlsx

**Skjøl**
23/03480-1 Innkomuvegur – íbindingar o.a.,
25/01150-2 Totalt yvirlit 6.xlsx

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6975 | L69004 | Vinnustykkir | 8175 | L81054 | Innkomuvegur - íbindingar o.a. | | 15.200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at

1) játta kr. 15,2 mió fíggjað sum útlegg av konto 6975, Byggibúning ídnaðarøki (íløgur) L69004 Vinnustykkir, á kto. 8175, Vegir (íløgur) L81054 Innkomuvegur - íbindingar o.a., til liðugtgerð av verkætlanini sambært omanfyri standandi býráðssamtyktum frá 26.10.2023 og 09.11.2023 og at beina málið um fíggjarnevndina til tvær viðgerðir í býráðnum.

**Tekniska nevnd 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Í samband við gjøgnumgongd av fíggjarstøðuni í verkætlan L69004 Vinnustykkir undir kt. 6975 Byggibúning ídnaðarøkir (íløgur) er staðfest, at inntøkurnar frá hesi verkætlan ikki kunnu bera eitt økt útlegg til at fíggja omanfyri lýsta tørvin á eyka fígging til meirveitingarnar. Tí verður í staðin mælt til at hesar meirveitingar verða fíggjaðar við at økja lántøkuna í samband við innkomuvegin.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Lántøka | 8175 | L81054 | Innkomuvegur - íbindingar o.a. | | 15.200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tikið verður undir við samtyktini hjá teknisku nevnd frá 02. juni 2025, við teirri broyting, at upp til 15,2 mió. kr. verða fíggjaðar við øktari lántøku í samband við verkætlan L81037 Innkomuvegur og beina málið víðari til býráðið til eina viðgerð.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Borgarstjórin legði fram soljóðandi broytingaruppskot:

Samtykt at taka undir við fíggjarnevndini við tí ískoyti at upp til 2 mió. kr. afturat verða settar av til endurbøting av lendi kring innkomuvegin.

Fyri broytingaruppskotinum atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann

Málið varð, soleiðis broytt, samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

**Býráðsfundur 18. september 2025:**
Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, sum broytt við broytingaruppskotinum á býráðsfundinum 18. juni 2025.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen

Blankt atkvøddu: ongin

Málið varð sostatt samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

# 193/25 Reinsiverk til vinnuútstykking á Ovara Hjalla - 22/01377

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 01.09.2025 | 44/25 | 25/05863-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 145/25 | 25/05863-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 193/25 | 25/05863-1 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við útstykkingararbeiðið til vinnustykkini á Ovara Hjalla og á Stórutjørn, verður neyðugt at staðseta eitt nýtt reinsiverk við vegamótið á Hjalla og Hvítanesvegurin, sum skal kunna rúma ca. 800 rúmmetrum.

Samstundis sum arbeitt verður við loysnini at staðseta reinsiverkið, er neyðugt at gera nakrar tillagingar á verandi kloakkleiðingum frá øllum vinnuøkinum á Hjalla.

Tørvur er á at fáa gjørt útbjóðingartilfar, har byggiskráin skal fevna um staðseting av reinsiverki við leiðingum frá:

1) Vinnustykkjunum á ovara Hjalla
2) Útstykkingini á Stórutjørn
3) Verandi útstykking á Hjalla
4) Við Tjarnir

Harumframt skal byggiskráin fevna um at leggja høvuðskloakkleiðing frá reinsiverkinum og oman til sjóvarmálan sunnanvert Byrsumúla. Mett verður, at verandi høvuðskloakk, oman fyri Hvítanes, ikki klárar at taka ímóti meiri spillvatni.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | X | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |

| Upphædd |
|---|

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6875 | LK68999 | Kloakkir (íløgu r) | 6875 | | | Reinsiverk á Hjalla | | 750.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 750.000 av løgukarmi fyri kloakkir LK68999 undir kontu 6875, Kloakkir (íløgur) til nýggja verkætlan "Reinsiverk á Hjalla" og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 01. september 2025:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Heðin Mortensen, Anja Weyhe, tekur undir við tilmælinum.

Ein milliluti, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. september 2025:**

Atkvøtt varð um tilmælið:

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen

Blankt atkvøddu: ongin

Málið varð sostatt samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

# 194/25 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla - 22/01377

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.06.2025 | 26/25 | 25/01179-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 112/25 | 25/01179-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 157/25 | 25/01179-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | | | 25/01179-1 |
| 5 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 194/25 | 25/01179-1 |

Málið er lýst í jnr. 22/01377-1 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla, sum er lagt við sum fylgiskjal.

**Ískoyti**
Umsitingin kunnar um gongdina í útstykkingararbeiðinum og um fíggjarstøðuna. Í hesum sambandi verður biðið um at hækka útleggið.

Nú ynski er um, at farast skal undir at gera smærri vinnustykkir, verður tann parturin lýstur, og biðið verður um at hækka útleggið tilsvarandi.

Í sambandi við íbindingarvegirnar til Havnarvegin er samtykt, at inntøkur frá vinnustykkjunum á Ovara Hjalla skulu fíggja útreiðslur til vegagerðina. Í hesum sambandi verður biðið um fígging til íbindingarvegirnar við at hækka útleggið.

<u>Fíggjarlig viðurskifti viðv. liðugtgerð av verandi prosjekti:</u>
Fíggjarlig uppgerð primo juni 2025

| | |
|---|---|
| Samlað játtan íalt | kr. 88.000.000,- |
| | |
| Brúktar eru | kr. 64.859.000,- |
| Avlop | kr. 23.141.000,- |
| | |
| Virði á arbeiði at gera frá nú til avhending | kr. 65.451.796,- |
| Framskrivað fíggjarstøða | kr. -42.310.796,- |

So statt manglar játtan álj. kr. 42.310.796,- til at gera útstykkingararbeiðið liðugt, tvs. upprunaligu verkætlanina. Sí skal nr. 25/01150-2 Totalt yvirlit 6.xlsx.

Meirkostnaðurin stavar í høvuðsheitinum frá hesum:

1) Lendiskeyp kr. 26.865.000 – harav kr. 12.435.000 er fyri lendið til høllina við Tjarnir
2) Keyp av gróti frá Eysturoyartunlinum kr. 11.475.000
3) Matrikulútreiðslur o.a. kr. 7.300.000

<u>Fíggjarlig viðurskifti ísv. møguliga broyting av prosjektinum.</u>
Nú útstykkingararbeiðið er komið so mikið ávegis, ynskist støða verða tikin til um nøkur grundstykki skulu gerast minni. Sambært verkætlanini eru 29 grundstykki á støðd millum 1800 $m^2$ og upp til 9-10.000 $m^2$. Fyri at nøkta einum breiðari skarða av møguligum keyparum, hava ynski verið frammi um at gera 3 stór grundstykki til 22 smærri – støddin er ætlað at verða millum 250 og 500 $m^2$ hvørt.

Umframt liðuggerð sambært omanfyri standandi verður mett, at meirkostnaðurin av at býta grundstykkini sundur verður uml. kr. 14 mió. Víst verður til niðanfyri nevndu skjøl.

Fíggjarlig viðurskifti ísv. íbindingarvegirnar í innkomuvegin (Havnarvegin)
Víst verður til mál nr. 23/03480-1 Innkomuvegur – íbindingar o.a.
Á fundi 26.10.2023 samtykti fíggjarnevndin "*at taka undir við teknisku nevnd við teirri viðmerking, at fíggingin av hesum íbindingarvegum verður tengd at teimum inntøkum, sum eru í sambandi við verkætlanir, ið eru knýttar at innkomuvegnum og her umrøddu íbindingunum.*"

Avgerðin var staðfest  á býráðsfundum 26.10.2023 og 09.11.2023.

Sambært máli nr. 25/03480-1, Innkomuvegur – íbindingar o.a., í skjali nr. 25/01150-2 Totalt yvirlit 6.xlsx, verður mett at framskivaður fíggjartørvur fyri liðugtgerð av íbindingarvegunum er 15,2 mió kr. Sambært omanfyri nevndu samtykt verður útleggið fyri vinnustykkini á Ovara Hjalla økt við kr. 15,2 mió, sum í øðrum máli verða játtaðar til liðugtgerð av íbindingarvegunum.

**Skjøl**
22/01377-1 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla
25/05884-1 Fíggjarligt yvirlit smá vinnustykkir.xlsx
25/05884-2 Uppskot til smá vinnustykkir.pdf
25/05884-3 Tilboð frá Articon 19.03.2025.pdf
25/01150-2 Totalt yvirlit 6.xlsx.

## Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 42.310.000 |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 14.000.000 |
| | | | | | | | |

## Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at

1. Játta kr. 42.31 mió til liðuggerð av vinnustykkjunum fíggjað sum útlegg á kto. 6975 Byggibúning ídnaðarøki L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.
2. Játta kr. 14 mió til framhaldandi útstykkingararbeiði av vinnustykkjunum fíggjað sum útlegg á kto. 6975 Byggibúning ídnaðarøki L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Vísast skal á, at 1. punkt í tilmælinum til teknisku nevnd 2. Juni 2025 ikki er rætt. Biðið var um 42.31 mió. kr. Meginparturin av upphæddini er áður samtykt og játtað í býráðinum. Tørvur er á fígging til matrikulútreiðslur o.a. kr. 7.300.000,-. Í viðfestu skjølunum er neyvari fíggjarligt yvirlit og yvirlit yvir samtyktar játtanir til verkætlanina L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla.

**Skjøl**
Umframt tey omanfyri nevndu skjølini eru hesi skjølini:

25/01179-4 Yvirlit yvir fíggarstøðu í verkætlan L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla pr juni 2025.pdf partur av hesum ískoytinum

25/01179-5 Yvirlit yvir játtanir í til verkæltan L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla pr juni 2025.pdf

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 7.300.000 |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 14.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd frá 2. juni 2025 við teirri broyting undir punkti 1 at: Játta kr. 7,3 mió. til liðugterð av vinnustykkjunum, fíggjað sum útlegg á kto. 6975 Byggibúning ídnaðarøki, L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Ískoyti**
Vísast skal á, at 1. punkt í tilmælinum til teknisku nevnd 2. Juni 2025 ikki er rætt. Biðið var um 42.31 mió. kr. Meginparturin av upphæddini er áður samtykt og játtað í býráðinum. Tørvur er á fígging til matrikulútreiðslur o.a. kr. 7.300.000,-. Í viðfestu skjølunum er neyvari fíggjarligt yvirlit og yvirlit yvir samtyktar játtanir til verkætlanina L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla.

**Skjøl**
Umframt tey omanfyri nevndu skjølini eru hesi skjølini:

25/01179-4 Yvirlit yvir fíggarstøðu í verkætlan L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla pr juni 2025.pdf partur av hesum ískoytinum

25/01179-5 Yvirlit yvir játtanir í til verkæltan L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla pr juni 2025.pdf

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 7.300.000 |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 14.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd frá 2. juni 2025 við teirri broyting undir punkti 1 at: Játta kr. 7,3 mió. til liðugterð av vinnustykkjunum, fíggjað sum útlegg á kto. 6975 Byggibúning ídnaðarøki, L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Ískoyti**
Vísast skal á, at 1. punkt í tilmælinum til teknisku nevnd 2. Juni 2025 ikki er rætt. Biðið var um 42.31 mió. kr. Meginparturin av upphæddini er áður samtykt og játtað í býráðinum. Tørvur er á fígging til matrikulútreiðslur o.a. kr. 7.300.000,-. Í viðfestu skjølunum er neyvari fíggjarligt yvirlit og yvirlit yvir samtyktar játtanir til verkætlanina L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla.

**Skjøl**
Umframt tey omanfyri nevndu skjølini eru hesi skjølini:

25/01179-4 Yvirlit yvir fíggarstøðu í verkætlan L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla pr juni 2025.pdf partur av hesum ískoytinum

25/01179-5 Yvirlit yvir játtanir í til verkæltan L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla pr juni 2025.pdf

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

Eykajáttan ☐

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 7.300.000 |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 14.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**

Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd frá 2. juni 2025 við teirri broyting undir punkti 1 at: Játta kr. 7,3 mió. til liðugterð av vinnustykkjunum, fíggjað sum útlegg á kto. 6975 Byggibúning ídnaðarøki, L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Ískoyti**

Vísast skal á, at 1. punkt í tilmælinum til teknisku nevnd 2. Juni 2025 ikki er rætt. Biðið var um 42.31 mió. kr. Meginparturin av upphæddini er áður samtykt og játtað í býráðinum. Tørvur er á fígging til matrikulútreiðslur o.a. kr. 7.300.000,-. Í viðfestu skjølunum er neyvari fíggjarligt yvirlit og yvirlit yvir samtyktar játtanir til verkætlanina L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla.

**Skjøl**

Umframt tey omanfyri nevndu skjølini eru hesi skjølini:

25/01179-4 Yvirlit yvir fíggarstøðu í verkætlan L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla pr juni 2025.pdf partur av hesum ískoytinum

25/01179-5 Yvirlit yvir játtanir í til verkæltan L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla pr juni 2025.pdf

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

Eykajáttan ☐

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 7.300.000 |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 14.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

## Tilmæli

Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd frá 2. juni 2025 við teirri broyting undir punkti 1 at: Játta kr. 7,3 mió. til liðugterð av vinnustykkjunum, fíggjað sum útlegg á kto. 6975 Byggibúning ídnaðarøki, L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

## Ískoyti

Vísast skal á, at 1. punkt í tilmælinum til teknisku nevnd 2. Juni 2025 ikki er rætt. Biðið var um 42.31 mió. kr. Meginparturin av upphæddini er áður samtykt og játtað í býráðinum. Tørvur er á fígging til matrikulútreiðslur o.a. kr. 7.300.000,-. Í viðfestu skjølunum er neyvari fíggjarligt yvirlit og yvirlit yvir samtyktar játtanir til verkætlanina L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla.

## Skjøl

Umframt tey omanfyri nevndu skjølini eru hesi skjølini:

25/01179-4 Yvirlit yvir fíggarstøðu í verkætlan L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla pr juni 2025.pdf partur av hesum ískoytinum

25/01179-5 Yvirlit yvir játtanir í til verkæltan L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla pr juni 2025.pdf

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒

Eykajáttan ☐

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 7.300.000 |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 14.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |

| | | |
|---|---|---|
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd frá 2. juni 2025 við teirri broyting undir punkti 1 at: Játta kr. 7,3 mió. til liðugterð av vinnustykkjunum, fíggjað sum útlegg á kto. 6975 Byggibúning ídnaðarøki, L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Ískoyti**
Vísast skal á, at 1. punkt í tilmælinum til teknisku nevnd 2. Juni 2025 ikki er rætt. Biðið var um 42.31 mió. kr. Meginparturin av upphæddini er áður samtykt og játtað í býráðinum. Tørvur er á fígging til matrikulútreiðslur o.a. kr. 7.300.000,-. Í viðfestu skjølunum er neyvari fíggjarligt yvirlit og yvirlit yvir samtyktar játtanir til verkætlanina L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla.

**Skjøl**
Umframt tey omanfyri nevndu skjølini eru hesi skjølini:

25/01179-4 Yvirlit yvir fíggarstøðu í verkætlan L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla pr juni 2025.pdf partur av hesum ískoytinum

25/01179-5 Yvirlit yvir játtanir í til verkæltan L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla pr juni 2025.pdf

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 7.300.000 |
| | | Útlegg | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 14.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd frá 2. juni 2025 við teirri broyting undir punkti 1 at: Játta kr. 7,3 mió. til liðugterð av vinnustykkjunum, fíggjað sum útlegg á kto. 6975 Byggibúning ídnaðarøki, L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum at játta kr. 14 mió. til framhaldandi útstykkingararbeiði av smærru vinnustykkjunum fíggjað sum útlegg á kto. 6975 Byggibúning ídnaðarøki L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Birgir Nielsen, Astrið Breckmann og Hildur Eyðunsdóttir.

Blank atkvøddi: Kári Johansen.

Málið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og einar blankari atkvøðu.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Tróndur Sigurðsson legði vegna minnilutan, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen, fram soljóðandi broytingaruppskot:

Minnilutin tekur ikki undir við tilmælinum og mælir heldur til at stykkini verða sundurbýtt og seld sum tey eru.
Minnilutin metir at prísurin fyri stykkini verða ov høg og at tað kann verða trupult at selja tey av hesu orsøk.

Atkvøtt varð fyrst um broytingaruppskotið:

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála

Blankt atkvøddi: Ongin

Broytingaruppskotið fall sostatt við 5 atkvøðum fyri, 8 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini:

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen

Blankt atkvøddi: Ongin

Málið varð sostatt samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

# 195/25 Málslýsing - Ummæli um sundurbýti av matr. nr. 55-1175a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.09.2025 | 111/25 | 25/07373-6 |
| 2 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 195/25 | 25/07373-6 |

**Upprunin til málið**
Umhvørvisstovan hevur sent umsókn um sundurbýti í Húsahaga í Tórshavn til Tórshavnar kommunu til ummælis.

**Lýsing av málinum**
Málið hevur tilknýti til málið um Húsareynstunnilin og Havnarvegin. Tað málið verður ikki endurgivið í heilum líki í hesi málslýsing. Hendan málslýsing snýr seg einans um sundurbýti av matr. nr. 55-1175a (Húsahagi) í sambandi við, at kommunan keypir part av Húsahaga til innkomuvegin. Í sambandi við keypið hevur Búnaðarstovan søkt um sundurbýti av matr. 55-1175a.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Grein 20 í Løgtingslóg um matrikulering og sundurbýti v.m. við seinni broytingum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Á sumri 2023 samtykti Tórshavnar Býráð m.a.:

- At fíggjarætlanin fyri 2023 verður hækkað kr. 130.440.000 við eykajáttan, sum verður fíggjað við lántøku, og henda hækking verður veitt løgukarminum LK81037 innkomuvegur undir deild 8175 Vegir (íløgur).
- At játta kr. 9.150.000 til byggiharraútreiðslur í sambandi við verkætlanina at gera innkomuvegin og kr. 3.200.000 til eykaútreiðslur í sambandi við yvirgongd frá arbeiðstøku at gera arbeiðsveg til heildararbeiðstøku at gera innkomuveg. At játta kr. 22.000.000 til óvæntaðar byggiharraútreiðslur, harav kr. 14.270.000 verða veittar av LK81037 Innkomuvegur í 2023 á L81037 Innkomuvegur og kr. 7.830.000 verða veittar í 2024 av LK81037 Innkomuvegur

Í málslýsingini til ta býráðssamtyktina stóð m.a. at lesa:

> “Afturat byggiharraútreiðslunum, sum blivu samtyktar á fundi í teknisku nevnd tann 5. juni, hevur arbeiðstakarin biðið um, at lendið millum ríðibreytina, matrikul 1175h (Hotel Føroyar) og matrikul 1160a (Flatnahagin) verður tøkt í sambandi við grevstrararbeiði til inntakið av tunlinum í Marknagili. Her er talan um 15.000 m² í matr. 1175a (Húsahagi). Fyritøkan hevur tørv á hesum lendinum til atkomu og byggipláss. Samlað verður í fyrstu atløgu biðið um at leiga alt lendið, og verður tað mett, at hetta kann gerast fyri kostnað á kr. 150.000. Seinni í verkætlanini verður eisini neyðugt at keypa nakað av hesum lendinum (uml. 11.000 m²), men verður hetta lagt fram, tá hetta gerst aktuelt.”

Umsitingin hevur síðani viðgjørt tørvin á keyp av lendi frá Búnaðarstovuni. Fyri ikki at sundurbýta festið í Húsahaga í óneyðugar brotpartar og at skula gera atkomu millum partar av Húsahaga tvørtur um keypta lendið, var avgjørt at keypa 32.037 fermetrar av jørðini (heldur enn 11.000 fermetrar). Hetta so at lendið til keyps verður tann samanhangandi geirin av lendi, sum byrjar omanfyri Kerjagøtu og niðan til tunnilsmunnan og eystur í Oyggjarvegin.

Búnaðarstovan hevur játtað umsóknina við nøkrum treytum, herundir at sundurbýtið verður framt. Keypspenningurin á 3.683.653 kr. kann rúmast innanfyri ta játtan, sum Tórshavnar Býráð longu hevur samtykt á sumri í 2023. Umsitingin metir tó út frá eini heildarmeting, at tørvur er á eini ávísari politiskari viðgerð av málinum, áðrenn farið verður víðari í málinum. Tí verður málið um sundurbýtið lagt fyri nevnd, hóast nevndin hevur givið umsitingini heimild til at avgreiða ávís mál í summartíð uttan nevndarviðgerð.

Á innanhýsis korttilfarinum hjá kommununi eru sonevndu "bumbuholini" staðsett á tí lendi, sum hetta málið snýr seg um. Umsitingin hevur kannað málið, og talan er um eina skrásetingarvillu á kortinum. Bumbuholini eru í veruleikanum staðsett inni á grannastykkinum (Hotel Føroyar) og eru sostatt ikki fevnd av tí lendi, sum hetta málið snýr seg um. Umsitingin metir tí ikki, at høvi er at taka upp samband við friðingarmyndugleikar ella annað tílíkt í hesum máli.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK – innkomuveg (málsnr. 25/01181).

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tekniska Deild hevur váttað, at talan er um sama lendi, sum Tórshavnar Kommuna hevur søkt um at keypa.

Býarskipanardeildin vísir á, at tað gevur góða meining fyri heildina, at alt økið verður keypt til kommununa. Økið niðanfyri/innanfyri innkomuvegin er øki, sum natúrliga hongur saman við grøna geiranum, sum gongur frá í Kerjum oman Marknagil og framvið Rættará. Gøtur eru longu gjørdar í økinum, og er ynskiligt at fleiri gøtur verða gjørdar í økinum í framtíðini. Tískil er tað natúrligt at hetta økið sum partur av gøtuskipanini í kommununi er kommunalt lendi.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
25/07373-1 Umsókn um sundurbýti matr. nr. 1175a, Tórshavn, til ummælis

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | X | X | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei
Talan er um fíggjarligar avleiðingar, sum tó liggja innan fyri tann játtaða fíggjarkarmin, sum Tórshavnar Býráð samtykti í 2023, sjá omanfyri.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, býararkitekturin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at ganga umsóknini á møti.

Samstundis verður mælt til, at nevndin tekur støðu til, um málið skal beinast í Býráðið til endaliga støðutakan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt.

# 196/25 Málslýsing - Fyribils støðgur av nýggjum loyvum til jarðhitaboringar á Tinganesi og í gomlu Havnini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.09.2025 | 112/25 | 25/07422-6 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.09.2025 | 50/25 | 25/07422-6 |
| 3 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 196/25 | 25/07422-6 |

**Upprunin til málið**
Tann 7. mai 2025 var borgarstjórin á fundi við Reynafelagið. Fleiri ymisk mál vórðu umrødd, m.a. ein møguligur støðgur av nýggjum jarðhitaboringum.

Tann 14. juli 2025 kom nýggj umsókn um jarðhitaboring á Reyni.

**Lýsing av málinum**
Vanliga verða umsóknir um loyvi til jarðhitaboringar ikki lagdar fyri nevnd. Vanliga verða slíkar umsóknir avgreiddar av umsitingini. Av tí at tað stutt frammanundan nýggju umsóknina hevði verið fundur við Reynafelagið um jarðhitaborðingar í økinum, verður júst hendan umsóknin løgd fyri nevnd til støðutakan.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Grein 3, 5 og 6 í Løgtingslóg nr. 22 frá 16. mars 2012 um el-riknar hitapumpuskipanir við seinni broytingum.

**Upplýsingar frá umsitingini**

<u>Um fundin við Reynafelagið</u>
Á fundinum við Reynafelagið tann 7. mai 2025 varð ført fram, at tað er ikki pláss fyri, at hvørt hús fær egna jarðhitaskipan. Ei heldur kunnu hitapumpur setast upp uttan fyri hvørt hús.

Reynafelagið bar fram ynski um at kanna, hvørt tað er gjørligt at finna eina felags hitaloysn til Reyn, møguliga sum jarðhita ella sjóhitaloysn. Tað kann vera ein felags skipan, ella at økið verður býtt í partar, har hvør partur hevur hvør sína felags loysn. Tað kann eisini kannast, um tað er gjørligt at knýta seg í felagsskipanina, sum Landsverk arbeiðir við fyri landsins ognir í økinum.

<u>Um umsóknnina á Reyngøtu 9</u>
Grein 6 í løgtingslógini um el-riknar hitapumpuskipanir lýsir ymisk krøv, sum skulu verða lokin fyri at fáa loyvi. Sambært grein 6, stk. 1, nr. 2, krevst “at tað ikki stríðir móti týðandi atlitum til verandi ella framtíðar byggingar, byggisamtyktir, lendisætlanir, kommunuætlanir, náttúrufrøðilig og ella jarðfrøðilig atlit o.a. at geva loyvi til jarðhitaskipanina”.

Eitt av høvuðsendamálunum við teirru serstøku byggisamtyktini fyri Tinganes og gomlu Havnina er m.a. at varðveita serstaka dámin í økinum. Økið verður sum heild mett at vera ein týðandi partur av bygnings- og mentanararvinum.

Sambært grein 6, stk. 2, nr. 3 í omanfyrinevndu løgtingsóg, skal sum meginregla vera í minsta lagi 20 metrar ímillum hvørja jarðhitaboring. Av tí at økið Tinganes og gamla Havnin sum heild er sera lítið og tættbygt, verður tað ikki gjørligt hjá hvørjum einstøkum at fremja egna jarðhitaboring. Hvør nýggj jarðhitaboring inniber avmarkingar fyri fleiri grannaognir at fremja sína egnu jarðhitaboring. Reyngøta 9 er staðsett at kalla mitt á Reyni beint við Doktaragrund, og ein jarðhitaboring júst her fær tí avleiðingar fyri fleiri reynabúgvar; ikki bara nærmasta granna.

Tískil, og serliga við atlitið til, at Reynafelagið longu tveir mánaðir frammanundan umsóknini, tann 7. mai 2025, hevur borið fram eitt ítøkiligt uppskot um sjálvi at vilja kanna møguleikarnar fyri eini felags loysn, verður tað mett at vera í samsvar við grein 6 stk. 1, nr. 2, í omanfyrinevndu løgtingslóg at sýta nýggjum umsóknum um jarðhitaboringum í økinum í eitt avmarkað tíðarskeið, meðan tað verður kannað, um aðrar loysnir eru tøkar, sum í størri mun kunnu tryggja atlitini aftan fyri serstøku byggisamtyktina í økinum.

Um ein fyribils steðg
Løgtingslóg nr. 22 frá 16. mars 2012 um el-riknar hitapumpuskipanir við seinni broytingum hevur ikki eina ítøkiliga áseting um at lýsa fyribils steðg av jarðhitaboringum í ymiskum grannaløgum. Eftir eini heildarmeting metir Tórshavnar kommuna, at ásetingarnar í løgtingslógini tó geva kommununi heimild at sýta umsóknum um loyvir í ávísum førum, sum í verki samsvarar við ein fyribils steðg.

Sambært grein 3 í løgtingslógini er tað kommunan, sum veitir loyvi til at gera jarðhitaskipanir.
Sambært grein 5 í løgtingslógini tekur kommunan avgerð í málinum í samráð við Umhvørvisstovuna og sendir málið til ummælis hjá Jarðfeingi. At kommunan tekur avgerðina í samráð við Umhvørvisstovuna broytir ikki, at tað er kommunan, sum hevur avgerðarrætt til at geva ella sýta loyvið.

Sum nevnt omanfyri, krevst sambært grein 6, stk. 1, nr. 2, "at tað ikki stríðir móti týðandi atlitum til verandi ella framtíðar byggingar, byggisamtyktir, lendisætlanir, kommunuætlanir, náttúrufrøðilig og ella jarðfrøðilig atlit o.a. at geva loyvi til jarðhitaskipanina".

Eitt av høvuðsendamálunum við teirru serstøku byggisamtyktini fyri Tinganes og gomlu Havnina er m.a. at varðveita serstaka dámin í økinum. Økið verður sum heild mett at verða ein týðandi partur av bygnings- og mentanararvinum.

Ein felagshitaloysn verður mett at stuðla undir at røkka endamálinum við serstøku byggisamtyktini. Ein fyribils steðgur av nýggjum loyvum, meðan Reynafelagið kannar møguligar felagsloysnir, verður sum heild mettur at verða fevndur av atlitunum í grein 6, stk. 1, nr. 2, í omanfyrinevndu løgtingslóg. Sostatt verður mett, at kommunan hevur heimild at lýsa ein fyribils steðg, sum í verki verður framdur sum ein sýtan av umsóknum um loyvir til jarðhitaboringar í einum avmarkaðum tíðarskeiði.

Jarðhitaboriloyvir, sum longu eru játtað
Tað eru longu játtað 7 loyvir til jarðhitaboringar í byggisamtyktarøkinum fyri serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina.

Ein fyribils steðgur av nýggjum loyvum merkir ikki, at játtað loyvir verða tikin aftur ella broytt.

Landafrøðilig avmarking
Atlitini handan fyribils steðgin eru knýtt at atlitiunum í serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina. Umsitingin hevur mett um, hvørt tað er grundarlag fyri bert at lýsa fyribils steðgin í einum brotparti av byggisamtyktarøkinum. Av tí at byggisamtyktarøkið frammanundan er sera lítið, og av tí at jarðhitaboringar hava ávírkan á ikki bara ta einstøku ognina, men ognirnar í ein diametur upp á umleið 40 metrar, kann endamálið við fyribils steðginum sum heild illa røkkast, um fyribils steðgurin bert verður settur í verk fyri ein brotpart av bygdisamtyktarøkinum. Somuleiðis kann endamálið ei heldur røkkast, um loyvt verður at fremja jarðhitaboringar beint hinumegin byggisamtyktarmarkið, tí jarðhitaborðingar hava omanfyri nevndu ávírkan í ein diametur á umleið 40 metrar.

Verður ein fyribils steðgur lýstur, verður tað mett neyðugt, at hann í øllum førum fevnir um alt byggisamtyktarøkið, og helst eisini um tann partin av grannaøkjunum, har boriholið verður staðsett 20 ella færri metrar frá byggisamtyktarmarkinum. Í verki merkir hetta, at ognir í økinum millum Áarvegin, Húsabrúgv og Bringsnagøtu verða merkt av fyribils steðginum.

Tíðarbil
Talan er ikki um eitt varandi forboð. Fyribils steðgurin er eyðmerktur av at vera í eitt tíðaravmarkað skeið. Um endamálið við fyribils steðginum skal røkkast, skal tíðarskeiðið vera nóg leingi til, at Reynafelagið fær

rímiliga tið at kanna møguleikarnar fyri eini felagsloysn. Samstundis skal tíðarskeiðið vera nóg stutt til at tryggja, at málið ikki verður óneyðuga drúgt, og at einstaklingaboringar kunnu takast upp aftur, um grundarlagið ikki verður funnið fyri eini felags loysn. Eitt tíðarbil fram til og við desember 2026 verður mett at tryggja eina javnvág millum hesi bæði atlitini.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ein annar fyribils støðgur vivíkjandi jarðhitaloyvum er longu settur í verk (jnr. 25/00461).

Í mars 2025 fekk kommunan kunning um, at nógv vatn kom úr einum jarðhitaholi í Gæsugøtu í Tórshavn. Metingin frá Jarðfeingi var, at jarðfrøðiligu viðurskiftini í økinum skuldu kannast, tí tað sýnist sum, at jarðhitaholið var kollapsað. Tað vil siga, at tilfarið í hesum intervallinum er skolað burtur. Hetta ger undirlagið óstøðugt, ið kann ávirka verandi bygningar. Orsakað av hesum máli, samtykti Tekniska nevnd at heimila umsitingini at seta fyribils boribann í gildi í økinum rundan um Gæsugøtu, inntil nærri kanningar eru gjørdar av økinum. Boribannið skal vera galdandi frá 10.03.2025 til og við 10.03.2026.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið hevur verið sent Umhvørvisstovuni og Landsverki til ummælis. Í umbønini til ummælið var landafrøðiliga avmarkingin eisnins byggisamtyktarøkið fyri teirru serstøku byggisamtyktini fyri Tinganes og gomlu Havnina – og ikki grannaøkir.

Landsverk hevur ikki svarað.

Umhvørvisstovan viðmælir einum fryibils steðgi. M.a. skrivar Umhvørvisstovan:

> “Okkara royndir eru, at hóast vit í fleiri førum hava lagt upp til og stuðla ítøkiligum royndum at gera felagshitaskipanir við jarðhita, hevur tað ongantíð enn eydnast at koma á mál.
> Tað vísir seg oftast, at loysnir, har hvørt hús hevur sína hitaskipan, eru lættast at seta í verk.
> Tó hava vit nakrar royndir við grannahúsum, sum hava eitt felags borihol til tvey hús. Tilgongdin við pappírsarbeiði er eitt sindur torførari enn annars, men tøkniliga loysnin riggar væl og húsaeigararnir eru stak væl nøgdir.
>
> Júst á Tinganesi kundu slíkar loysnir við felagsboriholi verið ein gongd leið. Nógv hús eru smá og hava lítlan orkutørv – serliga um tey verða dagførd viðvíkjandi bjálving.
> Tað er væl hugsandi, at eitt 400 metrar borihol i fleiri førum kann røkka til eini fýra sethús, men hetta skal sjálvandi verða ein partur av tykkara kanning.
>
> Sum tit eisini siga, eru almennu bygningarnir á Tinganesi bundnir saman i nærhitaneti við felags hitaskipan, sum í dag er oljufýr. Orka hevur verið ráðgevi í fyrireikandi arbeiðinum at skifta oljufýrið út við eina sjógvhitapumpuskipan.
>
> Orka vil fegin bjóða seg fram at ráðgeva og vera partur av tykkara greiningararbeiði, um tit ynskja tað.”

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
25/07183-1 Umsókn um boriloyvi til jarðhitaskipan á matr. nr. 52, Reyngøta 9, Tórshavn
25/07422-1 Fyribils støðgur av nýggjum jarðhitamálum á Reyni
25/07422-5 Viðmæli frá Umhvørvisstovuni-Orku
25/07422-7 Skerm-mynd av kortal, sum vísir jarðhitaloyvir í økinum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á Umhvørvisdeildini og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at:

- Lýsa ein fyribils steðg fram til og við tann 31. desember 2026 fyri nýggjum loyvum til jarðhitaboring í økinum fevnt av serstøku byggisamtyktini fyri Tinganes og gomlu Havnina, og grannaøkjum, har staðsetingin á jarðhitaboriloyvinum er 20 metrar ella minni frá byggisamtyktarmarkinum.
- Sýta umsókn um nýtt loyvi til jarðhitaboring í Reyngøtu 9 við tilvísing til týðandi atlitini í serstøku byggisamtyktini. Samstundis skal kunnast um, at fyribils steðgurin er fyribils, og at sýtanan ikki forðar fyri at søkja aftur seinni um nýtt loyvi, tá fyribils steðgurin er av.
- Heimila umsitingini at sýta framtíðar umsóknir um nýggj loyvir til jarðhitaboringar við somu grundgeving, so leingi omanfyrinevndi fyribils steðgur er galdandi.
- Umsitingin sendir Reynafelagnum kunning um fyribils steðgin og heitir á Reynafelagið um at kunna kommununa, so hvørt sum teirra kanningararbeiði gongur fram á leið
- Umsitingin sendir eitt kunningarskriv til allar góðkendar brunnborarar um fyribils steðgin.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. september 2025:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Robert Dam Jensen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Birgir Nielsen og Kári Johansen, tekur undir við tilmælinum, tó so at fyribils steðgurin er galdandi til 1. juli 2026, og beinir málið í býráðið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. september 2025:** Tikið av skrá vísandi til, at málið er beint í býráðið.

**Ískoyti**
Tann 2. september, dagin aftan á nevndarviðgerðina í Byggi- og býarskipanarnevndini, kom ummælisskriv frá Landsverk. Landsverk viðmælir einum fyribilssteðgi av einstaklingaloysnum – bæði jarðhitaboringum og uppseting av hitapumpum. M.a. skrivar Landsverk:

> "At gera luft/vatn loysnir til einstøk hús, er skemmandi fyri ein slíkan býling og ljóði frá útieindum kann gerast órógvandi í so tættbygdum øki.
>
> **Felags hitaloysnir fyri økið**
> Flestu bygningar hjá Føroya Landsstýri í økinum, allir í Tinganesi, í Reynagarði og í Gongini, eru við í felagshitamiðstøðini Undir Hjallara 10. Her er eyðsæð at leggja um til grønorku og at binda fleiri bygningar í.
>
> Skal leggjast um til jarðhita fyri alt økið, krevjast nógv hol. Við teimum krøvum, sum eru til frástøðu millum hol, krevst eisini eitt stórt øki. Kanningar mugu til at gera av, um tað er møguligt at bora nóg mikið av holum til eina slíka loysn.
>
> Ein sjógvhitaloysn vil krevja at ein pumpustøð, við nóg mikið av pumpu- og vekslaraorku verður bygd við sjógvin og atlit má takast fyri at sjógvinntakið ikki verður ov ábært fyri dálking úr umhvørvinum og fyri gróðri.

Ein fjarhitaleiðing var einaferð í umbúna, men varð ikki til veruleika. Kanningar av einari felags loysn, eiga eisini at umfata fjarhita.

Uttan mun til hvør loysn verður vald, má gravast/brekkast millum húsini. Fjarhitaleiðing,brinuleiðing frá sjógvhita, ella hitaleiðing frá einari miðstøð.

Eisini má roknast við at tørvur verður á høgum hita á framrenslinum, havandi í huga at flestu bygningarnir eru gamlir og ikki væl bjálvaðir. Tað førir við sær avbjóðingar fyri jarð- og sjógvhita, ið ikki hava høgan framrenslhita."

Tekniska fyrisiting í Tórshavnar kommunu mælir til, at fyribils steðgurin einans umfatar jarðhitaboringar. Fyribils steðgurin er so mikið stuttur (minni enn hálvtannað ár), at tað ikki verður mett ráðiligt at seta í verk ov nógv ella ov torgreið átøk. Heldur verður tilmælt at velja ein einkultan leist.

Uppruna tilmælið er sostatt óbroytt.

**Skjøl**
25/07422-12 Ummæli frá Landsverk

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Atkvøtt varð um uppruna tilmælið.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi: Ongin

Málið varð sostatt samtykt við 10 atkvøðum fyri, 3 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

# 197/25 Parkeringspláss við omankoyringina til Hvítanes

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Hvítanesnevndin | 12.03.2025 | 3/25 | 25/03896-1 |
| 2 Hvítanesnevndin | 16.06.2025 | 5/25 | 25/03896-1 |
| 3 Ferðslunevndin | 28.08.2025 | 25/25 | 25/03896-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 01.09.2025 | 48/25 | 25/03896-1 |
| 5 Hvítanesnevndin | 23.09.2025 | 9/25 | 25/03896-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 142/25 | 25/03896-1 |
| 7 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 197/25 | 25/03896-1 |

**Upprunin til málið**
Staðbundna nevndin á Hvítanesi ynskir at betra um ferðslutrygdina og møguleikan um til- og frákoyring út á landsvegin, og somuleiðis økja um trygdina hjá bussleiðini og ferðandi tess. Eisini at gera umstøðurnar hjá bilum at parkera í økinum.

**Lýsing av málinum**
Frá Hvítanesnevndini:

Trupuleikin lýstur í stuttum.
Tá býarbussurin koyrir inn á Hvítanes, stevnur hann beint móti busskýlinum, sum als ikki er ein ferðslutrygg loysn. Somuleiðis koyrir ferðslan til Hvítanes, sum kemur úr Havnini, beint framvið skýlinum. Skýlið er eitt sokallað krosskýli, sum skal kunna verja fólk móti vindi úr øllum ættum, men tað ger somuleiðs, at mann ikki altíð sær um fólk eru í skýlinum, ella eru fjald handan sýnina.

Ymiskar loysnir sum vit mæla til og ynskja verða framdar. Loysnirnar skulu tó viðgerðast av serkønum fólki innan ferðslutrygd og vegarbeiði, so frægasta loysnin verður funnin.

- Sjálvt skýli kann skiftast út við eitt úr glasi, ella partvíst úr glasi, so førarar síggja um fólk eru í skýlinum.
- Betongirðingin fram við gøtuni, kann leingjast, soleiðis at bussskýlið og fólk eru vard av girðingini, um ein bilur ella bussurin kemur av leið, tá koyrt verður inn á Hvítanes. Skelkarmyndin er, at bussurin ”pløjar” og koyrir beint gjøgnum bussskýlið, sum í dag er gjørligt, um heilt illa stóð til.
- Umhugsa aðra staðseting av sjálvum bussskýlinum.
- Sjálv útkoyringin verður flutt longur norður. Uttan serligt gravararbeiði, kann útkoyringin flytast eina heila farbreyt longur norður, 3–4 metrar, sum vil geva bussinum betur pláss at venda á Hvítanesi. Við eitt sindur av útfylling, kann útkoyringin flytast enn longur.

Stórt økið er eisini undir landsvegnum og norðanfyri útkoyringina, til at gera nøkur fá parkeringspláss til bilar og fólk at bíða eftir bussinum, ella at umskipa fólk og/ella viðføri.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

| | Býráðsfundur<br>18. september 2025 | Blað nr.: 592<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Hvítanesnevndin 12. mars 2025:** Kunnað og umrøtt varð um parkeringsætlanina. Ymsar loysnir vóru umrøddar og umsitingin ger uppskot til loysnir til komandi fund við at flyta busssteðgistaðið, gera parkeringspláss og nýtt bussskýli og alt hetta við 60 km/t á Hvítanesvegnum sum grundarlag.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram uppskot til umrøðu.

**Hvítanesnevndin 16. juni 2025:** Uppskotið varð framlagt og umrøtt. Umsitingin arbeiðir víðari við framløgdu loysnini. J.nr. 25/03896-7.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til loysn við miðoyggj, parkeringsplássi og tillagan av bussskýli við tilhoyrandi kostnaðarmeting álj. uml. kr. 550.000.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 8175 | | | Omankoyring til Hvítanes | 550.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 550.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 5.000 |

**Tilmæli.**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 550.000 til arbeiðið at dagføra vegamótið við omankoyringina til Hvítanes av LK81999 Vegaverkætlanir á nýggja verkætlan "Omankoyring til Hvítanes" báðar undir kontu 8175 Vegir (íløgur) og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Ferðslunevndin 28. august 2025:** Ferðslunevndin tekur undir við uppskotinum hjá umsitingini. Umsitingin arbeiðir víðari við ítøkiligum uppskoti til ferðslumerking.

**Tekniska nevnd 01. september 2025:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Heðin Mortensen, Anja Weyhe, tekur undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson atkvøður ímóti.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður ímóti.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Kári Johansen skeyt upp at beina málið aftur í nevnd.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Anja Weyhe og Bergur Robert Dam Jensen

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Blankt atkvøddi: ongin.

Samtykt at beina málið aftur í nevnd við 7 atkvøðum fyri, 6 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

# 198/25 Liðugtgerð av brúnni um Sandá við garðin hjá Poul Müller

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 01.09.2025 | 54/25 | 25/04579-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 144/25 | 25/04579-3 |
| 3 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 198/25 | 25/04579-3 |

**Upprunin til málið**
Brúgvin um Sandá, niðan til garðin hjá Poul Müller, bleiv breiðkað, tí at tað viðhvørt koyra bilar frá Biogassverkinum hesa leiðina.

**Lýsing av málinum**
Arbeiðið at breiðka brúnna varð byrjað í 2022, men bleiv ongantíð gjørt liðugt.
Enn manglar at asfaltera ein part, seta upp eitt rekkverk og leingja ein betonggarð.

**Upplýsingar frá umsitingini.**
Umsitingin hevur gjørt eina fyribils kostnaðarmeting av arbeiðinum álj. kr. 200.000. Sí skjal nr. 25/04579-4

**Skjøl**
Kostnaðarmeting j. nr 25/04579-4.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegir(íløgur) | 8175 | | | Liðugtgerð av brúnni um Sandá við garðin hjá Poul Müller | 200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 200.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | NA |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta 200.000 av LK81999 Vegir (íløgur) til nýggja verkætlan "Liðugtgerð av brúnni um Sandá við garðin hjá Poul Müller", báðar undir kontu 8175, og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 01. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið tí býráðið.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt.

## 199/25 Útbjóðing av ruskinnsavningini í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 13.06.2025 | 45/25 | 25/06300-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.09.2025 | 47/25 | 25/06300-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 146/25 | 25/06300-1 |
| 4 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 199/25 | 25/06300-1 |

**Upprunin til málið**
Sáttmálin, sum Tórshavnar kommuna hevur við IR-Lastbilar um ruskinnsavning í Tórshavnar kommunu, gongur út 30. september 2026, og tí er neyðugt at bjóða arbeiðið út av nýggjum.

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna hevur sáttmála við IR-Lastbilar um ruskinnsavning í Tórshavnar kommunu. Sáttmálin varð galdandi frá 1. apríl 2017 til 31. mars 2024. Sambært kap. 6, § 30 í sáttmálanum, varð sáttmálin longdur í eitt ár, fram til 31. mars 2025, og eftirfylgjandi er sáttmálin aftur longdur í 1,5 ár afturat, fram til 30. september 2026.

Seinasta leingjan av verandi sáttmála er okkara j.nr. 25/03240. Har samtykti náttúru- og umhvørvisnevndin, tann 17. mars 2025, at leingja sáttmálan í 1,5 ár, við tí treyt, at lisitatiónin verður innan 6 mánaðir. Fíggjarnevndin samtykti tann 19. mars 2025 at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
- Kunngerð nr. 147 frá 19 oktober 1995 um burturkast
- Kunngerð nr. 90 frá 20 juni 2011 um handfaring og burturbeining av burturkasti
- Reglugerð um burturbeining av húsarhaldsburturkasti í Tórshavnar kommunu, samtykt í september 2007 og komin í gildi 1. januar 2008.
- Løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021

Sambært kunngerð 147 um burturkast, kap. 2 um húsarhaldsburturkast:
- § 2, skal Kommunustýrið hava eina innsavningarskipan (dagrenovatión) til alt húsarhaldsburturkast. Skipanin skal umfata húsarhald, virkir, stovnar, v.m.
- § 3, kann Kommunustýrið gera av, at innsavningarskipanin eftir § 2 ikki skal umfata húsarhaldsburturkast frá virkjum, stovnum, o.l., ella ikki skal umfata ávís sløg av húsarhaldsburturkasti. Kommunustýrið skal tá ístaðin vísa á ein avhendingarmøguleika.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin hevur gjørt útbjóðingartilfar til innsavnan av húsarhaldsburturkasti í Tórshavnar kommunu.

Útbjóðingartilfarið er i trimum pørtum:
- Partur 1: Útbjóðingartreytir
- Partur 2: Sáttmáli um ruskkoyring
- Partur 3: Listar við yvirliti yvir heintingareindir.

Ynskiligt er, at tað verða minst tveir til fýra veitarar, sum bjóða inn. Tá freistin at biðja um útbjóðingartilfar er úti, síggja vit, hvussu nógv hava biðið um tilfar.

Hildið verður ikki, at tað er neyðugt við undangóðkenning.

<u>Tíðarætlan:</u>
Tað er umráðandi, at nýggjur sáttmáli við arbeiðstakaran verður undirskrivaður so skjótt, at tað ber til at fáa fatur á nýggjum renovatiónsbilum, áðrenn arbeiðstøkan byrjar.

Náttúru- og umhvørvisnevndin hevur samtykt, at lisitatiónin skal verða í seinasta lagi 17. september 2025.

Uppskot til tíðarætlan:
1. Arbeiðið verður boðið út í juni 2025
2. Tilboðini skulu verða inni í seinasta lagi 4. august 2025
3. Gjøgnumgongd og politisk viðgerð
4. Sáttmáli undirskrivast í seinasta lagi 1. oktober 2025
5. Arbeiðstøkan byrjar 1. oktober 2026

<u>Viðvíkjandi verandi ruskbilum:</u>
Í sáttmálanum er ásett í § 33, at ánarin hevur rætt til, men ikki skyldu til at yvirtaka renovatiónsbilarnar, tá ið sáttmálaskeiðið er av, ella um sáttmálin verður slitin ella uppsagdur.

Í stk. 2 stendur, at yvirtøkuvirðið fyri bilarnar, sum arbeiðstakarin yvirtekur, so fall verður ásett til upprunaliga keypsprísin minus 10% og við linjurættari niðurskriving (virðisminkan) yvir 7 ár, treytað av at bilarnir eru røktir sambært forskriftunum frá framleiðaranum, og at allar umvælingar eru framdar.

Sambært § 36 skulu ósemjur millum partarnar, sum ikki kunnu loysast við samráðingum, leggjast fyri gerðarrætt eftir føroyskum rætti.

Løgdeildin hevur gjørt notat um hetta (j.nr. 25/03240-6).

Renovatiónsbilarnir eru nú so gamlir, at tað gevur ikki nakra meining hjá Tórshavnar kommunu at yvirtaka hesar. Eisini er krav sett í útbjóðingartilfarið, at bilarnir skulu verða nýggir við sáttmálabyrjan.

<u>Nýggir ruskbilar:</u>
Í Danmark leggja flestu kommunur um til elbilar, bæði tí at tað minkar um CO2 útlátið, men eisini tí at tað er betri fyri nærumhvørvið í mun til dálking frá útláti og óljóði, umframt at tað er betri fyri tey starvsfólk, sum heinta ruskið.

Í hesum sambandi hava vit fingið eina frágreiðing frá ráðgevingarfyritøkuni Afry, sum er ein greining av møguleikanum fyri at leggja ruskinnsavningina um frá diesel til el.

Niðurstøðan er, at út frá teimum royndum, sum danskar kommunur hava gjørt, er onki, ið bendir á, at Tórshavnar kommuna ikki kann brúka eldrivnar ruskbilar í sambandi við innheinting av húsarhaldsburturkasti.

Í útbjóðingartilfarinum er ásett, at høvuðstilboðið skal verða uppá elbilar, men at tað eisini ber til at lata alternativt boð inn uppá aðrar loysnir enn elbilar.

**Viðmerking:** Útbjóðingartilfarið er ikki heilt liðugt. Tað manglar at fáa listar og nøgdir rættað, umframt at rættlesa, men tað verður alt liðugt, soleiðis at útboðið verður í hesum mánaðinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
25/03240 Leingjan av verandi sáttmála

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Er gjørt í samráð við løgfrøðing og løgdeildina.

**Skjøl**

Útbjóðingartilfarið, tað er:
25/06300-2 Útbjóðingartreytir
25/06300-3 Sáttmáli um ruskkoyring
25/06300-4 Greining av elbilum, frá Afry

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | x | | x |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | x | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin á brennistøðini mæla til, at nevndin tekur undir við útbjóðingartilfarinum, j.nr. 25/06300 skjal 2, 3 og 4, at arbeiðið verður boðið út alment, at tíðarætlanin verður sum lýst omanfyri, og at málið verður lagt fyri nevndina aftur, tá ið tilboðini eru komin inn.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 13. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
8 arbeiðstakarar hava fingið útbjóðingartilfar.

Øll, sum fingu útbjóðingartilfar, uttan ein, sum bað um útbjóðingartilfar, beint áðrenn tilboðini skuldu verða inni, fingu bjóðað at koma á kunnandi fund við umsitingina. Fýra tóku av hesum tilboði, harav tríggir sum lótu tilboð inn.

Lisitasjónin varð hildin mánadagin 4. august kl. 13:00 í ráðhúsinum, og inn komu tilboð frá trimum arbeiðstakarum, tað er:

Tilboð 1, við el ruskbilum:
- Sp/f IR Lastbilar kr. 14.320.849
- P/F Barðið kr. 18.286.468
- Landleiðin kr. 13.598.124

Tilboð 2, við diesel ruskbilum:
- Sp/f IR Lastbilar kr. 11.459.068
- Landleiðin kr. 12.987.367

Tølini eru uttan meirvirðisgjald, her rindar kommunan 6,25% í mvg.

Sambært treytunum í útbjóðingartilfarinum skulu innkomnu tilboðini vektast soleiðis:

- Kostnaður 60 %
- Lýsing av útgerð og veitingartrygd 15 %
- Góðska og tænastustøði 15 %
- Arbeiðsumhvørvi 10 %

Harumframt kann tann, sum bjóðar, eisini vísa á royndir, sum kunnu takast við í metingini av veitingartrygd, góðsku, tænastustøði og arbeiðsumstøðum hjá starvsfólki.

Tórshavnar kommuna skal gera eina heildarmeting av innlatnu tilboðunum og velja tað tilboðið, sum Tórshavnar kommuna metir vera tað besta. Tilboðini fyri el-bilar verða mett fyri seg, og alternativu tilboðini verða mett fyri seg.

Fyri elbilar kann sáttmálatíðin verða 12 ár, fyri aðra alternativa loysn kann sáttmálatíðin ikki verða longri enn 8 ár.

Ein bólkur er settur at gjøgnumganga tilboðini og at gera tilmæli til nevndina at taka støðu til.

Bólkurin hevur eftir lisitasjónina havt fund við Landleiðina fyri at fáa greiði á ymiskum spurningum, serliga um hvørjar el-bilar ætlanin er at brúka. Hjálagt er frásøgnin frá fundinum og tilfar uppá renovatiónsbilar, sum Landleiðin ætlar at keypa.

IR-Lastbilar hava sent kommununi eitt skriv, sum skal vísa munin á útláti frá renovatiónsbilum, sum nýta el og diesel, hetta er eisini hjálagt.

<u>Tilmæli frá bólkinum:</u>
Út frá ásetingunum í útbjóðingartilfarinum og innkomnu tilboðunum, hevur bólkurin gjørt dømingarskjøl fyri el-bilar og fyri diesel-bilar, har tilboðini eru útgreinað, og har tilboðini hava fingið fylgjandi karakter:

Dømingarskjal TILBOÐ 1 - Innsavning við EL bilum

| Tilboðsgevari | | Landleiðin | | IR Lastbilar | | Barðið | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Parametur | Vekting í % | Karakter 1-6 | Stig | Karakter 1-6 | Stig | Karakter 1-6 | Stig |
| | | | | | | | |
| Kostnaður | 60 | 6 | 3,6 | 4,5 | 2,7 | 0 | 0 |
| Lýsing av útgerð og veitingartrygd | 15 | 6 | 0,9 | 5 | 0,8 | 4 | 0,6 |
| Góðska og tænastastøði | 15 | 6 | 0,9 | 6 | 0,9 | 4 | 0,6 |
| Arbeiðsumhvørvi | 10 | 6 | 0,6 | 5,5 | 0,6 | 3 | 0,3 |
| | | | | | | | |
| Stig tilsamans: | | | 6 | | 4,9 | | 1,5 |

Dømingarskjal ALTERNATIV - Innsavning við diesel bilum

| Tilboðsgevari | | Landleiðin | | IR Lastbilar | | Barðið | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Parametur | Vekting í % | Karakter 1-6 | Stig | Karakter 1-6 | Stig | Karakter 1-6 | Stig |
| | | | | | | | |
| Kostnaður | 60 | 3 | 1,8 | 6 | 3,6 | | |
| Lýsing av útgerð og veitingartrygd | 15 | 6 | 0,9 | 5 | 0,8 | | |
| Góðska og tænastastøði | 15 | 6 | 0,9 | 6 | 0,9 | | |
| Arbeiðsumhvørvi | 10 | 6 | 0,6 | 5,5 | 0,6 | | |
| | | | | | | | |
| Stig tilsamans: | | | 4,2 | | 5,8 | | 0 |

Barðið hevur bert givið tilboð uppá el-bilar.

Landleiðin og IR-lastbilar hava givið tilboð uppá el-bilar og diesel-bilar. Fyri bæði Landleiðina og IR-lastbilar er tað galdandi, at einasti munurin á tilboðunum uppá el-bilar og diesel-bilar eru bilarnir, annars eru tilboðini eins.

Verandi ruskinnsavning, sum IR-Lastbilar hava í dag, kostar uml. kr. 11.850.124 um árið, uttan mvg.

Tilboðið frá sp/f Landleiðin við el-bilum er uppá kr. 13.598.124 um árið, uttan mvg, og er tað uml. kr. 1.748.000 hægri enn, hvat ruskinnsavningin kostar í dag.

Sambært útbjóðingartilfarinum skal nýggi sáttmálin byrja 1. oktober 2026.

Meirkostnaðurin fyri ruskinnsavnan við el-bilum verður so statt:

- Fyri 2026 kr. 437.000, uttan mvg.
- Fyri 2027 kr. 1.748.000, uttan mvg.

Hetta merkir, at játtanin á konto 7110 Brennistøðin má hækkast tilsvarandi fyri 2026 og frameftir, hetta er uttan indexregulering og mvg.

Út frá innkomnu tilboðunum, dømingarskjalinum og viðgerðini av málinum annars, metir bólkurin, at tað besta tilboðið uppá ruskinnsavning í Tórshavnar kommunu er tilboðið frá sp/f Landleiðin við el-bilum, sum er uppá kr. 13.598.124 um árið, uttan mvg, og mælir bólkurin til, at Tórshavnar kommuna tekur av hesum tilboði og ger 12 ára sáttmála við sp/f Landleiðin.

**Skjøl**
25/06300-22 Uppskot til nýggjar 12 ára sáttmála.
25/06300-21 Fundarfrásøgn við sp/f Landleiðin.
25/06300-20 Metingarskjal fyri diesel-bilar
25/06300-19 Metingarskjal fyri el-bilar
25/06300-18 Skriv frá IR-Lastbilar um útlát frá renovatiónsbilum el og diesel
25/06300-17 Tilfar frá Landleiðin um renovatiónsbilar
25/06300-15 og 16 Tilboð frá sp/f Landleiðin
25/06300-14 Tilboð frá Barðið
25/06300-13 Tilboð frá IR-Lastbilar

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á Umhvørvisdeildini og leiðarin á Brennistøðini mæla til:

- at nevndin tekur undir við tilmælinum frá metingarbólkinum, at gera 12 ára sáttmála við sp/f Landleiðin um ruskinnsavnan í Tórshavnar kommunu, frá 01. oktober 2026 til 30. september 2038.
- at nevndin tekur undir við uppskotinum um sáttmála millum Tórshavnar kommunu og sp/f Landleiðin, j.nr. 25/06300-22
- at meirkostnaðurin fyri nýggja sáttmálan uppá ruskinnsavningina verður tikin við í fíggjarætlanararbeiðið fyri 2026 og árini fram.
  at beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. september 2025:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Annita á Fríðriksmørk, Annfinn Brekkstein, tekur undir við tilmælinum.

Kári Johansen atkvøður ímóti.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum, men mæla til at taka av lægsta tilboðið til tess at spara sum mest av peningi fyri skattgjaldaran í Tórshavnar kommunu.

**Ískoyti:**
Eftir at tilboðini vóru latin upp, sendi IR-Lastbilar ein teldupost til kommununa til kunningar, okkara j.nr 25/06300-18. Saman við teldipostinum var ein frágreiðing frá Sp/f Rubicion v/Ben Arabo, við heitinum ”Samanbering av dieselbilum og el-bilum til koyring av ruski í Tórshavnar Kommunu”.
Hendan frágreiðing skal vísa, at tað er ivasamt, um meirkostnaðurin av el, stendur mát við tað, ið eventuelt verður vunnið í minni $CO_2$ útláti.

Í hesum sambandi hevur umsitingin gjørt notat í málið, umframt at biðja fyritøkuna Afry og Umhvørvisstovuna (Orka) um at gera viðmerkingar til skrivið frá Sp/f Rubicion.

**Skjøl:**
j.nr. 25/06300-26 Notat frá umsitingini um el- ella diesel ruskbilar
j.nr. 25/06300-27 Notat frá Orka, samanbering av dieselbilum og el
j.nr. 25/06300-28 Notat frá Afry, samanbering av dieselbilum og el

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Annfinn Brekkstein og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddi: Ongin.

Málið varð sostatt samtykt við 9 atkvøðum fyri, 4 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

| | **Býráðsfundur**<br>18. september 2025 | Blað nr.: 602 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

# 200/25 Umvæling av skrivstovunum á Brennistøðini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.09.2025 | 54/25 | 25/08179-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 148/25 | 25/08179-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 200/25 | 25/08179-1 |

**Upprunin til málið**
Hølini eru so illa slitin, at neyðugt er at seta hølini í stand skjótast til ber. Hetta skal gerast bæði fyri at fáa starvsfólk til at trívast og fyri at kunna bjóða vitjandi inn á skrivstovuna.

**Lýsing av málinum**
Talan er um ovaru hædd á bygninginum á Hjalla, har skrivstovan hjá Brennistøðini er.
Restin av bygninginum verður brúkt til Rottangabilar, umhvørvisviðgerð av bilum og hølir til Dugna.

Skrivstovuhølini eru umleið 190 fermetrar til víddar og eru innrættað til skrivstovu og køk/matstovu til øll starvsfólkini, sum arbeiða á Brennistøðini. Harafturat verða hølini brúkt til fundir, móttøku og undirvísing fyri vinnu, skúlum og øðrum.

Hølini eru illa slitin, og tað arbeiði, sum er neyðugt at gera beinanvegin, er at skifta gólválegging, umvæla trappu, vaska og mála allar veggir o.a, uppseta nýggjar loftsplátur og at útskifta verandi køk.

Alt arbeiði verður mett at kosta kr. 750.400, íroknað óvæntaðar útreiðslur og kommunalt mvg.

Biðið verður um at fáa játtaðar kr. 750.000 av løgukonto 7175 renovasjón, fyri árið 2025.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | **Býráðsfundur**<br>18. september 2025 | Blað nr.: 603<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 7175 | | Renovasjón (íløgur) | 7175 | | Umvæling av skrivstovunum á Brennistøðini | | 750.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 750.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | Verður gjørt í 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin á Brennistøðini mæla til at játta kr. 750.000 av løgukonto 7175, Renovasjón (íløgur) til at umvæla skrivstovurnar á Brennistøðini og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið sambært játtanarreglunum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt.

# 201/25 Raðfestingar á løgukonto 7175 Renovasjón - 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 10.03.2025 | 12/25 | 25/03238-2 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 31.03.2025 | 21/25 | 25/03238-2 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.09.2025 | 53/25 | 25/03238-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 147/25 | 25/03238-2 |
| 5 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 201/25 | 25/03238-2 |

**Upprunin til málið**
Málið snýr seg um raðfestingar av játtanini løgukonto 7175 Renovasjón, fyri árið 2025.

**Lýsing av málinum**

Umsitingin hevur gjørt uppskot til raðfesting av arbeiðum, sum skulu fíggjast av løgukontu 7175 í 2025. Játtanin fyri 2025 er kr. 13.000.000,00.

Í 2025 eru játtaðar íalt kr. 13 mió. Harafturat standa kr. 2.159 mió. frá 2024, sum eru játtaðar, men ikki brúktar.

Umsitingin mælir til, at játtanin verður raðfest sum lýst niðanfyri:

| | |
|---|---:|
| Útskiftan og umvælingar á Brennistøðini | 10.000.000 |
| Nýggjar bingjur | 500.000 |
| Nýggj stýriskipan | 1.800.000 |
| Moldplássið í Havn | 1.000.000 |
| Umskipa plássið á endurnýtsluni | 345.000 |
| Projekt ísv. framtíðarætlan | 1.550.000 |

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**1. Útskiftan og umvælingar á Brennistøðini**
Á vári í 2024 var Rambøll biðin um at gera eina støðulýsing av Brennistøðini.

Arbeiðssetningurin var:
- Hvat skal gerast, fyri at Brennistøðin kann koyra 10 ár afturat, fram til 31-12-2034
- Tíðarætlan fyri nær tey ymisku arbeiðini skulu gerast
- Kostnaðarmeting fyri tey arbeiði sum skulu gerast

Í oktober 2024 fingu vit eina støðulýsing (hjáløgd), sum vísir, at fyri at Brennistøðin skal koyra í 10 ár afturat, skulu útskiftingar og umvælingar o.a. gerast fyri íalt kr. 33.100.000 (uttan schreddara, sum vit hava keypt).

Tíðarætlanini vísir, at fígging eigur at verða játtað soleiðis:

| | | |
|---|---|---:|
| Í 2025 | kr. | 20.750.000 |
| Í 2026 | kr. | 8.850.000 |
| Í 2027 | kr. | 2.750.000 |
| Í 2028 | kr. | 750.000 |

Onnur viðkomandi mál er 24/07230 Støðulýsing av Brennistøðini 2024, sum hevur verið fyri í Náttúru- og Umhvørvisnevndini 2 ferðir til kunningar.

**2. Bingjur**
Ætlanin er at keypa 4-5 nýggjar bingjur.
Bingjurnar, ið vit ætla at keypa, eru 2 so nevndar spíssbingjur, hesar verða brúktar í Nólsoy, tí so kann ruskbilurin tøma tær, tá hann er í Nólsoy eina ferð um vikuna. Tvær bingjur við lúkum, tað eru bingjurnar, sum eru á plássinum hjá okkum á Hjalla, hesar bingjur eru sera nógv slitnar. Og tvær opnar bingjur til timbur, hesar verða eisini brúktar á plássinum á Hjalla.

**3. Stýriskipan**
Neyðugt er at keypa eina nýggja stýriskipan til fíggjarlig viðurskifti.
Stýriskipanin, sum vit ætla at keypa, er ein skipan, sum kann nýtast bæði til Endurnýtslu, bingjutøming og Rottangatøming.

Tað fyrsta, vit hugsa um, er Endurnýtslan, har vit kunnu taka mynd av øllum bilum, sum koyra inn á Endurnýtsluna, vit hava loyvi til at sleppa inn á akfarsskránna hjá Akstovuni, har kunnu vit síggja, hvør eigur bilin, er tað ein borgari í TK, sleppur hann ókeypis, men er tað ein vinnubilur ella borgari, ið ikki býr í TK, skulu tey gjalda.

**4. Moldplássið í Havn**
Kommunan hevur moldpláss í Húsahaga. Moldplássið liggur sunnan fyri vegin inn til Vatnverkið og afturlatið tyrvingarpláss í Villingadali.

Við tyrvingarplássið stendur ein gamal skúrur, innrættaður til skrivstovu og starvsfólkarúm, umframt ein høll til amboð. Skúrurin og høllin eru í so ringum standi, at hesi eiga at verða tikin niður og beind burtur. Tað ber ikki til at endurnýta skúrin og høllina við at flyta tey til eitt annað stað.

Nú øll tyrvingin er flutt til Kvívíkar, verður ikki meira tyrvt í Húsahaga, og tí er bert moldplássið eftir í rakstri, og tað liggur uml. 1,7 km. burtur frá verandi skúri, um koyrt verður eftir vegnum (1 km. í luftlinju).

Tað eru 2 gravimaskinur á staðnum og 2 mans arbeiða, annar á moldplássinum og hin á tyrvingarplássinum, við at avrigga plássið o.a.

Neyðugt er at seta ein nýggjan skúr upp við moldplássið, sum inniheldur skrivstovu og starvsfólkarúm. Stoypast má eitt fundament, og leiðingar mugu leggjast til skúrin.

**5. Umskipa pláss á endurnýtsluni**
Verandi endurnýtsla er lítil í mun til talið av borgarum/bilum, sum koma inn har. Serliga er tað nógv ferðsla leygardagar, tá tað koma heilt í 1.500 bilar inn. Um summarið eru tað nógv, sum koma niðan við urtagarðsburturkasti (gras, greinar o.a.), og fleiri av hesum koma við viðfestivogni.

Sum er, fyllast bingjurnar til urtagarðsburturkast rættuliga skjótt, og plássið er soleiðis innrættað, at fólk sum koma inn við viðfestivogni, mugu bakka fyri at sleppa avstað aftur, og tað duga tey illa. Tí kemur ofta proppur í, og plássið fyllist við bilum.

Fyri at bøta um hetta, er ætlanin at gera eitt nýtt pláss til urtagarðsburturkast, sum tekur nógv meira, og har bilar við viðfestivogni sleppa undan at bakka (hjálagt er tekning).

**6. Prosjekt – framtíðarætlan**
Uppskot er gjørt til framtíðarætlan fyri burturkastøkið, har m.a. partur av virkseminum á Hjalla verður flutt inn á Sund, og har ein stórur partur av økinum á Hjalla skal brúkast til endurnýtslu og endurvinning.

Mánadagin tann 24. februar 2025 var framløga fyri býráðslimum á Hotel Hafnia, har ætlanin varð løgd fram.

Næsta stig er at arbeiða víðari við hugskotsætlanini og at fáa gjørt byggiprogramm og møguliga prosjektuppskot, soleiðis at farast kann undir at gera eitt prosjekt og fáa øll loyvir upp á pláss.

Neyðugt er eisini at gera tilfar, sum kann nýtast til at kunna staðbundnu nevndina í Kaldbak og at kunna fólk sum búgva í Kaldbak.

Av tí at talan er um stórt og umfatandi arbeiði, verður neyðugt eisini at brúka ráðgevarar uttanífrá til uppgávuna.

Hjálagt er framløgan, sum varð víst tann 24. februar 2025.

**Onnur viðkomandi mál:**

24/01097 Leiga av øki á Sundi:
Mælt var til, at nevndin tekur undir við ætlanini at flyta part av virkseminum hjá Brennistøðini inn á Sund sambært uppskotinum um broytingar á endurnýtsluøkinum, jnr. 24/01098-2, og at beina málið í býráðið, umvegis Havnanevndina og fíggjarnevndina viðvíkjandi leigusáttmála og fígging til møguligt leigugjald.

- Náttúru- og umhvørvisnevndin samtykti 12/3-2024, at taka undir við tilmælinum.
- Havnanevndin samtykti 16/4-2024 at taka undir við tilmælinum og at fáa málið aftur í havnanevndina tá ið kostnaður fyriliggur.
- Fíggjarnevndin samtykti 23/4-2024 at taka undir við havnanevndini.

24/01098 Skipan av virkseminum á Hjalla og á Sundi:
Mælt var til at taka undir við uppskotinum um broytingar á burturkastøkinum sambært jnr. 24/01098-2, tá ið fígging er tøk, umframt:

- at settur verður ein stýrisbólkur og ein arbeiðsbólkur at gera uppskot til, hvussu økini á Hjalla og á Sundi kunnu nýtast, innrættast og rekast, at leggja fyri nevndina aftur, treytað av at játtan fæst, sambært jnr. 24/01451-1.
- at kostnaðurin fyri at gera/umskipa øki á Sundi og á Hjalla verður tikin við í fíggjarætlanina fyri 2025.
- Og at beina málið í býráðið, umvegis Havnanevndina og fíggjarnevndina.

Náttúru- og umhvørvisnevndin samtykti 12/3-2024, at taka undir við tilmælinum.
Málið hevur síðani verið fyri í Havnanevndini og Fíggjarnevndini, uttan at nakað er samtykt.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Sí omanfyri

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
25/03238-3 Støðulýsing frá Rambøll
25/03238-4 Tekning av plássi til urtagarðsburturkast
25/03238-5 Framløga um burturkastøkið

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. september 2025 | Blað nr.: 607 | |
| | Forkvinnunnar merki: | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin á Brennistøðini mæla til, at raðfestingar av játtanini fyri løgukonto 7175, Renovasjón, verða tiknar til eftirtektar og at íløgurnar verða at leggja fyri náttúru- og umhvørvisnevndina, fíggjarnevndina og býráðið sambært játtanarreglunum, so hvørt tørvur er á hesum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 10. mars 2025:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Annita á Fríðriksmørk, samtykti at taka raðfestingina til eftirtektar, og at málið kemur fyri aftur á næsta fundi við framløgu um stýriskipanina.

Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við málinum, fyrr enn tað fyriliggur ein nágreinilig kostnaðarmeting fyri hvørja eind sær, og ein útgreining, hvat hvør eind kostar.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 31. mars 2025:** Framløga var um stýriskipanina. Samtykt, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Biðið verður um at broyta omanfyri samtyktu raðfesting av løgukonto 7175, Renovatión (íløgur), soleiðis at játtan fæst til umvæling av verandi skrivstovuhølum.

**7. Umvæling av skrivstovuhølunum á Brennistøðini**
Hølini eru so illa slitin, at neyðugt er at seta hølini í stand skjótast til ber. Hetta skal gerast bæði fyri at fáa starvsfólk til at trívast og fyri at kunna bjóða vitjandi inn á skrivstovuna.

Hølini eru umleið 190 fermetrar til víddar og eru innrættað við skrivstovuhølum og køki/matstovu til øll starvsfólkini, sum arbeiða á Brennistøðini. Harafturat verða hølini brúkt til at kunna/undirvísa vinnuni, skúlum og øðrum.

Tað arbeiði, sum neyðugt er at gera, er nýggj gólválegging, umvæling av trappu, vaska og mála veggir o.a, uppseta nýggjar loftsplátur og at útskifta verandi køk.

Alt hetta arbeiði verður mett at kosta kr. 750.400, íroknað óvæntaðar útreiðslur og kommunalt mvg.

<u>Broytta raðfesting:</u>
Biðið verður um at broyta raðfestingina av játtanini á løgukonto 7175 renovasjón, fyri árið 2025, soleiðis:

1. Útskiftan og umvælingar á Brennistøðini kr. 9.250.000
2. Nýggjar bingjur kr. 500.000
3. Nýggj stýriskipan kr. 1.800.000
4. Moldplássið í Havn kr. 1.000.000
5. Umskipa plássið á endurnýtsluni kr. 345.000
6. Projekt ísv. framtíðarætlan kr. 1.550.000

7. Umvæling av skrivstovuhølunum á Brennistøðini kr. 750.000

Í hesi raðfesting eru kr. 750.000 fluttar av 1) Útskiftan og umvælingar á Brennistøðini, til 7) Skrivstovuhølini hjá Brennistøðini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á umhvørvisdeildini og leiðarin á brennistøðini mæla til, at broyttu raðfestingarnar av játtanini fyri løgukonto 7175, Renovasjón (íløgur), verða tiknar til eftirtektar og at íløgurnar verða at leggja fyri náttúru- og umhvørvisnevndina, fíggjarnevndina og býráðið sambært játtanarreglunum, so hvørt tørvur er á hesum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt.

# 202/25 Høvuðsumvæling av bygninginum "Steinatún"

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.09.2025 | 108/25 | 25/07379-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 143/25 | 25/07379-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 202/25 | 25/07379-1 |

**Upprunin til málið**
Vánaliga inniluftin í bygninginum í Steinatúni, hevur verði ein trupulleiki í nógv ár. Seinastu 2-4 árini er trupulleikin versnaður, tí tað er farið at leka inn ígjøgnum bæði tekju og fasadur. Starvsfólk hava gjørt vart við seg fleiri ferð. Í samráð við trygdarnevndina leggur leiðslan tí fýra mál til politiska støðutakan:

- Hetta mál; 25/07379_Høvuðsumvæling av bygninginum “Steinatún”
- Mál; 25/07477_Bráðflyting av Teknisku Fyrisiting til Sjóvinnuhúsið
- Mál; 25/07478_Flyting av KT- og Fíggjardeild
- Mál; 25/07479_Leigumál á fyrstu hædd í Steinatúni flytast

Málini hanga saman, men hava hvørt sítt tilmæli um játtan og víðari framferð.

**Lýsing av málinum**

*Bygningurin:*
Í 2013 keypti Tórshavnar Kommuna bygningin í Niels Finsens gøtu 15, frá táverandi BankNordik. Bygningurin, nú vanliga róptur “Steinatún”, var innrættaður av nýggjum til skrivstovur til kommunala fyrisiting á trimum hæddum. Í dag heldur Tekniska fyrisiting til á fjórðu og triðju hædd, og KT- og Fíggjardeildin á aðru hædd. Fyrsta hædd var í 2016 og 2017 innrættað til trý leigumál, og innandura torg.

Upprunaligi bygningurin stóð liðugur í 1958, tá P/F Føroya Banki flutti inn. Bygningurin hevur øll árini, verið nýttur sum banka- og skrivstovubygningur.

Høvuðskonstruktiónin í bygninginum er jarnbetong við faststoyptum betongflísum á útsíðunum.
Bygningurin hevur onga bjálving í útveggjunum. Á innsíðuni á útveggjunum er “skinnið” einans ein tunnur forsatsveggur t.e. pláta á timburskelett.

Trappur eru í báðum endum av bygninginum, og nøkta tí minsta kravið til rýmingarleiðir. Gamla lyftan lýkur hinvegin ikki nútíðar krøv (BK 17) um felags atkomuveg.

Bygningurin hevur ikki mekaniska luftskiftisskipan, og upprunaliga hitaskipanin er ótíðarhóskandi.

*Standurin:*
Trupulleiki av ringari inniluft er staðfestur í fleiri kanningum av luftgóðsku og arbeiðsumhvørvi annars. Í fleiri ár hava trupulleikar verið av lekum. Kanningar av ávísum bygningslutum staðfesta, at álvarsamir fylgiskaðar kunnu standast av lekunum. Vætan millum skinn og hold elvir til soppavøkstur og harvið er inniluftin ótolandi fyri starvsfólk, sum arbeiða nærhendis har tað lekur ella hevur likið inn.

Virksemið á fyrstu hædd gevur nógvan hita frá sær, og tí hevur serliga onnur hædd havt trupulleikar av alt ov høgum hita. Á triðju hædd er vætan í luftini alt ov høg, og á fjórðu hædd (loftshæddin) er trupult at regulera hita og kulda, alt eftir um tað er summar ella vetur. Samanumtikið er luftgóðskan ring, ikki minst tí at bygningurin er ov trongur til talið av starvsfólkum.

Í fleiri umførum eru smærri umvælingar gjørdar. Í 2022 vórðu fimm stór vindeygu skift á fyrstu hædd. Í 2024 og 2025 varð hol sett á forsatsveggir á triðju hædd. Staðfest var, at rennistokkar og sjálv kopartakrennan lekur í støðum. Blikksmiðurin, sum umvældi takrennuna, gjørdi hetta við tjøru, tí ikki bar til at lodda í verandi kopar, tí hetta er tunt og slitið við microholum í.

Í juli mánaði 2025 var Teknologisk Institut í bygninginum og gjørdi fleiri "destruktivar" kanningar av bygningslutum og arbeiðs- og inni umhvørvinum annars. Kanningin staðfestir at tað generelt er funnið "vækst af skimmelsvampe". Kanningin mælir til at *"Medarbejdere der oplever gener, bør få lavet en individuel lægefaglig vurdering af sammenhængen med den registrerede skimmelsvampevækst. Indtil der foreligger en afklaring bør medarbejdere med gener ikke have længerevarende ophold i bygningen".*

Kanningin mælir til at tryggja klimaskermin og síðani at útføra eina *"skimmelrenovering"* Eisini verður mælt til *"en grundig gennemgang af varmeanlægget, da der er tegn på at der er problemer med høje temperaturer i bygningen"*

Í juli 2025 sendi Trygdarnevndin fyri fyrisitingina út spurnarblað um sjúkueyðkenni. Spurnarblaðið varð sent til starvsfólk á aðru, triðju og fjórðu hædd. Umleið 80 % av starvsfólkunum svaraðu spurnarblaðnum. Deildin fyri almanna heilsu fer at greina tølini nærri. Pál Weihe luttók á kunningarfundi hin 26.08.2025 og vísti í hesum sambandi til omanfyri nevndu kanningar.

*Høvuðsmvæling*
Útsíður og tekjan eru í so mikið ringum standi, at neyðugt er at høvuðsumvæla "klimaskermin" t.e. alt uttara skalið. Væntandi skal kopartekjan skiftast og rennistokkar staðsetast uttaná fasaduna. Vindeygu og úthurðar við inndekningum mugu skiftast og gerast av nýggjum. Støða má takast til um flísafasadan skal varðveitast og umvælast í verandi ella broyttum líki.

Í mun til innrætting, atkomuviðurskifti og tekniskar installatiónir eigur hetta at lagast til eina ávísa nýtslu, soleiðis at hóskandi loysnir verða valdar. Nýggj lyfta eigur at verða gjørd, sum í minsta lagið lýkur krøvini til felags atkomuveg, umhugsast skal um lyftan eisini eigur at rúma eini ambulansubøru.

Tað er umráðandi at fyrireika høvuðsumvælingina væl og virðiliga.

Mælt verður til at gera skipanaruppskot, sum tekur støðu til framtíðar nýtslu og innrætting í bygninginum. Uppskotið eigur at taka útgangsstøði í "Urtagarðsbýnum", sum er heildarætlan, ið Býarskipanardeildin læt gera í 2022.

Samstundis kann nýggi klimaskermurin detailprosjekterast. Høvuðsumvæling av klima-skerminum kann møguliga bjóðast út fyri seg.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- Mál; 25/07477_Bráðflyting av Teknisku Fyrisiting til Sjóvinnuhúsið
- Mál; 25/07478_Flyting av KT- og Fíggjardeild
- Mál; 25/07479_Leigumál á fyrstu hædd í Steinatúni flytast

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

| **Býráðsfundur**<br>18. september 2025 | Blað nr.: 611<br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|

**Skjøl**
25/07379-3 Tíðarætlan
25/07379-2 Kanning frá Teknologisk Institutt

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

Víst verður til leysliga kostnaðarmeting fyri samlaðu verkætlanin. Stór óvissa er tengd at verkætlanini, tí enn er ógreitt, hvat bygningurin fer at verða nýttur til. Eingin løgukarmur er fyri hetta í 2025.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | | | | | Høvuðsumvæling av bygninginum Steinatún | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | Mettur kostnaður umleið kr. 54 mió. |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 / 2029 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Møgulig sparing |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla byggi- og býarskipanarnevndini til at stovna sjálvstøðuga verkætlan nevnd "Høvuðsumvæling av bygninginum Steinatún", sum verður at fíggja av løgukarmi fyri 2026, og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. september 2025:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Bergur Robert Dam Jensen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Birgir Nielsen og Kári Johansen, tekur undir við tilmælinum við tí broyting, at hetta verður fíggjað av meirinntøkunum í 2025.

**Ískoyti**

Fyri at seta ferð á arbeiðið, at fáa fyrireikað høvuðsumvælingina av bygninginum í Steinatúni er neyðugt, umframt at stovna verkætlanina “Høvuðsumvæling av bygninginum Steinatún”, eisini at peningur verður játtaður til hesa verkætlan til fyrireiking og projektering. Ásannandi, at slíkt arbeiði kann verða umfatandi er tað trupult at áseta neyva meting av neyðugari játtan. Mælt verður til at gera skipanaruppskot, sum tekur støðu til framtíðar nýtslu av bygninginum  og fara undir at detail prosjektering av klimaskerminum. Mett, at neyðugt er við 4 mió kr. til at arbeiða við hesum í fyrstu atløgu.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | | | | | Høvuðsumvæling av bygningi Steinatún | 4.000.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | Uml. 54 mió kr. |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025/2029 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Ikki kent enn |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla fíggjarnevndini til at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini. Harumframt at játta kr. 4 mió. kr. til verkætlan, sum verður at fíggja av meirinntøkum fyri 2024 og at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum við tí broyting, at ein bygginevnd verður sett eftir vanligum leisti, og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum í fyrstu syftu.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini:

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála

Ímóti atkvøddi: Ongin

Blankt atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen

Málið varð sostatt samtykt við 8 atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og 5 blonkum atkvøðum.

## 203/25 Góðselevatorar á Bacalao og í Sjóvinnuhúsinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 02.09.2025 | 33/25 | 25/08024-23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 151/25 | 25/08024-23 |
| 3 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 203/25 | 25/08024-23 |

**Upprunin til málið**
Støðan viðv. góðselevatorunum á Bacalao og í Sjóvinnuhúsinum.

**Lýsing av málinum**
Góðselevatorarnir í Sjóvinnuhúsinum og Bacalao eru helst líka gamlir sum bygningarnir, t.v.s. áleið 60 ár (+/-), og eru nú í so ringum standi, at teir hava mist góðkenningina frá myndugleikanum og eru tí óvirknir. Tað eru gjørdar fleiri kanningar av støðuni og royndir at feilfinna og umvæla, men bæði strukturelli og eltekniski parturin er í so ringum standi, at tað ikki ber til at umvæla longur. Neyðugt verður tí at útskifta góðselevatorarnar til aðrar nýggjar elevatorar, um bygningarnir skulu hava góðselevatorar framyvir.
Tórshavnar havn hevur í mars 2025 heitt á tvær elevatorfyritøkur (KONE Elevator ávíkavist El-net saman við PD Elevator) um at kanna viðurskiftini nærri og koma við uppskotum og tilboðum upp á at útskifta og/ella albøta báðar góðselevatorarnar. Bæði feløgini mæla til at útskifta heldur enn at albøta, tí ein albøting kann væntast at kosta nærum líka nógv sum at útskifta.

Tilboðið frá KONE Elevator er áljóðandi 1,2 mió. kr. fyri góðselevator til Bacalao, og 1,1 mió. kr. fyri góðselevator til Sjóvinnuhúsið. Íroknað tilboðini er niðurtøku av gomlu elvatorunum.

Tilboðið frá EL-Net / PD Elevator er 1,025 mió. kr. fyri góðselevator til Bacalao og 0,954 mió. kr. fyri góðselevator til Sjóvinnuhúsið. Íroknað tilboðini er niðurtøka av gomlu elevatorunum, sum er príssett til 154 tkr fyri hvønn elevator.

Fyri at fáa tilgongdina at fáa nýggjar elevatorar at ganga so skjótt sum gjørligt, hevur Tórshavnar havn longu tikið av tí partinum av tilboðnum frá PD Elevator, sum er at taka gomlu elevatorarnar niður. Niðurtøkan, ið kostar 308 tkr., verður fíggjað av rakstrarjáttanini ha Tórshavnar havn og verður væntandi liðugt ultimo oktober 2025.
Tá ið teir gomlu elevatorarnir eru tiknir niður, kunnu endalig mát takast, áðrenn framleiðslan kann fara í gongd. Framleiðslutíðin er 10-12 vikur, og uppsetingartíðin 3 vikur fyri hvønn elevator.
Galdandi myndugleikakrøv áseta krøv til at grøvin undir elevatorunum skal vera minst 1,3 m djúp (til trygdarrúm), og tískil verður neyðugt at dýpa gravirnar umleið 0,35 m og stoypa nýggjn botn og veggir undir elevatorunum. Eisini verður neyðugt við nýggjum el-heysiportri frammanfyri elevatorin á Bacalao, nýggjum elveitingum og møguliga ventilatión í elevatorskaktunum. Hesi arbeiðið eru mett til umleið 0,3 mió kr í alt.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>18. september 2025 | Blað nr.: 614 |
| | | Forkvinnunnar merki: |

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
J.Nr. 25/08024-19 : Tilboð frá El-net / PD Elevator upp á góðselevatorar

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læittar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til at taka av tilboðnum frá El-net / PD Elevator upp á nýggjar góðselevatorar til Bacalao og Sjóvinnuhúsið; at játtaðar verða 2,0 mió av íløgukarminum P00 hjá Tórshavnar havn til arbeiðið, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 02. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt.

# 204/25 Havnarøkið á Oyrareingjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 11.02.2025 | 8/25 | 25/02865-1 |
| 2 Havnanevndin | 02.09.2025 | 34/25 | 25/02865-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 150/25 | 25/02865-1 |
| 4 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 204/25 | 25/02865-1 |

**Upprunin til málið**
Formaðurin hevur biðið um at fáa málið á skrá til umrøðu.

**Lýsing av málinum**
Ovari partur av havnarøkinum á Oyrareingjum er ongantíð gjørt liðugt. Tað sum manglar at verða gjørt, áðrenn økið kann nýtast til nakað skipað virksemi ella bygging, er

- Uml. 60 m av verjugarði á eystaru síðu, frá fjøruni og út til verandi havnaøki.
- Uppfylling og planering. Til tað skulu nýtast umleið 15-18.000 m³ av gróti.
- Avvatning av økinum, herundir rennu framvið ovara (sunnaru) síðu, og leiðingar tvørtur um økið, til áir og løkir, ið seta inn á økið.
- Aðrar tekniskar innleggingar, t.d. kloakk, vatn, el og gøtuljós.
- Vegur frá verandi innkoyring og inn gjøgnum økið.

Tórshavnar havn hevur gjørt eitt uppskot um hvussu økið kann skipast, herundir hvussu økið kann fyllast upp og planerast, og hvussu vegur kann leggjast gjøgnum økið. Kostnaðurin fyri uppfylling, planering og avvatning verður mettur til umleið 8 mió.kr. Tá er vegur, aðrar tekniskar innleggingar, og asfaltering av økinum ikki íroknað.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Tekning av økinum.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn kunnar um málið.

**Havnanevndin 11. februar 2025:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Sum nevnt í málslýsingini, skulu nýtast umleið 15-18.000 m³ av gróti til at fylla upp økið á Oyrareingjum. Tórshavnar havn hevur gjørt avtalu við Landsverk um at taka ímóti upp til 25.000 fm3 av avlopsgróti frá eini verkætlan á Hamaranum á Argjum, tó treytað av, at lendisarbeiðstakarin ikki fær brúkt grótið sjálvur. Avlopsgrótið verður væntandi tøkt í heyst og verður í fyrstu atløgu lagt á goymslu í grótbrotinum á Glyvursnesi, men hugsanin er, at hetta grótið er vælegnað til verkætlanina á Oyrareingjum.

Sum greitt frá á fundi í havnanevndini 11. februar 2025, hevur Tórshavnar havn gjørt skitsuætlan fyri liðugtgerð av havna- og vinnuøkinum á Oyrareingjum, men verkætlanin er tó ikki liðugt projekterað. Skitsusætlanin er gjørd saman við LBF, ið hevur gjørt uppmátingar, kanningar og nakrar tekningar. Hetta arbeiðið hevur higartil kostað uml. 85 tkr.

Býráðið samtykti 24. oktober 2024 at játta 1,0 mió til at taka ímóti gróti á vinnu- og havnaøkinum á Oyrarengjum, frá eini privatari verkætlan á Hamarinum á Argjum (j.nr. 24/07950-4). Arbeiðið er liðugt og eftir av játtanini eru 429.000 tkr.

Skotið verður tí upp, at avlopið á hesi játtan verður nýtt til at projektera verkætlanina og gera útbjóðingartilfar. Projekteringarbeiðið, ið eftir er at gera fram til útboð, metir LBF kostar um 250-300 tkr. Harumframt kemur nakað av ráðgeving í.s.v. eitt møguligt útboð.

**Tilmæli**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til, at gera avtalu við LBF um at projektera verkætlanina lidna, herundir gera útbjóðingartilfar; at játta tær 429.000 tkr, ið lupu av á játtanini til móttøku av gróti frá Hamarinum á Argjum, til projektering og ráðgeving; og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 02. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Blankt atkvøddi: Ongin.

Málið varð sostatt samtykt við 10 atkvøðum fyri, 3 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

| | Býráðsfundur<br>18. september 2025 | Blað nr.: 618<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

## 205/25 Matr.nr. 4a, Sund. Leigusáttmálið TK. vegna Skótalið KFUM,s. Øki til skýli til skótarnar.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 153/25 | 25/08184-6 |
| 2 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 205/25 | 25/08184-6 |

**Upprunin til málið.** Skótalið KFUM,s, hevur ætlanir um at seta eitt skýli upp í Sundshaganum og hevur søkt kommununa um byggiloyvi til skýlið.

**Lýsing av málinum**

Skótalið KFUM,s, hevur ætlanir um at seta eitt skýli sum er til víddar uml. 7 fermetrar upp í Sundshaganum og hevur søkt kommununa um byggiloyvi til skýlið. Sí mál 25/01574

Byggimálsdeildin hevur viðbjørt umsóknina, sum er játtað, millum annað við treytum um, at leigusáttmáli fyriliggur, og hevur Friðingarnevndin fyri streymoyar sýslu, eisini játtað umsóknini.

Festarar hava givið sítt samtykki, og vil Búnaðarstovan eisini gera leigusáttmála uppá undirlendið. Fyri at sleppa undan at kravi um matrikulering av hesum uml. 10 fermetrunum, er ætlanin í fyrsta umfari at avgreiða ein styttri leigusáttmála uppá 9 ár, men kann leigumálið eftir umsókn leingjast, um so er at skótarnir hava ynski um at halda fram við leigumálinum.

Búnaðarstovan krevur at kommunan stendur fyri leigumálinum, og verður síðani ein brúksavtala gjørd, millum TK, sum stendur fyri leigumálinum, og KFUM, sum staðsetir skýli á leigaðum lendi.

Fyri leigusáttmálan við Búnaðarstovuna, rindar kr. 1.000 fyri avgreiðslu og kr. 500 árliga, so leingi sum leigusáttmálin er í gildið.

**Lógir, ásetingar o.a.** Sáttmálin vísir til § 7, í logtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2007 um landsjørð.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd   Ja ☐   Nei ☒**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>18. september 2025 | Blað nr.: 619<br><br>Forkvinnunnar merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 1.000 kr. |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 01.09 -2025 til 01.09.2034 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Kommunustjórin mælir býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at leiga lendið frá Búnaðarstovuni, og til at veita Skóðaliðið KFUM,s, eina brúksavtalu sum er galdandi so leingi sum leigumálið er galdandi.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt.

# 206/25 Matr.nr. 91v, Kollafjørður. Umsókn um loyvi til víðarisølu.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 152/25 | 25/07278-2 |
| 2 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 206/25 | 25/07278-2 |

**Upprunin til málið**
Eigari av matr.nr. 91v, Kollafjørður, hevur hin 15.07.2025, sent kommununi umsókn um loyvi til víðarisølu av grundstykkinum.

**Lýsing av málinum**
Talan er um óbygt grundstykki. Matr.nr. 91v, Kollafjørður. Vídd 640 m².

Verandi eigari hevur keypt stykkið í friðari sølu fyri 410.000,00 Skeytið er tinglýst 13.11.2020.

Stykkið liggur framvegis óplanerað. Kommunan hevur rykt uppá byggifreist.

Talan er um eitt grundstykkið sum varð tinglýst til fyrsta eigaran hin 17.01.2019

Uppruna keypsprísur var kr. 300.806,40

Táverandi eigari lat stykkið innaftur til kommununa fyri somu upphædd sum viðkomandi hevði keypt stykkið fyri.

Sambært málslýsing j.nr. 17/03619, og samtykt frá fíggjarnevndar fundi 20.05.2020, framgongur, at Snarskivan hevði í tveimum umførum útlutað stykkir í útstykkingini so hvørt sum grundstykkir vóru komin innaftur. Hetta varð gjørt á tann hátt , at tey sum ikki fingu tillutað grundstykkir í fyrsta umfari, fingu møguleika til at verða við í nýggjari útlutan. Øll sum teknaðu seg til upprunaligu útlutanina, hava fingið grundstykkið í boðið.

Visandi til at kommunan hevði verið ígjøgnum upprunaliga bíðilistan, samtykti fíggjarnevndin, at fylgja tilmælinum frá umsitingini, um at keypa stykkið aftur fyri kr. 300.806,40 og at lýsa stykkið aftur til sølu í fríðari sølu hjá Ognarmeklara.

Stykkið lá alment til til sølu í fríðari sølu hjá BetriHeim, fyri ásettan minstaprís áljóðandi kr. 300.806,40

Hin 18.09.2020, boðaði BetriHeim frá, at boð var komið kr. 410.000,00, og at onki mótboð var.

Býráðið samtykti hin 29.10.2020, at selja stykkið til hægsta boð fyri kr. 410.000,00

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin. Reglugerð fyri útlutan av grundøkjum til sethús. Servituttir í skeyti.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>18. september 2025 | Blað nr.: 621<br><br>Forkvinnunnar merki: |

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl :** Kortskjal. Umsókn frá eigara.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | x | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:** Kommunustjórin mælir býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at loyva víðarisølu av grundstykkinum, vísandi til at stykkið er selt í fríðari sølu. Víðarisølu skeytið skal vísa til verandi tinglýstar servituttir við átalurætti til Tórshavnar kommunu.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt.

# 207/25 Áheitan at strika servitutt á matr. nr. 1470dr, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.09.2025 | 119/25 | 25/04319-4 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 154/25 | 25/04319-4 |
| 3 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 207/25 | 25/04319-4 |

**Upprunin til málið**
Umsókn um at strika servitutt um víðarisølu á matr. nr. 1470dr, Tórshavn.

**Lýsing av málinum**
Eigarin fekk ognina matr. nr. 1470dr, Tórshavn, frá foreldrunum í tinglýstum gávubrævi tann 15. mars 2010.

Talan er um eitt óbygt grundstykki. Vídd 613 $m^2$.

Foreldur eigarans fingu matr. nr. 1470dr, Tórshavn, frá Tórshavnar kommunu í 1984. Hetta var partur av einum endurgjaldi, av tí at kommunan áður hevði ognartikið burturav táverandi ogn teirra matr. nr. 1393, Tórshavn. (*Vísast skal til grein 2 í upprunaliga skeytinum*)

Sum endurgjald fingu tey grundstykkið í útstykkingini við Ternurygg, við ávísum treytum um byggiskyldu, víðari sølu og nýtslu sum heild.

**Lógir, ásetingar o.a.**
***Grein 2 í upprunaskeytinum***
Avhendingin er lið í sáttmála, dagfestur 11. desember 1979, um endurgjald kommununnar í sambandi við ognartøku burturav táverandi ogn keyparans, matr. nr. 1393, Tórshavn.

***Grein 4 í upprunaskeytinum***
Innan 2 ár, frá tí, at endaligt skeyti er tinglýst, skulu sethús vera bygd á stykkinum. Annars fellur stykkið aftur til seljarans, móti at keyparin fær keypspeningin og tað, hann hevur goldið fyri byggibúning, afturgoldið uttan rentur. Fellur stykkið aftur av hesi orsøk, og keyparin hevur byrjað bygging, kann hann fáa prógvaðar útreiðslur endurgoldnar í tann mun, tað gjørda arbeiðið kemur seljaranum ella øðrum keypara av sama stykki til góðar.

***Grein 5 í upprunaskeytinum***
Keyparin hevur ikki loyvi til – uttan til lívsarving – at lata ella selja stykkið víðari, uttan at sethús eru bygd á stykkinum.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Býráðið hevur í einari líknandi avgerð, dagfest tann 31. oktober 2013, valt at strika servitutt um víðarisølu, har ið ein borgari fekk eitt grundstykki frá kommununi, sum part av einum makaskifti.

Í avgerðini frá 31. oktober 2013 var talan um strikan av servituttum á matr. nr. 1fk, Hoyvík. Hetta stykkið var í síni tíð latið pápa umsøkjarans í sambandi við ognartøku av táverandi matr. nr. 693b til skúlabygging. Gamla skeytið í sambandi við makaskifti hevði ongar bindingar. Av tí at gamla stykkið ikki hevði nakrar bindingar, valdi býráðið í sambandi við matr. nr. 1fk, Hoyvík at strika servituttarnar um bygging og víðarisølu.

Í verandi máli vísir eigarin á, at táverandi ognin hjá foreldrunum matr. nr. 1393, Tórshavn, ikki hevði líknandi bindingar um víðarisølu. Eigarin vísir eisini á, at hann ikki hevur nakran lívsarving.

Gerast skal vart við, at talan er um eitt óbygt grundstykki, har grein 4 í skeytinum áleggur byggiskyldu, við teirri avleiðing at stykkið fellur aftur til kommununa, um skyldan ikki verður hildin. Grein 5 ásetur, at víðarisøla bert er loyvd, um sethús eru bygd á stykkinum, uttan so at talan er um lívsarvingar.

Grundstykkið er framvegis óbygt.

Skal grein 5 um víðarisølu strikast, má eisini grein 4 um byggiskyldu strikast, av tí at báðar ásetingarnar eru tengdar saman.

Hesar ásetingar eru vanligir servituttar, ætlaðai at fremja bygging á kommunalum útstykkingum.

Tá upprunaliga ognin hjá eigarunum ikki var bundin av byggiskyldu ella avmarkingum í sambandi við víðarisølu, er heldur eingin saklig grundgeving fyri at varðveita ásetingarnar í grein 4 og 5.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
2003-1149 “*Áheitan um at strika servituttir nr. 4 og 5 á matr. nr. 1fk, Hoyvík*”

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
2003-1149/22 “*Býráðið 31.10.13*”
25/04319-1 “*Áheitan at strika servitutt á matr. nr. 1470dr, Tórshavn*”
25/04319-2 “*Skeyti 1470dr, Torshavn*”

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina og byggi- og býarskipanarnevndina at strika tinglýsta servituttin um bygging og víðarisølu, vísandi til at kommunan hevur strikað líknandi servituttar í málum, har ið kommunan hevur ognartikið /makaskift við borgarar, har upprunalendi hjá borgaranum ikki hevði nakrar ásetingar um bygging ella víðarisølu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt.

# 208/25 Fíggjarætlan 2026, Tórshavnar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 129/25 | 25/06020-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.09.2025 | 163/25 | 25/06020-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 208/25 | 25/06020-1 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober. Býráðið skal síðan viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Hetta er ein sokallað teknisk framskriving av fíggjarætlanini 2025, sum er fyrsta stigið í sambandi við fyrireikingarnar og planleggingina av fíggjarætlanini 2026 hjá Tórshavnar Kommunu.

**Lýsing av málinum**
Tekniska framskrivingin av fíggjarætlanini 2025 er grundað á ta vitan og teir upplýsingar, ið eru tøkir í løtuni, og tekniska framskrivingin kann býtast upp í hesar tríggjar høvuðspartar:

1. Frakskriving av kommunuskattinum og skattinum av eftirlønargjøldunum.
2. Framskriving av rakstrarútreiðslunum.
3. Virksemisbroytingar eftir 1. desember 2024, tá fíggjarætlanin fyri 2025 varð samtykt.

**Ad. 1: Framskriving av kommunskattinum og skattinum av eftirlønargjøldum**
Búskaparráðið metir í várfrágreiðing sínari, frá apríl 2025, at føroyska bruttotjóðarúrtøkan, BTÚ, fer at vaksa 5,5% í ársins prísum í 2026. Í játtanarkørmunum hjá landinum, eisini frá apríl í ár, verða landsskattainntøkurnar framskrivaðar við 4,5% í 2026.

Eftir at Búskaparráðið gjørdi sínar metingar til várfrágreiðingina eru útlitini hjá alivinnuni versnaði. Søluprísurin er farin niður um framleiðslukostnaðin, samstundis sum tøkan og útboðið av laksi á altjóða marknaðinum veksur. Í aðrar mátar valdar stór óvissa viðvíkjandi øllum búskaparligum forsøgnum, soleiðis sum støðan er í heiminum í løtuni.

Varisliga verður tí mett, at kommunuskatturin fer at vaksa 3,5% í 2026 samanborið við FÆ-2025.

Hetta er við óbroyttum skattaprosentið á 19% og óbroyttum barnafrádrátti á 9.000 kr.

Viðvíkjandi skattinum av eftirlønargjøldum, so metir Kommunufelagið, at skatturin av eftirlønargjøldum verður millum 5 og 10%, helst nærri 10%, hægri í 2026 enn í 2025. Varisliga verður tí mett, at skatturin av eftirlønargjøldum verður 5% hægri í 2026 samanborið við FÆ-2025.

**Ad 2: Framskriving av rakstrarútreiðslum**
Samlaðu rakstrarútreiðslurnar eru býttar sundur í lønir og rakstrarútreiðslur annars. Tað eru bert lønarútreiðslurnar av samlaðu rakstrarútreiðslunum, sum eru framskrivaðar í hesi fyrstu teknisku framskrivingini hjá kommununi. Lønirnar eru framskrivaðar við 3,25% frá FÆ-2025 til FÆ-2026. Hetta er sama framskriving av lønunum sum í játtanarkørmunum hjá landinum frá apríl í ár.

**Ad. 3: Virksemisbroytingar**
Virksemisbroytingarnar snúgva seg um lógarbroytingar og býráðssamtyktir eftir at fíggjarætlanin fyri 2025 varð samtykt umframt avleiddar broytingar í rakstrinum frá avhendaðum íløgum. Samanlagt kosta virksemisbroytingarnar, eftir at fíggjarætlanin fyri 2025 var samtykt, 17.187 t.kr. Størstu

virksemisbroytingarnar stava frá øktum virksemi undir § 6, Teknisk mál, og hetta er serliga av nógv øktum avleiddum rakstrar virksemi, nú nýggi innkomuvegurin við íbindingum verður liðugur. Næst størsta virksemisbroytingin er á § 3, Børn og ung, 2.880 t.kr., og kemst hon av, at foreldragjaldið á dagstovnum varð lækkað úr 27% niður á 25% tíðliga í ár. Harumframt hava lógarreguleringar havt við sær fleiri rakstrarútreiðslur við sær á fólkaskúlaøkinum.

**Mett úrslit av rakstrinum í 2026 eftir tekniskar framskrivingar**
Í hesi fyrstu teknisku framskrivingini av FÆ-2025, sum er fyrsta grundarlagið undir fíggjarætlanini 2026 vaksa inntøkurnar 3,51% og rakstrarútreiðslurnar 4,02%. Í hesi fyrstu teknisku framskrivingini vaksa rakstrarútreiðslurnar sostatt meira enn mettu inntøkurnar. Tórshavnar Kommuna hevur vanliga sett sær sum innanhýsis mál, at rakstrarútreiðslurnar skulu vaksa minni enn mettu inntøkurnar.

Í hesi teknisku framskrivingini eru 245.187 t.kr. eftir til skattafíggjaðar íløgur í 2026, tá ið Tórshavnar Havn er tikin burtur úr framskrivingini.

**Skjøl**
-Tíðarætlan Fíggjarætlan 2026
-Teknisk framskriving av FÆ-2025

**Tilmæli**
Kunnað verður um málið.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Fyrsta tekniska framskrivingin av rakstrinum til fíggjarætlanina 2026 varð løgd fyri fíggjarnevndina til kunningar tann 12. mai 2025. Síðan tá hevur umsitingin dagført búskaparmetingina og gjørt metingarnar neyvari við nýggjastu tølunum, sum eru tøk í løtuni. Nýggj inntøkumeting er gjørd. Lønarlistar umframt yvirlit yvir nýtt samtykt virksemi og lógarbroytingar eru dagførdar.

Sí talvuna niðanfyri til fíggjarætlan 2026.

| 1.000 kr. | | Roknskapur 2024 | Ætlan 2024 | Ætlan 2025 | Ætlan 2026 | Broyting 2025/2026 pct. | kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 1.090.759 | 1.011.886 | 1.099.983 | 1.143.982 | 4,00% | 43.999 |
| 20601 | Felagsskattur | 74.695 | 58.000 | 58.000 | 58.000 | 0,00% | 0 |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 1.079 | 1.000 | 1.000 | 2.000 | 100,0% | 1.000 |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 220.513 | 209.753 | 231.376 | 265.000 | 14,5% | 33.624 |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 36.298 | 35.704 | 35.322 | 34.000 | -3,7% | -1.322 |
| 20804 | Kommunanna partur av Veiðigjaldi | 981 | 0 | 800 | 800 | 0,0% | 0 |
| 20805 | Kommunanna partur av Tøkugjaldi | 265 | 0 | 200 | 200 | 0,0% | 0 |
| | **Inntøkur íalt** | **1.424.591** | **1.316.343** | **1.426.681** | **1.503.982** | **5,4%** | **77.301** |
| **Rakstur** | | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 102.133 | 100.713 | 106.920 | 112.784 | 5,5% | 5.864 |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 334.724 | 321.960 | 354.202 | 369.086 | 4,2% | 14.884 |
| §3 | Børn og ung | 252.718 | 235.494 | 256.354 | 272.073 | 6,1% | 15.719 |
| §4 | Undirvísing | 56.784 | 56.538 | 57.753 | 62.466 | 8,2% | 4.713 |
| §5 | Mentan og frítíð | 79.324 | 70.350 | 81.001 | 83.036 | 2,5% | 2.035 |
| §6 | Teknisk mál | 164.446 | 156.688 | 167.051 | 174.969 | 4,7% | 7.918 |
| §7 | Kommunal virkir TK | 104.053 | 90.983 | 102.084 | 105.619 | 3,5% | 3.535 |
| | **Rakstur íalt uttan TH** | **1.094.182** | **1.032.726** | **1.125.365** | **1.180.033** | **4,9%** | **54.668** |
| §7 | Kommunal virkir TH | -36.939 | -36.939 | -36.985 | -37.975 | 2,7% | -990 |
| | **Rakstur íalt** | **1.057.243** | **995.787** | **1.088.380** | **1.142.058** | **4,9%** | **53.678** |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 34.039 | 30.000 | 30.000 | 30.000 | 0,0% | 0 |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 2.140 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | 0 |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **36.178** | **32.000** | **32.000** | **32.000** | **0,0%** | **0** |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **331.169** | **288.556** | **306.301** | **329.925** | **7,7%** | **23.623** |
| **Rentur** | | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 6.141 | 13.217 | 10.962 | 8.867 | -19,1% | -2.095 |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | 5.043 | 5.037 | 7.250 | 43,9% | 2.213 |
| 20401 | Rentuinntøkur TK | 590 | 0 | 0 | 0 | 0,0% | 0 |
| 20401 | Rentuinntøkur TH | | 0 | 0 | 0 | 0,0% | |
| | **Rentur íalt** | **5.551** | **18.260** | **15.999** | **16.117** | **0,7%** | **118** |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **325.618** | **270.296** | **290.303** | **313.808** | **8,1%** | **23.505** |
| | **Avdráttir TK** | **15.900** | **23.033** | **22.733** | **20.003** | -12,0% | -2.730 |
| | **Avdráttir TH** | **14.484** | **15.873** | **15.874** | **15.873** | 0,0% | -1 |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **295.234** | **231.390** | **251.696** | **277.932** | **10,4%** | **26.236** |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **272.779** | **215.367** | **235.622** | **263.080** | **11,7%** | **27.458** |

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2026 er roknað við, at kommunuskattaprosentið er 19,00% og barnafrádrátturin er 9.000 kr., ið er tað sama sum í dag. Høvuðstølini í talvuni eru býtt á kommunugreinar.

Niðanfyri er greitt nærri frá grundarlagnum og fortreytunum fyri dagførdu framrokningunum.

**Dagførd meting av búskapargongdini**
Høvuðsniðurstøðunar í nýggjstu frágrieðingini hjá Búskaparráðnum, sum varð løgd fram tann 1. september, eru størt sæð tær somu sum í várfrágreiðingini. Búskaparráðið metir nú, at vøksturini í BTÚ í árligum prísum verður nakað størri í 2026 enn mett var í várfrágreiðingini, men tað kemst av, at Búskaparráðið hevur niðurskrivað metingina fyri vøksturin í 2025, tí laksaprísirnir eru lækkaðir meira enn væntað í ár. Tí verður metingin fyri búskaparvøksturin í leypandi prísum frá 2025 til 2026 tað størri.

Altjóða óvissan er framvegis stór, men renturnar eru lækkaðar og tað eru ikki útlit fyri, at rentunrnar hækka aftur í nærmastu framtíð. Tí er reallønin vaksin og útlit eru fyri størri vøkstri frameftir.

Gongdin og samansetingin av fólkatalinum í kommununi hevur grundleggjandi týdning fyri, hvussu kommunan skal útbyggjast og mennast frameftir.

Eingin dagførd fólkatalsframskriving er tøk í løtuni, men kommunan hevur gjørt eina meting av fólkatalinum fram til 2030. Metingin er lýst niðanfyri og eigur sjálvandi at vera tikin við neyðugum fyrivarni.

Tilflytingin til suðurstreymoyar øki hevur ligið um 150 persónar um árið tey seinastu 10 árini, men í fjør fluttu bert 48 persónar til suðurstreymoyar øki. Um tilflytingin fer at koma upp aftur á 150 og føðitíttleikin kemur upp aftur á 2,1, so væntar Búskaparráðið, at fólkatalið í Tórshavnar kommunu fer at vaksa stútt fram til 2030, tá ið tað væntandi fara at vera umleið 24.500 borgarar í Tórshavnar kommunu.

Um hugt verður nærri eftir fólkasamansetingini, so fer talið av børnum í barnagarðsaldri og í fólkaskúlunum at verða rættiliga støðugt í Tórshavnar kommunu frá 2026 og fram til 2030. Í mun til restina av landinum, so fer talið av teimum 25-44 ára gomlum at vaksa í Tórshavnar kommunu. Talið av pensjónistum fer at vaksa skjótari og fyrt tey, sum eru omanfyri 80 ár, fer talið at vaksa enn skjótari.

At talið av teimum eldru fer at vaksa lutfalsliga meira enn fólkatalið annars er ikki ein óvæntað niðurstøða í hesi framskrivingini hjá Búskaparráðnum. Í flestu londum verður sagt tað sama. Tað fara at verða lutfalsliga fleiri eldri samanborið við tey yngru komandi árini.

**Dagførd inntøkumeting**
Inntøkumetingin er dagførd við teimum upplýsingum og fortreytum, sum vórðu galdani í september 2025.

*Kommunuskattur*
Við støði í teimum upplýsingum og tí vitan, sum var tøk í september 2025, verður kommunuskatturin mettur at hækka 4% frá 2025 til 2026. Kommuskatturin hækkar sostatt úr 1.099.983 t.kr. í FÆ-2025 upp í 1.143.982 t.kr. í hesum uppskotinum.

*Húsaleiguskattur*
Við støði í gongdini í inntøkunum frá húsaleiguskattinum í ár verður mett, at húsaleiguskatturin fer at verða 2 mió. kr. í 2026. Í upprunaligu fíggjarætlanini fyri 2025 varð húsaleiguskatturin settur til 1 mió. kr. Húsaleiguskatturin verður sostatt 1 mió. kr. hægri í hesum uppskotinum samanborið við FÆ-2025.

*Felagsskattur*
Í upprunaligu fíggjarætlanini fyri 2025 varð búskettarað við 58 mió. kr. í felagsskatti. Av tí, at inntøkurnar frá felagsskattinum hava víst seg at kunna sveiggja nógv frá ári til ár, verður búsketterað við somu inntøkum frá felagsskattinum í 2026, sum upprunaliga varð búsketterað við í FÆ-2025.

*Skattur av eftirlønargjøldum*
Í dagførdu metingini verður mett, at skatturin av eftirlønargjøldum fer at verða munandi hægri í bæði 2025 og 2026 enn upprunaliga mett. Hetta kemst serliga av stóru lønarhækkingunum í hesum sáttmalaskeiðnum. Eftirlønarskatturin fer tí úr 231.376 t.kr. í upprunaligu fíggjarætlanini fyri 2025 upp í 265.000 t.kr. í hesum uppskotinum til fíggjarætlan 2026.

*Veiðigjald*
Fyrstu ferð komunurnar fingu part av veiðigjaldinum var í 2025, og mett var, at Tórshavnar kommuna fer at fáa 800 t. kr. í veiðigjaldi í ár. Mett verður, at Tórshavnar kommuna fer at fáa á leið somum upphædd í 2026.

*Tøkugjald*
Fyrstu ferð komunurnar fingu part av tøkugjadinum var í 2025, og mett var, at Tórshavnar kommuna fer at fáa 200 t. kr. í tøkugjaldi í ár. Mett verður, at Tórshavnar kommuna fer at fáa á leið somum upphædd í 2026.

*DIS, FAS og frádráttir*
Inntøkurnar á hesi kontuni vera mettar at fara at verða eitt vet minni í 2026 enn í upprunaligu fíggjarætlanini í 2025. Inntøkurnar verða mettar til 34.000 t.kr. í hesum uppskotinum til fíggjarætlan 2026 í mun til góðar 35.000 t.kr. í FÆ-2025.

*Samlaðu inntøkurnar*
Samanlagt hækka inntøkurnar hjá Tórshavnar kommunu tí 5,4% í hesum uppskotinum samanborið við FÆ-2025.

**Rakstrarútreiðlsur**
Vanliga mannagongdin í uppskotinum til fíggjarætlan er, at samlaði vøksturin í rakstrarútreiðslunum skal liggja innanfyri karmin av metta vøkstrinum av samlaðu inntøkunum. Hetta merkir, at í hesum uppskotinum eigur vøksturin í samlaðu rakstrarútreiðslunum í mesta lagi at vera 5,4%.

í hesum uppskotinum til fíggjarætlan 2026 er samlaði vøksturin í rakstrarútreiðslunum 4,9%.

Munandi partur av samlaðu rakstrarútreiðslunum eru lønarútreiðslur. Samlaði lønarvøksturin var stórur frá 2024 til 2025. Hetta komst fyrst og fremst av stórum vøkstri í sáttmálalønunum á føroyska arbeiðsmarknaðinum, men løgtingssamtyktin um lønarlyft til ávísar fakfelagsbólkar hevði eisini sína ávirkan á vøksturin í lønarútreiðslunum hjá kommununi í 2025.

Flestu sáttmálarnir við tey stóru føroysku fakfeløgini ganga út í 2026, tá ið nýggir sáttmálar skulu gerast fyri tey komandi tvey árini. Hetta, saman við tí, at renturnar og prísvøksturin er lægri nú enn tá verandi sáttmálar á arbeiðsmarknaðinum vórðu gjørdir, benda á, at vøksturin í samlaðu lønarútreiðslunum hjá kommununi ikki verður líka stórur í 2026 sum í 2025.

Niðanfyri er í stuttum greitt frá broytingunum í rakstrinum á ymsu greinunum í fíggjarætlanini 2026.

**§ 1 Kommunal fyrisiting:**
Á grein 1 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 5,5%, svarandi til góðar 5,8 mió. kr. Broytingin er í høvuðsheitum broytingar í sáttmálalønum. Harumframt fer ein góð 1 mió. kr. til løgtingsvalið og fólkatingsvalið, sum vera í 2026.

**§ 2 Almanna- og heilsumál:**
Á grein 2 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 4,2%, svarandi til smáar 15 mió. kr. Eldraøkið er framskrivað við sama virksemi sum í dag og bert lønarhækkanir eru lagdar afturat. Tilhaldið í Tórsgøtu er flutt á egið rakstrarstað 2740 Tilhaldið í Tórsgøtu frá ávikavist 2720 Heilsuhúsið (rakstur) og 2722 Tilboð (lønir og brúkaragjøld).

Sosiala deild hækkar nakað. Framskrivingin er við sama virksemi sum í dag, men har eru nøkur gjøld løgd inn fyri foreldraførleikakanningar og arbeiðsroyndir til tey ungu. Somuleiðis eru nøkur tænastugjøld hækka so sum vistarhald og fundarsamsýningar til barnaverndarnevndina.

**§ 3 Børn og ung:**
Á grein 3 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 6,1%, svarandi til 15,7 mió. kr. Á hesi greinini er tað serliga barnatalið, sum stýrir játtanini. Í 2026 fer vøksturin í rakstrinum serliga til, at stovnsgjaldið fyri vøggustovubørn verður óbroytt í 2026 í mun til 2025, umframt annan vøkstur í rakstrinum av stovnunum og leigugjøldum. Somuleiðis er starvsaldurin fyri námsfrøðingar hækkaður eitt lønartrin og leiðslan er tikin úr normeringini.

**§ 4 Undirvísing:**
Á grein 4 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 8,2%, svarandi til 4,7 mió. kr. Á hesi greinini er tað talið av børnum og ungum í fólkaskúlunum, sum stýra játtanini. Munandi partur av vøkstrinum í rakstrarútreiðslunum fara til Skúlan á Fløtum, Eysturskúlan, Sankta Frans skúla, Skúlan á Argjahamri og Skúlan við Løgmannabreyt.Talan er um stóran árgang. Ein eyka 1. flokk í Sankta Frans skúla og ein

forskúla á Argjahamri. Hartil er gjald fyri heildartilboð á skúlanum á Trøðni stórur parturin av vøkstrinum á grein 4, t.e. er konta 4142, sum kostar 2 mió. kr. eyka í 2026.

**§ 5: Mentan og frítíð:**
Á grein 5 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 2,5%, svarandi til 2 mió. kr. Nýggja svimjihøllin við langhyli í Gundadali fer við størsta partinum av vøkstrinum í rakstrarútreiðslunum á mentanar og frítíðarøkinum í 2026. Harnæst er tað ítrottaranlegg og býarbókasavn, sum hava við sær ein vøkstur í rakstrarútreiðslunum.

Fyri flestu stovnarnar er sama virksemi framskrivað. Bókasavnið hevur mist stóran part av stuðlinum frá landinum í sambandi við nýggju bókasavnslógina. Fyri svimjihøllina verður mett, at talið av ársverkum liggur á einum nøktandi støði. Inntøkugrudnarlagi hjá Ítróttarannlegg er munandi versna síðan við Tjarnir lat upp, hartil eru nýggj høll í Kaldbakk latin upp. Samlað ávirkar hetta raksturin við áleið 1,5 mió. kr.

**§ 6: Teknisk mál:**
Á grein 6 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 4,7%, svarandi til smáar 8 mió.

Infrakervið í Tórshavnar kommunu er útbygt munandi seinastu árini, t.d. Havnavegurin, tilhoyrandi tunnilin og stóru útskykkingarnar í Argjahaganum og í Hoyvíkshaganum. Hetta merkir øktar viðlíkahaldskostnaðir fyri kommununa.

Útrokningar vísa, at um allir hesir viðlíkahaldskostnaðir til m.a. vatnveiting, kloakkir, vegir, reinhald, asfalt, kavarudding og gøtuljós vórðu innførdir í einum, hevði tað kosta 9,9 mió. kr. Í staðin verður hesin viðlíkahaldskostnaður innførdur so líðandi, soleiðis at kostnaðurin fyri 2026 verður 3,6 mió. kr.

Útreiðslurnar til røkt av bygningum, fríðkan og viðlíkahald, røkt av kirkjugørðum og verkstaðið hjá kommununi vaksa millum 4 og 5%, mest orsaka av lønarvøkstri og príshækkingum annars.

**§ 7: Kommunal virkir:**
Á grein 7 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 3,5%, svarandi til 3,5 mió.

Á grein 7 verður mett, at netto rakstrarinntøkurnar hjá Tórshavnar kommunu frá Tórshavnar havn fara at verða umleið 1 mió. kr. hægri í 2026 enn tær vóru í 2025. Umleið 38 mió. kr. í 2026 samanborið við 37 mió. kr. í 2025.

Kommunala brennistøðin kemur at kosta Tórshavnar kommunu 4,7% meira í rakstri í 2026 enn í 2025, og brandstøðin kemur at kosta 6,2% meira í rakstri í 2026 enn í 2025.

**Skattafíggjaðar íløgur**
Í hesum uppskotinum eru góðar 263 mió. kr. eftir til skattafíggjaðar íløgur. Tórshavnar kommuna er farin undir at byggja nýtt Røktarheim á Stórubrekku, tí fer størsti parturin av íløguætlanini komandi ár til almanna og heilsumál. Íløgur verða somuleiðis gjørdar í børn og ung, og undirvísing. Peningur verður settur av til Oyggjaleikir 2027. Innan tekniska øki verða størstu íløgurnar m.a. gjørdar í átøk innan orku og umhvørvið, kloakk og spillivatnsætlan, og renovatión.

**Tilmæli:**
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober.

Býráðið skal viðgera uppskotið til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember. Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

**Fíggjarnevndin 17. september 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Framlagt.

## 209/25 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 38/25 | 25/00161-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 64/25 | 25/00161-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 58/25 | 25/00161-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 90/25 | 25/00161-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.04.2025 | 85/25 | 25/00161-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 118/25 | 25/00161-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 14.05.2025 | 98/25 | 25/00161-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 130/25 | 25/00161-1 |
| 9 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 175/25 | 25/00161-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 17.09.2025 | 166/25 | 25/00161-1 |
| 11 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 209/25 | 25/00161-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Framlagt.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 14. mai 2025:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Fremlagt.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni og juli verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. september 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Mánaðarroknskapurin fyri august 2025 er um teldupost 18. september 2025 sendur fíggjarnevndarlimunum til góðkenningar.

Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen hava góðkent roknskapin.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Framlagt.

# 210/25 Dagføring av serstøku byggisamtyktini oman fyri Argjahamar, matr. nr. 256, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.05.2025 | 78/25 | 25/04664-4 |
| 2 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 128/25 | 25/04664-4 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.09.2025 | 122/25 | 25/04664-4 |
| 4 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 210/25 | 25/04664-4 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.09.2025 | 137/25 | 25/04664-4 |

**Upprunin til málið**
Í 2021 varð samtykt at fara undir útstykking oman fyri Argjahamar, sí gamla málið, j.nr. *21/01777, Útstykking oman fyri Argjahamar,* og nýggja málið j. nr. *25/04323, Útstykking oman fyri Argjahamar – 21/01777.*
Økið liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og sambært ásetingunum fyri økið kunnu útstykkingar bert gerast sambært serstakari byggisamtykt. Serstøk byggisamtykt varð samtykt og hevur verið galdandi síðani september 2024. Sí j.nr. *25/04664-10, Galdandi serstaka byggisamtykt omanfyri Argjahamar.*

Ávegis verkætlanir í økisparti A (sethúsaøkið) og økisparti B (øki til almennan stovn) hava víst seg at krevja, at ávísar ásetingar at verða broyttar og/ella nágreinaðar. Sí j.nr. *25/04664-9, Serstøk byggisamtykt omanfyri Argjahamar – Við markeraðum rættingum.*

**Lýsing av málinum**
Galdandi serstaka byggisamtyktin er gjørd út frá eini heildarætlan, við rúm fyri umleið 190 bústøðum í sethúsum, raðhúsum og íbúðum. Endaliga talið av bústøðum er treytað av, hvussu økini í tilgongdini verða ment saman við keyparunum. Harumframt er eitt øki lagt av til bústovn/sambýli og eitt øki lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Ætlanin er býtt í 6 økispartar, har ymsar ásetingar eru galdandi, og leggur serstaka byggisamtyktin upp til, at heildarætlanir vera gjørdar fyri hvønn økispart sær.

Í samband við at heildarætlan fyri stovnin í øki B verður fyrireikað, verður mett hóskandi at økja um hæddarásetingarnar, soleiðis at mest loyvda hædd verður økt úr 10 m upp í 12,5 m. Somuleiðis verður mett ráðiligt, at strika áseting um mest loyvdu hæddir. Uppskotið um broyting er grundað á funktiónina á bygningum, ætlaður fólki við autismu. Bygningurin skal kunna veita friðaligar umstøður, og tað verður mett skynsamt at leggja tekniskar leiðingar (ventiliatión) høgt undir mønina. Sambært dagførdari heildarætlan fyri økið B, verður fasaduhæddin væl lægri enn 10 m, meðan mønuhæddin verður økt. Økta hæddarásetingin verður ikki mett at hava merkisverda ávirkan á ljósviðurskiftir í økinum.

Umsitingin metir eisini, at tað er hóskandi at nágreina ásetingar í øki A (sethúsaøkið), soleiðis at húsini fáa somu treytir sum sethúsaøkið í Klingurstjørn. Hetta verður gjørt við at loyva húsunum niðan fyri vegin at leggja 0,1 afturat byggistignum, sum kann nýtast til kjallara undir bilhúsi.

Ásetingar viðvíkjandi mest loyvdu hæddum verður eisini dagført, soleiðis at hesar samsvara við útstykking á Klingurstjørn.

Fyri at tryggja ein dám, sum ikki víkir frá Viðargøtu, Leitisgøtu og Rygsgøtu, har øll sethúsini eru bygd við longru útveggjasíðuni javnfjart við vegin, verður orðing løgd afturat, sum hevur til endamáls at tryggja ein framhaldandi dám í nýggju útstykkingini. Uppskot um tílíka orðing ljóðar soleiðis:

*Sethús skulu staðsetast soleiðis, at mønan og longra útvenda veggjasíðan stendur javnfjar við høvuðsvegin. Um sethúsini ikki hava mønu, skulu tey stillast, soleiðis at longra útvenda veggjasíðan er javnfjar við høvuðsvegin. Har*

*høvuðsvegurin vendir, kunnu sethúsini staðsetast við skjøldri móti vegi, soleiðis at longra útvenda veggjasíðan fylgir lendishallinum. Sí skjal 2 fyri vegleiðandi skipan av øki A.*

At enda mælir umsitingin til at dagføra hesi skjøl:

- Skjal 2 (Økisuppdeiling) verður rættað, soleiðis at linjur í økisparti A vísa til viðmælta staðseting av sethúsum. Bygningslinjur í økisparti C, D, E og F verða strikaðar, av tí at nágreinilig heildarætlan enn ikki er tøk.
- Heildarætlan fyri økispart B (almennur stovnur) verður løgd afturat sum skjal 4.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Ásetingar fyri A3 øki eru m.a.:
- Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk, og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.
- Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Nýggj serstøk byggisamtykt fyri útstykking omanfyri Argjahamar, matr. nr. 256, Kirkjubøur,* jnr: 22/07317
- *Útstykking oman fyri Argjahamar.* jnr: 21/01777

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *Galdandi serstaka byggisamtykt omanfyri Argjahamar*, jnr. 25/04664-10
- *Serstøk byggisamtykt omanfyri Argjahamar - Dagført uppskot*, jnr. 25/04664-10
- *Serstøk byggisamtykt omanfyri Argjahamar – Við markeraðum rættingum*, jnr. 25/04664-9

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja dagføring av serstøku byggisamtykt oman fyri Argjahamar sambært skjalinum *Serstøk byggisamtykt omanfyri Argjahamar - Dagført uppskot,* og beina málið í býráðið

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. mai 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Eftir kunningarfundin 12.05.2025 fyri grundstykkjaeigarar í útstykkingini oman fyri Argjahamar varð umsitingin gjørd varug við, at orðingar í ásetingini fyri øki A (Sethúsaøkið), kunnu misskiljast, og tí er neyðugt at rætta uppskotið, sum varð samtykt á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini 5. mai 2025.

Talan er um áseting, sum hevur til endamáls at tryggja sethúsadámin í mun til Viðargøtu, Leitisgøtu og Rygsgøtu, og sum í uppskotinum verður orðað soleiðis, at longra útvenda veggjasíða er javnfjar vegnum. Henda orðing verður rættað (sí skjal Dagføring av serstøku byggisamtyktini oman fyri Argjahamar, matr. nr. 256, Argir), soleiðis at ásetingin tryggjar, at takhallið á mønu fylgir vegnum og lendishallinum. Hetta verður mett at vera ein meira hóskandi áseting til tess at tryggja dámin.

Harafturat er orðing um sethús við sløttum taki tikin úr uppskotinum, og er endamálið við hesum somuleiðis at varðveita dámin. Ynskiligt er, at sethúsini sum minst verða bygd við slættari tekju, hetta tí at tað verður mett, at sethús við sløttum taki ikki hóska til brattlendið og verandi bygging norðan fyri nýggju útstykkingina.

**Nýggj skjøl**
- *Dagføring av serstøku byggisamtyktini omanfyri Argjahamar, matr. nr. 256, Argir,* jnr. 25/04664-12

Omanfyrinevndu broytingar vórðu sendar við telduposti til limirnar í byggi- og býarskipanarnevndini, og hava allir limirnir svarað aftur við telduposti ella telefon, at tey taka undir við broytingunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja dagføring av serstøku byggisamtykt oman fyri Argjahamar sambært skjalinum *jnr. 25/04664-12 Dagføring av serstøk byggisamtykt omanfyri Argjahamar, matr. nr. 256 Argir*.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Fyrst varð atkvøtt um eitt uppskot frá Kára Johansen um at beina málið aftur í nevnd.

Fyri at beina málið aftur í nevnd atkvøddu: Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen og Tróndur Sigurðsson.

Ímóti at beina málið aftur í nevnd atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Blankt atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen

Uppskotið um at beina málið aftur í nevnd varð felt við 5 atkvøðum fyri, 7 ímóti og einari blankari.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið við teimum broytingum, sum vórðu gjørdar eftir kunningarfundin 12. mai 2025.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen og Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Ongin

Málið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

**Ískoyti**
Broytingaruppskotið (skjal *25/04664-12*) varð lagt út til almenna hoyring 28. mai 2025, og var upprunaliga freistin at viðmerkja 9. juli 2025. Eftir kunnandi fund við eigarar í øki A, varð avgjørt at leingja freistina til 10. august 2025.

Tá hoyringsfreistin var farin, hevði kommunan móttikið 10 viðmerkingar. Øll mótmælini snúgva seg um broytingar í øki A, og er tí uppskotið um at økja mest loyvdu hædd í øki B, umframt nýggja fylgiskjal 4, sent Umhvørvismálaráðnum til endaliga viðgerð.

Niðanfyri er yvirlit og samanumtøka av móttiknu viðmerkingunum:

| Avsendari | Mótmæli/viðmerking |
|---|---|
| Mótmælari 1 | Mótmælt verður at lækka mest loyvdu hædd til 7 m<br>Ynskir at varðveita áseting um eyka nýtslustig |
| Mótmælari 2 | Mótmælt at mønan skal vera javnfjar eftir høvuðsvegnum |
| Mótmælari 3 | Mótmælt at mønan skal vera javnfjar eftir høvuðsvegnum<br>Mótmælt verður at lækka mest loyvdu hædd til 7 m<br>Mótmælt verður at frástøðan frá marki skal økjast við somu longd sum hægsta punkt við útvegg er hægri enn 6 m |
| Mótmælari 4 | Mótmælt verður at lækka mest loyvdu hædd til 7 m |
| Mótmælari 5 | Mótmælt verður at lækka mest loyvdu hædd til 7 m |
| Mótmælari 6 | Mótmælt at mønan skal vera javnfjar eftir høvuðsvegnum<br>Mótmælt verður at lækka mest loyvdu hædd til 7 m |
| Mótmælari 7 | Ynskja at loyva atkomu til Glyvursvegin<br>Eyka nýtslustig á ovasta vegi (linju 5) |
| Mótmælari 8 | Mótmælt at mønan skal vera javnfjar eftir høvuðsvegnum<br>Mótmælt verður at lækka mest loyvdu hædd til 7 m |
| Mótmælari 9 | Mótmælt at mønan skal vera javnfjar eftir høvuðsvegnum<br>Mótmælt verður at lækka mest loyvdu hædd til 7 m |
| Mótmælari 10 | Mótmælt at mønan skal vera javnfjar eftir høvuðsvegnum<br>Mótmælt verður at lækka mest loyvdu hædd til 7 m |

Samanumtikið snúgva mótmælini seg um hesi viðurskifti:
1. Mótmælt verður at lækka mest loyvdu hædd niðan fyri vegin úr 9 m til 7 m.
2. Mótmælt verður, at frástøðan frá marki skal økjast við somu longd sum hægsta punkt við útvegg er hægri enn 6 m.
3. Mótmælt verður um krav, at húsamøn skal fylgja høvuðsvegi og takhall skal fylgja lendinum.
4. Ynski um at loyva atkomu til Glyvursvegin.
5. Endurgjaldskrav.

**Til nr. 1: Mótmælini um at lækka mest loyvdu hædd niðanfyri vegin úr 9 m til 7 m**
Grundgevingarnar hjá mótmælarum:
- Ásetingin avmarkar eigarum at byggja fleiri sløg av typuhúsum, eitt nú frá Norðsetur og Brigada.
- Ásetingin avmarkar tilfarsnýtslu til tekjusløg, av tí at tað verður kravt at byggja við einum halli á 14 stig, um tekjan verður bygd úr aluminium ella eternitt. Hervið gerst tað truplari at velja bíligaru

og meira vanligu loysnirnar, sum eisini er vanlig søluvøra hjá føroysku byggibúðunum. Fyrimunur verður sostatt givin til ávísar takloysnir, so sum takpapp og takdúk, har eingi krøv eru til hallið á tekjuni.

- Avmarkaða hæddin ger tað í ávísum førum ómøguligt at installera eitt ventilatiónsaggregat á loftið, og tískil avmarkar hetta møguleikan fyri mekaniskari ventilatión í húsinum, og tað stríðir móti BK17.
- Tað er órímiligt, at hús oman fyri veg, sum í fleiri førum eru niðan fyri onnur hús, sleppa at byggjast hægri og harvið kunnu avmarka útsýnið. Í mótmæli (sí skjal 25/04664-17) verður út frá planeringskotu og halli grundgivið fyri, at ásetingin og lítli hæddarmunurin kann hava neiliga ávirkan á útsýnið/sólarljós á hús, ið verða bygd sambært broytingaruppskotinum niðan fyri vegalinju 4 og oman fyri vegalinju 3.

*Svar frá umsitingini:*
Umsitingin ásannar ótilætlaðu avleiðingarnar av hæddaravmarkingini, soleiðis sum uppskotið fyriliggur, og metir, at tað út frá grundgevingum omanfyri er ráðiligt at venda aftur til upprunaligu hæddarásetingarnar fyri øll hús í øki A.
Lendishallið og skipanin av útstykkingini tala ikki fyri stórvegis differentiering fyri bygging niðan fyri og oman fyri veg.
Eykabyggistigið á 0,1 og økt nýtslustig úr 0,6 til 0,8 var eisini grundað á galdandi áseitngar fyri útstykkingina við Klingurstjørn, har hús oman fyri vegin kunnu byggjast hægri, meðan hús niðan fyri vegin kunnu byggja eina hædd undir bilhúsi, og mælir umsitingin til, somuleiðis at taka hesar ásetingar úr og venda aftur til galdandi áseting.

**Til nr. 2: Mótmælt verður, at um hægsta punkt við útvegg er meira enn 6 m, skal frástøðan frá marki økjast við somu longd sum hægsta punkt er hægri enn 6 m.**

*Svar frá umsitingini:*
Í mótmælinum verður ikki víst á ítøkiliga grundgeving, men kann vísast á, at henda ásetingin søguliga hevur verið galdandi fyri sethúsaøkir í Almennu byggisamtyktini til tess at tryggja betri ljósviðurskiftir millum hús, har einvegis takhall kann elva til at útveggur verður bygdur hægri enn 6 m.
Líknandi treytir eru í galdandi bygningskunngerðini, og verður tískil mælt til at taka hesa ásetingina úr serstøku byggisamtyktini.

**Til nr. 3: Mótmælini um krav, at húsamøn skal fylgja høvuðsvegi og takhall skal fylgja lendinum:**
Grundgevingarnar hjá mótmælarum:

- Kravið avmarkar somuleiðis møguleika hjá eigarum at velja ymisk typuhús, har fleiri hava takhall og mønu, sum ikki er einføld at venda í mun til støddarlutfallið á matriklunum.
- Talan er ikki um eina lítla tillaging, men eina grundleggjandi avmarking.

*Svar frá umsitingini:*
Endamálið við orðingini er at taka fagurfrøðilig atlit. Nýggja útstykkingin verður knýtt í verandi útstykking á Argjahamri, har flestallar tekjur hava mønur, ið eru javnfjarar vegunum. Somuleiðis verður mett, at byggingin fellur betri í lendi, tá takið fylgir lendishallinum.
Útstykkingin kemur at verða sera sjónlig frá stórum parti av býnum, og húsini koma bæði at sýnast minni og kunnu skapa betri ljósviðurskiftir millum vegirnar.
Av hesum ávum verður mælt til at halda fast við hesa áseting.

**Til nr. 4: Ynski um at loyva atkomu til Glyvursvegin**
Grundgevingarnar hjá mótmælarum:
Grundstykkjaeigari oman fyri ovasta vegin í øki A ynskir at hava møguliga innkoyring umvegis Glyvursvegin. Grundgivið verður fyri, at hetta kann minka um ferðsluna millum húsini.
Í hesum sambandinum verður eisini skotið upp, at byggistigið verður økt við 0,1, eins og niðan fyri vegin.

*Svar frá umsitingini:*

Tað er ikki ráðiligt at loyva atkomu til ovastu húsini umvegis Glyvursvegin, av tí at Glyvursvegurin ikki er ætlaður sum ein býlingsvegur, og at tað tískil av trygdarávum verður frámælt at hava íbindingar til sethús. Ynskið um økt byggistig á ovastu vegunum er tískil ikki ráðiligt.

**Til nr. 5: Endurgjaldskrav**
Grundgevingarnar hjá mótmælarum:
Tríggjar av viðmerkingunum leggja dent á, at um hildið verður fast í avmarkandi ásetingunum, verður endurgjald kravt fyri fyrireikandi arbeiðið, so sum greinan av byggimøguleikum, sniðgeving, keyp av tekningum og rágeving, sum hevur verið til fánýtis, um byggisamtyktarbroytingin kemur í gildi.

- Eigarar hava keypt grundstykki í góðari trúgv, grundað á galdandi byggisamtykt og reglur. At seta grundleggjandi avmarkingar eftir keypið av grundstykkinum, er ikki bert órímiligt, men eisini eitt brot á sáttmálan.
- Broytingar í byggisamtyktini so seint í tilgongdini eiga at geva fríari treytir heldur enn at vera avmarkandi.
- Undantaksloyvi eigur at vera givið til eigarar, sum hava fyrireikað sambært galdandi reglum áðrenn broytingaruppskotið.

*Svar frá umsitingini:*
Tað kann hava fíggjarligar avleiðingar fyri tey, sum eru komin ávegis í at fyrireika bygging, sum vegna broytinginar í byggisamtyktini ikki lata seg gera longur. Við endurgjaldskrøvum kann hetta møguliga eisini fáa fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa. Torført er at meta um í núverandi støðu, hvussu stórt endurgjaldið kann gerast.

Viðv. at geva eigarum, sum hava gjørt fyrireikandi arbeiði, undantaksloyvi, so er hetta ikki ein møguleiki hjá byggivaldinum, tá talan tá helst er um stór undantaksloyvir.

Umsitingin hevur tikið hetta til eftirtektar og hevur tí tikið fleiri av broytingunum aftur, soleiðis at byggisamtyktin ikki kemur at darva verandi framda arbeiði. Mett verður tó, at tað býarskipanarliga er vert at halda fast í kravinum um takhall, vísandi til grundgevingarnar omanfyri.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Um broytingaruppskotið verður tikið fult aftur, merkir hetta, at áseting um javnfjara møn somuleiðis fellur burtur.
Um tillagaða broytingaruppskotið verður samtykt, sum umsitingin mælir til (sí skjal *Dagføring av serstøku byggisamtyktini omanfyri Argjahamar, rættað 15.09.2025*, jnr. 25/04664-33), har hildið verður fast við kravið um, at mønan skal vera javnfjar høvuðsvegi og takhall skal fylgja lendinum, og har aðrar ásetingarnar fyri øki A verða sambært upprunaligu/galdandi byggisamtykt, skal nýggja uppskotið leggjast aftur til almenna hoyring í 6 vikur.

**Nýggj skjøl**
Jnr. 25/04664-33 Dagføring av serstøku byggisamtyktini omanfyri Argjahamar, rættað 15.09.2025
Jnr. 25/04664-34 Hoyringsskriv samlað

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja tillagað broytingaruppskot, sambært skjalinum *Dagføring av serstøku byggisamtyktini omanfyri Argjahamar, rættað 15.09.2025*, jnr. 25/04664-33, har hildið verður fast við kravið um, at mønan skal fylgja vegnum, men at bygging í øki A annars samsvarar við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. september 2025:** Útsett.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Tikið av skrá.

# 211/25 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 1000a, Eirargarður 2, Tórshavn. Frá D3 til A2 og broyting av ásetingum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.09.2025 | 123/25 | 25/08524-1 |
| 2 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 211/25 | 25/08524-1 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við ætlanina um at menna Tórshavn sum lestrarbý, er stórur tørvur á at fáa til vega lestrarbústaðir í býnum sum heild, men serliga í økinum nær sjálvum kampusøkinum.

Eitt av átøkunum í mun til at fáa til vega lestrarbústaðir er at umbyggja Eirargarð 2 til lestrarbústaðir.

**Lýsing av málinum**
Eirargarður 2 er partur av 4 bústaðarblokkum, sum vórðu bygdir í 60'unum og m.a. vórðu nýttir til bústaðir til sjúkrasystralesandi. Mitt í 90'unum ella seinnu helvt av 90'unum fluttu sjúkrasystrarnar út, og Heilsumálaráðið inn í Eirargarð 2, og bygningurin hevur so líðandi verið tillagaður tí virksemi, sum hevur verið í bygninginum.

Teir 3 ovaru blokkarnir liggja sum A2 øki til høga bústaðabygging, meðan tann niðasti, Eirargarður 2, liggur sum D3 øki til almenna bygging, í sambandi við at hann hevur verið nýttur til ymiska almenna fyrisiting, umframt til sjúkraflutningstænastuna.

Hesir 4 bygningarnir vórðu bygdir sum ein eind, og býarskipanarliga framstanda hesir 4 blokkarnir eisini sum ein eind, tá hugsað verður um natúrliga avmarkaða økið, snið, dám og nýtslu, og tað verður mett hóskandi at broyta byggisamtyktarøkið, soleiðis at tann 4. blokkurin, Eirargarður 2, verður lagdur aftur at A2 økinum, sum hinir tríggir blokkarnir eru partur av. Hetta er í samsvari við upprunaliga endamálið hjá bygninginum, umframt við ynskið um at veita lestrarbústaðir í økinum nær við Kampusøkið á Frælsinum.

Í 2012 varð ein heildrætlan gjørd fyri Eirargarð, sí skjal *Góðkend heildarætlan á matr. nr. 1000a og 1000e í Tórshavn.* Sambært teirri heildarætlan verður ein av høvuðsatkomunum til Eirargarð løgd beint vestan fyri teir 4 íbúðarblokkarnar. Mælt verður til, at broytingin av A2 økinum við Eirargarð fyriheldur seg til hesa ætlanina, og A2 økið verður broytt soleiðis, at tað liggur natúrliga avmarkað av vegunum í hesum uppskotinum, sí skjal *Heildarætlan og uppskot til byggisamtykt.*

Í mun til bygging í A2 øki, so ber sambært almennu byggisamtyktini fyri økið einans til at byggja bústaðir í økinum. Í A1 økjum, sum eru vanlig sethúsaøki, er áseting um, at tað ber til at geva serloyvi til annað virksemi, sum t.d. handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, treytað av at hetta ikki er til ampa, ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur. Ein tílík áseting er í samsvari við nútíðar burðardygga býarskipan, har gerandishentleikar eru í nærumhvørvinum hjá bústøðunum, og er kanska í enn størri mun viðkomandi at hava í økjum sum A2 økjum, ið er eitt av teimum økjunum, ið hava hægst fólkatættleika. Tískil verður mælt til, at § 6, stk. 1 verður broytt, soleiðis at orðing um annað virksemi verður løgd afturat, umframt at áseting um umhvørvisflokking kemur afturat.

> *§ 6, stk. 1. Umráðisparturin verður lagdur til hús í fleiri hæddum til bústaðarbygging. Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum bústaðarøki, og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.*
>
> *Stk. 2. Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
§ 6. Ásetingar fyri umráðispart A2 í 3. grundumráði, áðrenn broyting:
1. Umráðisparturin verður lagdur til hús í fleiri hæddum til bústaðabygging.
2. Útstykking verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt øki.
3. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,25.
4. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,8.
5. Hús skulu ikki verða bygd við meira enn 5 hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
6. Hús skulu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m til mønuna.

§ 6. Ásetingar fyri umráðispart A2 í 3. grundumráði, uppskot til broyting:
1. Umráðisparturin verður lagdur til hús í fleiri hæddum til bústaðabygging.
   Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum bústaðarøki, og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.
2. Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.
3. Útstykking verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt øki.
4. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,25.
5. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,8.
6. Hús skulu ikki verða bygd við meira enn 5 hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
7. Hús skulu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m til mønuna.

§ 20. Ásetingar fyri umráðispart D3 í 3. grundumráði
1. Umráðisparturin verður lagdur til stórar almennar stovnar fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.
2. Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.
3. Byggistigið skal, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, ikki fara upp um 0,25.
4. Nýtslustigið skal, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, ikki fara upp um 0,5.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Øll útstykking í A2 øki skal gerast sambært serstakari byggisamtykt. Hendan skal skipa økið neyvari við bygging, parkering, vegaføring, fríøki v.m., sí mál *nr. 25/08573 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Eirargarð, matr. nr. 1000a, Tórshavn.*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Eirargarð, matr. nr. 1000a, Tórshavn,* journal nr. 25/08573.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
*Umsókn til TK ísv. Byggisamtyktar broyting Eirargardur,* journal nr. 25/08524-2
*Ásetingar fyri A2 øki – broytingar,* journal nr. 25/08524-3
*Góðkend heildarætlan á matr. nr. 1000a og 1000e í Tórshavn,* journal nr. *25/08524-5.*
*Heildarætlan og uppskot til byggisamtykt,* journal nr. 25/08524-6.
*Almenna byggisamtyktin – áðrenn broyting,* journal nr. 25/08524-7.
*Almenna byggisamtyktin – eftir broyting,* journal nr. 25/08524-7.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:

- Broyta byggisamtyktina fyri Eirargarð 2 frá D3 øki til A2 øki sambært kortskjalinum *Almenna byggisamtyktin – eftir broyting*.
- Broyta ásetingar í § 6, stk. 1, soleiðis at orðing um annað virksemi verður løgd afturat, umframt at áseting um umhvørvisflokking kemur afturat.
  *§ 6, stk. 1. Umráðisparturin verður lagdur til hús í fleiri hæddum til bústaðarbygging. Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum bústaðarøki, og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.*
  *Stk. 2. Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.*
- Beina málið í býráðið

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt.

# 212/25 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Eirargarð, matr. nr. 1000a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.09.2025 | 124/25 | 25/08573-1 |
| 2 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 212/25 | 25/08573-1 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við ætlanina um at menna Tórshavn sum lestrarbý er stórur tørvur á at fáa til vega lestrarbústaðir í býnum – serliga í økinum nær sjálvum kampusøkinum.

Eitt av átøkunum í hesum sambandi er at umbyggja Eirargarð 2 til lestrarbústaðir.

Teir 3 ovaru blokkarnir, Eirargarður 4, 6 og 8, liggja sum A2 øki til høga bústaðabygging, meðan tann niðasti, Eirargarður 2, liggur sum D3 øki til almenna bygging, í sambandi við at hann hevur verið nýttur til ymiska almenna fyrisiting, umframt til sjúkraflutningstænastuna. Uppskot um at broyta almennu byggisamtyktina, soleiðis at Eirargarður 2 verður lagdur afturat A2 økinum, liggur til viðgerðar, sí mál *Broyting av almennu byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 1000a, Eirargarður 2, Tórshavn. Frá D3 til A2 og broyting av ásetingum*.

Í § 6, stk. 2 í almennu byggisamtyktini er ásett, at útstykking í A2 økjum einans er loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

So statt verður mælt til, at serstøk byggisamtykt verður gjørd, ið skipar økið við teimum 4 høgu bygningum til íbúðarbygging, vegaføring, parkering, fríøki v.m. Harafturat skal vera rúm fyri, at vinnuligt virksemi í umhvørvisflokki 1-2 kann vera í økinum, treytað av at hetta ikki spillir dámin á økinum sum bústaðarøki. Serstaka byggisamtyktin skal somuleiðis tryggja, at verandi lógligt virksemi kann halda áfram í bygningunum. Økið, ið uppskotið til serstøku byggisamtyktina í fyrsta umfari er galdandi fyri, er A2 øki, ið sæst á skjali *Almenna byggisamtyktin – eftir broyting.*

**Lýsing av málinum**
Á viðhefta áhugakorti sæst, hvørji býarskipanarlig áhugamál eru í økinum, sum atlit skulu takast til, tá økið verður skipað, sí skjal *Áhugakort - Eirargarður*. Her sæst m.a., at økið er partur av einum varðveitingarverdum grønum øki og býarumhvørvi. Harafturat er ein miðingarlinja, frá Vesturkirkjuni og út á Hamaran á Argjum, sum atlit skal takast til.

Býarumhvørvi
Eirargarður 2 er partur av 4 bústaðarblokkum, sum vórðu bygdir í 60'unum og m.a. vórðu nýttir til bústaðir til sjúkrasystralesandi. Mitt í 90'unum ella í seinnu helvt av 90'unum fluttu sjúkrasystrarnar út og Heilsumálaráðið inn í Eirargarð 2, og bygningurin hevur líðandi verið tillagaður tí virksemi, sum hevur verið í bygninginum.

Hesir 4 bygningarnir, sum eru millum hægstu bygningar í landinum, vórðu bygdir sum ein eind og býarskipanarliga framstanda teir eisini sum ein eind, tá hugsað verður um natúrliga avmarkaða økið, snið, dám og nýtslu. Teir eru somuleiðis partur av tí størru eindini av bygningum á Eirargarði, og hava teir sama dám, tilfar og snið sum hesir, tó so at hæddin á hinum bygningunum er lægri.

Grønt øki
Økið millum bygningarnar og vegirnar a Eirargarði er lutfalsliga órørt, og lyngur eru í stórum parti av økinum, og hesin grøni, "órørdi" dámurin eigur at verða varðveittur í størst møguligan mun.

Miðingarlinja

Tað er ikki ætlanin at fremja útvendigar broytingar í bygningunum, og tískil ávirkar hetta ikki miðingarlinjuna frá Vesturkirkjuni og út á Hamaran.

Annað
Tað er ikki ætlanin, at bygningarnir skulu vaksa í vavi. Tað merkir, at hædd og vídd í fyrsta umfari verður órørd, tó so at rúm skal vera fyri minni útbygging eftir tørvi. Allir bygningarnir eru í 6 hæddum, og hvør hæddin er millum 350-450 $m^2$ til víddar – samlaða gólvvíddin er uml. 9600 $m^2$.

Parkering verður skipað sum partur av eini heildarloysn fyri alt sjúkrahúsøkið. Parkeringin verður so statt skipað í eini heildarloysn fyri økið, og nevnast kann, at Landsverk hevur víst á, at 11 parkeringspláss verða løgd til sjúkraflutningstænastuna. Somuleiðis vísir Landsverk á, at arbeitt verður við eini nýggjari heildarætlan fyri parkering og ferðslu á Eirargarði, og fara Landsverk í 2026 at taka upp samskifti við Tórshavnar kommunu um nýskipan av teimum viðurskiftunum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Uppskot um at broyta ásetingar fyri A2 øki í almennu byggisamtyktini verður viðgjørt, sí mál *Broyting av almennu byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 1000a, Eirargarður 2, Tórshavn. Frá D3 til A2 og broyting av ásetingum*. Niðanfyri standa ásetingarnar fyri A2 øki, og tað, sum er skrivað við reyðum, er tað sum sambært uppskotinum verður lagt afturat ásetingunum fyri A2 øki í almennu byggisamtyktini.

§ 6. Ásetingar fyri umráðispart A2 í 3. grundumráði
1. Umráðisparturin verður lagdur til hús í fleiri hæddum til bústaðabygging.
   Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum bústaðarøki, og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.
2. Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.
3. Útstykking verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt øki.
4. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,25,
5. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,8.
6. Hús skulu ikki verða bygd við meira enn 5 hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
7. Hús skulu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m til mønuna.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ætlanin er, at hendan serstaka byggisamtyktin seinni skal vaksa til at fevna um alt sjúkrahúsøkið í Eirargarði og niðanfyri J. C. Svabosgøtu. Landsverk skrivar soleiðis í umsókn síni:

> "*Sbrt. Heildarætlanini fyri Eirargarð frá 2012 var ætlanin at fáa gjørt eina serstaka byggisamtykt fyri økið í síni heild. Landsjúkrahúsið, Heilsumálaráðið og Landsverk eru byrjaði uppá innleiðandi greiningar í hesum sambandi og koma innan nakrar mánaðir at taka upp samskifti við Tórshavnar kommunu hesum viðvíkjandi.*
>
> *Tørvur er á, at gera nærri greiningar og framskrivingar av tørvinum hjá Landssjúkrahúsinum komandi mongu árini áðrenn søkt verður um at gera eina serstaka byggisamtykt fyri hesar matriklarnar: 1000a, 1000b, 1000e, 969i, 969a, 976 og neyst."* Sí alla umsóknina í skjali *Umsókn til TK ísv. Byggisamtyktar broyting Eirargarður og* heildarætlanina frá 2012 í skjali *Góðkend heildarætlan á matr. nr. 1000a og 1000e í Tórshavn.*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Broyting av almennu byggisamtyktini fyri part av matr. nr. 1000a, Eirargarður 2, Tórshavn. Frá D3 til A2 og broyting av ásetingum,* journal nr. 25/08524

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

| | Býráðsfundur<br>18. september 2025 | Blað nr.: 647<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
*Áhugakort – Eirargarður,* journal nr. 25/08573-2
*Góðkend heildarætlan á matr. nr. 1000a og 1000e í Tórshavn,* journal nr. 25/08524-3
*Umsókn til TK ísv. Byggisamtyktar broyting Eirargarður,* journal nr. 25/08573-4
*Almenna byggisamtyktin – eftir broyting,* journal nr. 25/08524-6

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at serstøk byggisamtykt verður gjørd sambært leistinum lýstur omanfyri, og at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. september 2025:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Birgir Nielsen, Kári Johansen, setir sum treyt, at nýggjur atkomuvegur til sjúkraflutningstænastuna verður við í verkætlanini.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið.

Einmælt samtykt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:50**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Elsa Berg | Heðin Mortensen | Heidi Lava Elgeirsdóttir |
| Annita á Fríðriksmørk | Anja Weyhe | Kristianna Winther Poulsen |
| Bergur Robert Dam Jensen | Guttormur í Skála | Annfinn Brekkstein |
| Tróndur Sigurðsson | Kári Johansen | Høgni Vilhelmsen |
| | Birgir Nielsen | |